| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1110 |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 23. november 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 268/23 – 295/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Súsanna Olsen
Turið Horn
Bogi Andreasen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 269/23 | 23/06851-1 | Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 23. november 2023 | 1113 |
| 270/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 1114 |
| 271/23 | 23/05280-2 | Merittútbúgving í námsfrøði | 1116 |
| 272/23 | 23/06151-1 | Ríðibreyt í Havnardali, Føroya Ríðingarfelag | 1121 |
| 273/23 | 21/02924-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium | 1124 |
| 274/23 | 22/05165-2 | Vognrúm og garður - Býlingshúsið á Ternuryggi | 1131 |
| 275/23 | 23/01292-1 | Spælipláss til Miðstovnin | 1134 |
| 276/23 | 23/05741-3 | Dagstovnurin á Argjum – Spælitorn í garðinum | 1138 |
| 277/23 | 18/04396-3 | Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum | 1140 |
| 278/23 | 20/03466-1 | Tórshavnar býarsavn : Umbygging av savnsbygninginum á Frúutrøð 1, matr. nr. 645a | 1155 |
| 279/23 | 23/06202-1 | Brúkaragjøld búpláss, heimahjálp og umlætting | 1161 |
| 280/23 | 23/03546-1 | Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan | 1163 |
| 281/23 | 17/02247-1 | Gøtan kring Havnina og fiskastykkið | 1169 |
| 282/23 | 18/01334-2 | Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir | 1182 |
| 283/23 | 23/00660-1 | Kloakkætlan 2023 | 1186 |
| 284/23 | 23/03112-1 | Nýggj pumpuskipan til vatngoymsluna í Kollafirði | 1191 |
| 285/23 | 23/05090-2 | Umsókn til ummælis um sundurbýti til eigaraíbúðir av matr.nr. 255el, Argir | 1194 |
| 286/23 | 23/05733-2 | Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 4 | 1198 |
| 287/23 | 23/06143-1 | Íverksetan av nýggjum ABF reglum | 1202 |
| 288/23 | 23/05757-1 | Umbøn um eykajáttan til konto 7110 Renovatión | 1204 |
| 289/23 | 23/00472-4 | Umbøn um broyting av byggisamtykt matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastað | 1206 |
| 290/23 | 23/04693-1 | Broyting av ásetingum fyri B4 øki í almennu byggisamtyktini. Minst loyvda grundstykkjavídd. | 1208 |
| 291/23 | 23/04493-5 | Servituttir á matr.nr. 1214g, Tórshavn. | 1210 |
| 292/23 | 23/04832-7 | Matr.nr. 91ab, Kollafjørður. | 1212 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 293/23 | 23/06764-1 | Eykajáttan 2023 | 1214 |
| 294/23 | 23/05027-2 | Fíggjarætlan 2024, Tórshavnar kommuna | 1217 |
| 295/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 1229 |

**Til viðgerðar**

## 269/23 Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 23. november 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 269/23 | 23/06851-1 |

**Málslýsing**
Birgir Nielsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Bogi Andreasen, eru loknar.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Tikið til eftirtektar.

| | Býráðsfundur<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1114<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 270/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 59/23 | 23/00153-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 87/23 | 23/00153-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 119/23 | 23/00153-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 136/23 | 23/00153-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 195/23 | 23/00153-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 238/23 | 23/00153-1 |
| 9 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 270/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Tikið til eftirtektar.

Súsanna Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 271/23 Merittútbúgving í námsfrøði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 150/23 | 23/05280-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 198/23 | 23/05280-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 299/23 | 23/05280-2 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 271/23 | 23/05280-2 |

**Upprunin til málið**
Trot á námsfrøðingum

**Lýsing av málinum**
Í løtuni starvast 264 námsfrøðingar og 429 hjálparfólk á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu (TK). Fyri at røkka kravinum um, at 2/3 av starvsfólkahópinum eru námsfrøðingar, er neyðugt við 200-250 námsfrøðingum afturat teimum verandi.

Útgangstøðið er, at tað er ein landsuppgáva at útbúgva nóg nógvar námsfrøðingar til krøv, sum Løgtingið hevur samtykt.

Tað er sera ósannlíkt, at Fróðskaparsetur Føroya megnar at útbúgva nóg nógvar námsfrøðingar bara til TK. Umframt aðrar kommunur kappast TK við Almannaverkið og skúlaverkið um at draga námsfrøðingar til økið.

Kannað hevur verið, um TK sum arbeiðsgevari kann bjóða hjálparfólkum, sum hava verið í starvi í minsta lagi 5 ár, møguleika fyri at útbúgva seg sum námsfrøðingur, har TK rindar útbúgvingina og útreiðslur knýttar at tí.

Um talið á námsfrøðingum veksur, so hækkar góðskan á tænastuni til børn og foreldur. Um fleiri námsfrøðingar leggjast afturat í TK, fer tað mest sannlíkt at skapa eina *pull-effekt*, tvs. at tað fer at draga fleiri aðrar námsfrøðingar til økið.

<u>Útbúgvingin</u>
Umsitingin hevur samskift við VIA University Collage í Viborg, sum hevur ment eina merittútbúgving í námsfrøði til fjarlestur.

Hendan merittútbúgvingin í námsfrøði hevur við sær, at tann lesandi er í starvi í TK, meðan hann er undir útbúgving. Tann lesandi skal liva upp til somu krøv sum í eini vanligari útbúgving í námsfrøði. Munurin er tann, at hendan útbúgvingin er lagað til tey, sum røkja eitt starv í gerandisdegnum.

Lestrartíðin er 3,5 ár ella 7 lestarhálvár (semestur).

Kravið fyri at verða upptikin á merittútbúgvinga er, at tann lesandi hevur 2 ára arbeiðsroyndir í einum námsfrøðiligum starvi og at tann lesandi hevur staðið ávís fak á miðnám ella staðið eina ítøkiliga meting av førleikum hjá tí lesandi, sum útbúgvingarstovnurin fremur.

Av tí at áhugin tykist at vera so stórur, kundi í fyrstu atløgu verið krav, at hjálparfólk í TK, sum kunnu skjalprógva 5 ára starvsroyndir í einum námsfrøðiligum starvi.

Kostnaðir fyri hvønn lesandi er 11.000 kr. fyri hvørja lestrarhálvu (semestur).

Harumframt eru kostnaðir til ferðing og uppihald í Danmark (Viborg) – hvør lestrarhálva

byrjar við undirvísing í Viborg í 4 dagar frá mánadag til hósdag og hvør lestrarhálva endar við undirvísing í Viborg í 4 dagar frá mánadag til hósdag. Roknast kann við, at tey lesandi brúka ein part av fríggjadegnum uppá ferðing, og tí verður 1 dagur lagdur afturat umframt teir 4 undirvísingardagarnir hvørt hálvár. Í alt eru tey lesandi burturstødd í 10 dagar tilsamans hvørt hálvár.

Aðrir partar av útbúgvingini verður gjørd uttanfyri arbeiðstíð og uppgávur v.m.

Samlaður kostnaður at útbúgva eitt lið við 20 hjálparfólkum til námsfrøðing verður 4,6 mió. kr. í 3,5 ár, ella uml. 650.000 fyri hvørt semestur.

Um TK samtykkir eina árliga játtan til, at tvey lið við 20 ella 30 lesandi útbúgva seg til námsfrøðing, kann TK hava fingið 40-60 námsfrøðingar á økið afturat eftir 4,5 árum, um øll gjøgnumføra útbúgvingina innan ásettu tíðina. Tað er umleið 20-25 % av námsfrøðingunum sum vanta fyri at 2/3 av starvsfólkunum eru námsfrøðingar.

Sí dømi niðanfyri, hvussu fíggjarætlanirnar frá 2024 til 2028 høvdu verið ávirkaðar, um játtað var at senda tvey lestrarlið við 30 fólkum frá 2024 til 2028.

| | **FÆ2024** | **FÆ2025** | **FÆ2026** | **FÆ2027** | **FÆ2028** | **Tils. 2024-2028** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið 1 | 1,98 mió.kr | 1,98 mió.kr | 1,98 mió.kr | 0,99 mió.kr | | 6,95 mió.kr |
| Lið 2 | | 1,98 mió.kr | 1,98 mió.kr | 1,98 mió.kr | 0,99 mió.kr | 6,95 mió.kr |
| Tils. (lið 1 og 2) | 1,98 mió.kr | 3,97 mió.kr | 3,97 mió.kr | 2,98 mió.kr | 0,99 mió.kr | 13,89 mió.kr |

Meðan hesi eru burtur til undirvísing, skulu avloysarar setast.

Avloysarar – kostnaðir pr. lesandi, pr. lestrarhálvu

| | Tímar | Tímaløn, avloysari | Kostnaður tils. 1 lestrarhálva | Kostnaður fyri 7 lestrarhálvur |
|---|---|---|---|---|
| Pr. lesandi fyri 1 lestrarhálvu í 10 dagar | 6 tímar pr. dag x 10 = 60 tímar | 134,71 kr. | 8082,6 kr. | 56.578,2 kr. |
| 20 lesandi fyri 1 lestrarhálvu | 1200 tímar | 134,71 kr. | 161.652 kr. | 1.131.564 kr. |
| 30 lesandi fyri 1 lestrarhálvu | 1800 tímar | 134,71 kr. | 242.478 kr. | 1.698.346 |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at umrøða málið, og um umsitingin skal arbeiða víðari málinum. 4

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Nevndin samtykti at arbeiða víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Saman við umboðum fyri VIA University Collage hava kunningarfundir um meirttútbúgvina í námsfrøði verið við stovnsleiðararnar, hjálparfólk og umsitingina annars

Kunnandi fundur var fyri stovnsleiðarum við serligum denti á, hvørjar avleiðingar útbúgvingin hevur fyri stovnar, sum hava merittlesandi. Sí hjálagt tvær glærur frá framløgu, sum lýsir lestrarætlanina alt tíðarskeið og fyrstu lestrarhálvu meira ítøkiliga.

Umleið 120 hjálparfólk møttu til kunningartiltakið, har greitt varð frá skipanina og kostnaðin hjá kommununi og einstaka lesandi. Undirtøkan fyri tiltakinum var stór, og í eini spurnakanning svaraðu 52, at tey vóru áhugað i at taka útbúgvingina, og 34 svaraðu, at tey kanska eru áhugað.

Fundur hevur eisini verið millum útbúgvingarstovnin og umsitingina um útbúgvingina, og hvussu kommunan kann fyrihalda seg í eini útbúgvinginartilgongd sum hesari.

<u>Kostnaður og hvør rindar</u>:
Umsitingin metir heimild vera fyri, at kommunan rindar kostnaðin fyri útbúgvingargjaldið, sum er umleið 60.000 kr. pr. lesandi yvir 7 lestrarhálvur (uml. kr. 9.000 pr. lestrarhálvu).

Harafturat metir umsitingin, at kommunan kann rinda eitt ískoyti á 2.000 kr. fyri ferðing aftur og fram FO-DK-FO tvær ferðir hvørja lestrahálvu. Og eitt ískoyti á 500 kr. pr. nátt fyri gisting (tilsamans 10 nætur pr. lestrarhálvu), meðan tann lesandi er í Danmark.

Hinvegin fær tann lesandi ikki løn, meðan hann er í Danmark í útbúgvingarørindum ella meðan hann hevur fjarundirvísing í Føroyum.

Tann lesandi rindar sjálvur fyri tilfar o.t. í samband útbúgvingina, og tann lesandi rindar sjálvur fyri aðrar útreiðslur í Danmark, t.d. kost.

Tann lesandi fær annars løn fyri teir tímar, hann er partur av normeringini á stovninum (setanarbræv). Tað hevur við sær, at ongar eykaútreiðslur er til avloysarar í mun til tað, sum upplýst var á síðsta fundi. Kostnaðurin hjá kommununi verður tí eisini minni, sí talvuna niðanfyri.

| | Flog-ferðaseðlar ískoyti | Gisting ískoyti | Útbúgvingar-gjald | Kostnaður tils. 1 lestrarhálva | Kostnaður fyri 1 ár | Kostnaður fyri 7 lestrarhálvur sum er 3,5 ár |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2.000 kr. aftur og fram FO-DK-FO tvær ferðir pr. ár | 500 pr. nátt. 10 yvirnáttingar pr. ár | Pr. lestrarhálva | | | |
| **Pr. lesandi fyri 1 lestrarhálvu** | 4.000 kr | 5.000 kr | 9.000 kr | 18.000 kr | 36.000 kr | 126.000 kr |
| **30 lesandi fyri 1 lestrarhálvu** | 120.000 kr | 150.000 kr | 270.000 kr | 540.000 kr | 1.080.000 kr | 3.780.000 kr |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | **FÆ2024** | **FÆ2025** | **FÆ2026** | **FÆ2027** | **FÆ2028** | **Tils. 2024-2028** |
| **Lið 1: byrjan feb. 2024** | 1.080.000 kr | 1.080.000 kr | 1.080.000 kr | 540.000 kr | | 3.780.000 kr |
| **Lið 2: byrjan feb. 2025** | | 1.080.000 kr | 1.080.000 kr | 1.080.000 kr | 540.000 kr | 3.780.000 kr |
| **Tils. (lið 1 og 2 FÆ2024-FÆ2028)** | 1.080.000 kr | 2.160.000 kr | 2.160.000 kr | 1.620.000 kr | 540.000 kr | 7.560.000 kr |

Upptøkukrøv:
Starvsfólk á VIA University Collage taka avgerð um, hvørjir umsøkjarar lúka krøvini at lesa til námsfrøðing. Upptøka verður kortini samskipað við kommununa fyri tey lesandi, sum kommunan rindar útbúgvingina fyri.

Av tí at Tórshavnar kommunu sum arbeiðsgevari rindar fyri útbúgving vm., tilskilar kommunan sær rættin til at velja, hvørji hjálparfólk í føstum starvi, sum fáa útbúgvingina uttan kostnað, eftir ávísum treytum. Her verður serliga hugsað um starvsaldur hjá tí lesandi og tal av lesandi pr. stovn. Kommunan skipar innanhýsis upptøkunevnd.

Fyrsta lestrarlið kann byrja í februar 2024. Umsóknarfreist er tann 11. desember 2023.

Alt er tó treytað av, um ætlanin verður samtykt og fígging er játtað til endamálið í fíggjarætlanini 2024, 2025, 2026 og 2027.

Møguleikin at bjóða nýggjum lestrarliðið at byrja útbúgving í februar 2025 kann takast upp í sambandi við fíggjarætlanina 2025.

Mett verður skilabest, at fíggingin til merittútbúgvingina í námsfrøði verður løgd inn á kontu 3215 Barnaansing annars og markað til endamálið.

Sí annars hjálagt skjal.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:

- at bjóða upp til 30 hjálparfólkum í føstum starvi á dagstovnaøkinum hjá Tórshavnar kommunu merittútbúgving í námsfrøði í samstarvi við VIA University Collage,
- at játtaðar verða kr. 1.080.000 fyri fíggjarárið 2024 og neyðuga játtan árini 2025, 2026 og 2027 til endamálið, og at
- játtanin verður flutt til kontu 3215 Barnaansing annars, markað til endamálið.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 272/23 Ríðibreyt í Havnardali, Føroya Ríðingarfelag

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 184/23 | 23/06151-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 300/23 | 23/06151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.11.2023 | 321/23 | 23/06151-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 272/23 | 23/06151-1 |

**Upprunin til málið**
Umsókn

**Lýsing av málinum**
Føroya Ríðingarfelag hevur sent mentamálanevndini umsókn um endurgjald.

Felagið vísir til dagførdu tunnilsætlanina í Marknagili, har verandi ríðingarbreyt hjá felagnum er. Sambært felagnum kemur tunnilin og ferðslan so nær ríðingarbreytini, at hon er ikki nýtilig. Sjónarmið felagsins er, at ferðslan fer at órógva hestarnar, so til ber ikki at venja ella kappast á breytini.

Felagið søkir tí um endurgjald frá kommununi, so at felagið kann gera nýggja ríðingarbreyt niðri á økinum hjá felagnum í Havnardali. Sjónarmið teirra er, at felagið hevur goldið ríðingarbreytina í Marknagili og hevur staðið fyri viðlíkahaldinum øll árini.

Felagið hevur gjørt uppskot til nýggja ríðingarbreyt, sum lutvíst er tillaging av verandi ringbreyt.

Tillagaða ringbreytin er uml. 576 metrar long. Langbreytin 500 metrar long, 10 metrar breið. Langbreytin fer niðan um Tvørá, har rør verður lagt í.

Felagið vil hava, at kommunan tekur teir 600 metrarnar, sum felagið hevur í Marknagili, og rindar fyri sama metratal til felagið til nýggju breytina í Havnardali.

Felagið ynskir sjálvt at standa fyri arbeiðinum, sum mett verður kostar uml. kr. 5,9 mió u/mvg. Miðalkostnaður pr. metur er eftir hesum uml. kr. 9.800.

Sí viðfestu skjøl, sum lýsa kostnaðarmeting, nøgdir, skurðir og tekningar.

Møguliga skal leigusáttmáli um lendi við Føroya Ríðingarfelag víðkast, um langbreytin gongur út um verandi økið.

Tað áleggur felagnum at fáa til vega øll myndugleikaloyvi til verkætlanina, áðrenn arbeiðið kann byrja og møgulig fígging frá kommununi verður goldin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hædd er ikki tikin fyri nøkrum fíggjarligum endurgjaldi til nýggja ríðingarbreyt í Havnardali í løgujáttanini til innkomuveg/tunnil. Tekniska deild metir harumframt, at tað er ikki vist, at innkomuvegurin fer at hava við sær, at ríðingarbreytin í Marknagili ikki kann nýtast longur.

Mentamálanevndin hevur ikki tøka játtan til endamálið.

| | **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1122 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/02539 Umsókn frá felagnum Føroysk Íslandsrossafelag um langa ríðingarbreyt (skeiðbreyt). Í málinum er upplýst niðurstøða frá friðingarmyndugleikanum, at einki má byggjast nærri enn 10 metrar frá Tvørá. Í málinum er eisini meting frá býarskipanardeildini um, at tað møguliga kundi verði bara ein long felags ríðingarbreyt, sum øll feløgini kundi nýtt saman.

21/02231 Umsókn um stuðul til víðkan og dagføring av kappingarøkinum hjá Føroya Íslandsrossafelag undir Kráarheyggi í Havnardal. Býráðið hevur játtað kr. 1 mió til endamálið. Sbrt. samtyktini er hetta grundað á, at feløgini missa kappríðingarbreytina við Hotel Føroyar orsakað av, at lendið skal brúkast til nýggja innkomuvegin. Peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir.

Mentamálanevndin hevur ikki viðgjørt hesi mál.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Ríðingarbreyt longdarskurðir
Kostnaðarmeting
Yvirlit yvir verkætlan langbreyt
Nøgdir (skurður og fylla)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | 5.905.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 5.905.000 u/mvg |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið vísandi til vantandi fígging.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Nevndin mælir til, at kommunan fíggjar kr. 5.500.000 av kostnaðinum, og játtar í hesum sambandi kr. 4.145.000 til ríðingarbreytina innan grein 5 soleiðis:

- kr. 1.180.000 av kontu 5275 LK52002 Kvøldskúlin
- kr. 1.000.000 av kontu 5275 LK52003 Kvøldskúlin, Hoydalar,
- kr. 1.965.000 av kontu 5475 LK54001 Býarbókasavn, og
- at restupphæddin verður løgd til fíggjarnevndina at játta.

Treyt fyri útgjaldi er, at Føroya Ríðingarfelagið hevur fingið til vega øll loyvi til byggingina. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Annika Olsen og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 22. november 2023:** Samtykt at játta 1,5 mió. kr., sum restar í, av konto 5775, íløguætlan 2024 Ríðibreyt í Havnardali og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð um tilmælini frá meirilutanum í fíggjarnevndini 15. november 2023 og tilmælið frá fíggjarnevndini 22. november 2023, ið vórðu einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 273/23 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.07.2021 | 196/21 | 21/02924-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2022 | 111/22 | 21/02924-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 25.10.2022 | 207/22 | 21/02924-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 272/22 | 21/02924-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 234/22 | 21/02924-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 21.03.2023 | 69/23 | 21/02924-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 95/23 | 21/02924-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 66/23 | 21/02924-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 148/23 | 21/02924-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 219/23 | 21/02924-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 204/23 | 21/02924-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 180/23 | 21/02924-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.11.2023 | 320/23 | 21/02924-1 |
| 14 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 273/23 | 21/02924-1 |

**Upprunin til málið**
Økja plásskapasitetin á dagstovnaøkinum sum heild

**Lýsing av málinum**
Í 2019 var útboð um útbygging av tveimum dagstovnum – Dagstovninum á Hamrinum við tveimum stovum og Býlingshúsinum vesturi á Flat við fýra stovum. Býráðið samtykti í tí umfarinum bert at byggja út Býlingshúsið vesturi á Flat.

Stór útstykkingarætlan er í umbúna oman fyri Argjahamar. Í uppskoti hevur verið at byggja nýggjan stovn við síðuna av Dagstovninum á Hamrinum, men annar møguleiki er at taka uppaftur verkætlanina og tilboðið, sum Búsetur vann, um at byggja út Dagstovnin á Hamrinum tó broytt til fimm stovur, ið økir plásskapasitetin við 76 plássum (36 vøggustovupláss og 40 barnagarðsstovupláss).

Lýsing av plásstørvi
Gjørd er nýggj greining av plásstørvinum í Tórshavnar kommunu her og nú og komandi árini, sí skjal. Tilflyting og høg burðatøl seinastu árini gera, at átrokandi tørvur er á fleiri vøggu- og barnagarðsstovuplássum í kommununi bæði her og nú og komandi árini.

Í juni 2021 eru umleið 1.780 stovnspláss í Tórshavnar kommunu 0-6 ár. Talan er um umleið 560 vøggustovupláss og 1.220 barnagarðsstovupláss.

Sbrt. greiningini er tørvurin her og nú á 100-120 fleiri vøggustovuplássum og 90-100 fleiri barnagarðsstovuplássum. Tá er talt við, at á fleiri stovnum eru ov nógv børn inni enn stovnurin er bygdur til, at nógv børn eru 1,5-2 ár, áðrenn tey byrja á stovni (hava bíðað eftir plássi), og aftur onnur, sum eru á ynskilista uttan yvirhøvur at bílagt pláss í skipanini.

Verða hesi stovnsplássini útvegað afturat, hevði plásskapasiteturin verið 660-680 vøggustovupláss (560 í dag) og 1.310-1.320 barnagarðsstovupláss (1.220 í dag).

Um burðatølini árini 2022-2027 vera sum undanfarnu árini uml. 300 um árið og við somu tilflyting uml. 1,5% um árið, so veksur plásstørvurin eitt vet aftrat.

Aftrat avbjóðingini við plásstroti er starvsfólkatrot.

<u>Útbyggja plásskapasitetin</u>
Við Miðstovninum koma nýggj pláss aftrat væntandi um ársskiftið ella stutt eftir. Eftir summarfrítíðina lata nakrar stovur upp í Hoydølum, sum tó er tíðaravmarkað loysn.

Umframt verkætlanina á Hamrinum og seinni Dagstovninum á Argjum, eru aðrir dagstovnar, sum kunnu tillagast og byggjast út til tess at økja plásskapasitin. Hetta verður lýst nærri eftir summarfrítíðina eisini í hvønn mun tað loysir seg í mun til íløguna.

Stóri vøksturin í Hoyvík ger tað tó eisini alneyðugt at byggja nýggjan og helst ríkiliga stóran dagstovn har komandi árini.

Viðvíkjandi útbyggingarætlanini Dagstovnurin á Hamrinum er uppskot um at fáa í lag samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta útbyggingarætlan við støði í tilboðnum frá 2019, sí kostnaðarmeting (skjal).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Útstykkingarætlanin oman fyri Argjahamar
Vegatkoma frá rundkoyringini Glyvursvegur/Hamarin
Dagstovnurin á Argjum
Útbygging av Dagstovninum á Hamrinum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Upprit um tørvin á dagstovnaplássum nú og framyvir
Kostnaðarmeting/tilboð útbygging á Hamrinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla nevndini til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019 at leggja aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 05. juli 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 11. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur tikið upp samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019.

Tillagingar eru gjørdar í verkætlanini. Dagstovnurin á Hamrinum er broyttur til 3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, felagsøki og køk, starvsfólkarúm í miðjuni í bygninginum. Støddin er uml. 1.297m2, 6 stovur tilsamans.

P/F Búsetur boðar frá, at teir klára at byggja dagstovnin fyri uppruna m2 kostnaðin við index regulering. Tá er byggingin í samsvari við byggiskrá frá 13-03-2019.

Avbjóðingar hava verið við atkomuvegi og parkeringsøki rundanum nýggja tilbygningin á Dagstovnin á Hamrinum, tí stórur hæddarmunur er á lendinum og trongt er at útbyggja verandi parkeringspláss.

Avtalað er við Búsetur at gera arbeiðsvegin niðan til komandi Dagstovnin á Hamrinum. Parkeringspláss og atkomuvegur er ikki við í hesum prosjekti, men ein heildarætlan er gjørd fyri økið, har ið hetta arbeiðið verður gjørt liðugt seinni.

Parkeringsviðurskiftini til núverandi Dagstovnin á Hamrinum eru sum nú er í minna lagi. Umsitingin mælir til, at parkerings- og trafikkviðurskiftini skulu vera nøktandi og loyst, áðrenn verkætlanin er liðug. Talan er um tvífaldan tørv av parkeringsplássum, sum fáast skulu til vega.

Uml. kr. 450.000 kr eru settar av í tilboðnum hjá P/F Búsetur til spælipláss. Hetta er ikki nøktandi til at gera eitt fullgjørt og nútíðarhóskandi spælipláss. Meiri peningur má tí setast av til hetta seinni.

Tilboð frá P/F Búsetur við indexregulering og við øllum er kr. 54.038.606,00 v/ kommunalum mvg.

Innanfyri ein samlaðan karm uppá kr. 57 mió mvg íroknað er fíggjað arbeiðsvegur, tryggingar, listprýði, íbindingar v.m.

Tó er atkomuvegur, parkeringspláss og liðugtgerð av spæliplássi ikki íroknað.

Í sambandi við útbyggingina er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Fígging**
Tøkur peningur er kr. 31.000.000 á íløgujáttan innan grein 3 Børn og ung. Møguleiki er at fíggja kr. 10.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2023, og at játta restupphæddina uppá kr. 16.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at:

- Samtykt verður at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum eftir omanfyristandandi leisti.
- Umsitingin fær heimild at taka av tilboðnum og at gera heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um at byggja út Dagstovnum á Hamrinum.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 57.000.000, fíggjað soleiðis:
    - kr. 30.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum,
    - 1.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31013 Nýggjur dagstovnur á Argjum,
    - kr. 10.000.000 verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2023,
    - restupphæddin kr. 16.000.000 verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024, og at
    - fíggingin verður flutt til nýggja verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- Heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting av byggisamtyktini fyri økið.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið. Koma broytingar fyri skal málið fyri nevnd aftur.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Enmælt samtykt.

**Ískoyti**
Avbjóðingar hava verið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum. Atkoma og byggipláss liggja inni á arbeiðstøkumarkinum at gera útstykkingina oman fyri Argjahamar (ÚOA) hjá MT Højgaard Føroyar (hereftir MTH) við undirarbeiðstakaranum RTS Bygging. Atkoman og byggiplássið kunnu eftirfylgjandi gerast partur av atkomu og parkeringsøki til tann útbygda dagstovnin á Hamrinum.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við MTH um at gera hetta arbeiðið sum eykaarbeiði við somu eindarprísum sum í verkætlanini ÚOA. Hetta er játtað og endaliga tilboðið frá MTH er kr. 1.940.252,50 við mvg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Samtykt verður at fylgja omanfyristandandi leisti.

- Umsitingin fær heimild at taka av omanfyristandandi tilboði hjá MTH.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 1.940.252,50 kr við mvg. fíggjað soleiðis:

- Verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar leggur út fyri omanfyri lýsta jørðarbeiðið í 2023.
- Kr. 1.940.252,50 við mvg verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2024.
- Fíggingin verður flutt til verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum endurrindar í 2024 verkætlanini L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar fyri goldin útlegg. Verkætlanarleiðarin fyri L64019 hevur ábyrgd av at gera eina uppgerð innan 1. mars 2024 og at senda uppgerðina til fíggjardeildina.

-At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

Arbeiðið hjá undirarbeiðstakaranum RTS Bygging á útgrevstur, spreinging og planering fyri atkomu og byggipláss til Dagstovnin á Harminum er liðugt. Klárt er nú hjá P/F Búsetur at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum.

Sáttmáli at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum varð undirskrivaður 23.11.2022 millum Tórshavnar kommunu og P/F Búsetur.

Í sambandi við, at avbjóðingar hava verið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum, krevja P/F Búsetur endurgjald fyri ampa, mistan vinning og beinleiðis útreiðslur, sum Búsetur hevur havt av, at arbeiðið ikki kundi setast í gongd sambært sáttmála um útbygging av Dagstovninum á Hamrinum, dagfestur 23.11.2022. Somuleiðis hevur tíðarætlanin forskotið seg, soleiðis at arbeiðið hjá P/F Búsetur nú verður meiri tarnað av vetrartíðini enn áður ætlað.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við Búsetur um krav á endurgjald fyri ampa, mistan vinning og beinleiðis útreiðslur, sum Búsetur hevur havt av, at arbeiðið ikki kundi setast í gongd.

Umsitingin hevur biðið P/F Búsetur gera nýggja tíðarætlan, sum skal leggjast við í eina endurgjaldsavtalu. Semjan er treytað av, at alt yvirskotsgrót frá verkætlanini Dagstovninum á Hamrinum kann koyrast út á økið innanfyri 1 km, sum báðir partar eru samdir um. Somuleiðis er semjan treytað av, at býráðið góðkennir endurgjaldsavtaluna.

Endurgjaldsavtalan er áljóðandi 900.000 kr u/mvg, sum svarar til ein samlaðan kostnað á 956.250 kr í mvg (6,25%).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja endurgjaldsavtalu millum P/F Búsetur og Tórshavnar kommunu og í tí sambandi at játta kr. 956.250 íroknað mvg av fíggjarætlanini 2025 til kontu 3175 Barnaansing, L31011 Útbygging, Dagstovnurin á Hamrinum. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Leiðarin á Barna og ungdómsdeildini, leiðarin á Dagstovninum á Hamrinum og eindarleiðarin hjá B&U hava boðað frá, at flow og funktión ikki er nøktandi í verandi uppskoti á Dagstovninum á Hamrinum.

Í tí sambandi hevur umsitingin verið í samráðingum við Búsetur um at endurskoða uppskotið á Dagstovnin á Hamrinum, sum allir partar nú eru nøgdir við. Uppskotið fevnir seg í høvuðsheitum um:

- at vaksa um barnagarðsstovu til vøggustovu.
- at flyta vøggustovuna og vognrúmið í verandi bygningi saman við øllum vøggustovunum, so vøggustovur eru samlaðar og atskildar frá barnagarðsstovunum.
- at flyta køkin í útbyggingini og umbyggja og víðka verandi køk og goymslu, so at krøvini til matgerð v.m. verða uppfylt.
- at skilja vøggustovur og barnagarðsstovur við foldiveggi.
- at flyta goymslur og w.c.
- at økja um starvsfólkarúm, skrivstovu o.a.
- at vaksa um bólkarúm í vøggustovum.
- at bygningurin verður uml. 75 m² (brutto) størri.

Búsetur boða frá, at tá ið meir,- og minniveitingar eru gjørdar fyri omanfyristandandi broytingar verður samlaði kostnaður 896.194,50 uttan mvg. Hettar gevur ein prís á 11.949 kr/m². Hetta svarar til 952.207,00 kr við mvg (6,25%) í samlaðum kostnaði.

Búsetur boðar frá, at hetta uppskotið ikki kemur at ávirka tíðarætlanina, sum fyriliggur, og hesar broytingar hava við sær, at Búsetur í nógv minni mun koma at ávirka dagliga virksemi á stovninum, meðan bygt verður. Búsetur boðar eisini frá, at fyrivarni skal takast við brunatekniskum viðurskiftum og møguligum prísbroytingum hettar kann hava við sær, tá dagstovnurin verður øktur við 75 m².

Einasti tøkur løgukarmur innan grein 3 er konta 3175 LK31014 Frítíðarskúli í Kollafirði, har uml. kr. 1,6 mió eru tøkar.

Sí eisini mál 21/00499 Frítíðarskúlin í Kollafirði.

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1130 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | LK31014 | Frítíðarskúlin í Kollafirði | 3175 | L31011 | Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum | | 952.207 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 952.207 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og eindarleiðarin mæla til

- at samtykkja uppskotið og í tí sambandi at játta kr. 952.207 íroknað mvg av løgukamri 3175 LK31014 Frítíðarskúlin í Kollafirði til løgukontu 3175 L31011 Útbygging, Dagstovnurin á Hamrinum, og.

  at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. november 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at játtanin áljóðandi kr. 952.207 íroknað mvg. verður tikin av konto 6175, umsiting og røkt av fastari ogn, LK 61027 dagføring av kommunalum bygningum.

Málið beint í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 274/23 Vognrúm og garður - Býlingshúsið á Ternuryggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 199/22 | 22/05165-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 167/23 | 22/05165-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 264/23 | 22/05165-2 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 240/23 | 22/05165-2 |
| 5 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 274/23 | 22/05165-2 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á vongskúri og betri arbeiðsumstøðum.

**Lýsing av málinum**
Tað hevur verið ynski hjá stovninum í fleiri ár um at fáa betri umstøður til vognarnar, sum aftur er við til at gera arbeiðsumstøðurnar á stovninum betri.

Bygningsdeildin hevur fingið til vega uppskot til loysn við nýggjum vognskúri. Talan er um útbygging av stovninum og avleidd arbeiði uppá tekjuna og í túninum, sí skjal.

Arbeiðið er mett so mikið stórt, at tað hóskar betri til at verða framt sum íløga heldur enn av rakstri. Kostnaðarmetingin uppá HVÚ er uml. 1,6 mió, harumframt koma útreiðslur til prosjektering, ókent og mvg. Mett verður møguligt at fíggja arbeiðið av kontu 3175 Barnaansing (løgur).

Mett verður, at arbeiðið kann bjóðast út til 4-6 smærri handverkarafyritøkur.

Skotið verður upp at bjóða arbeiðið út, og at úrslitið av lisitatiónini verður latið mentamálanevndini aftur til støðutakan um arbeiðstøkusáttmála og fígging, sum eftirfylgjandi fer fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at bjóða út arbeiðið at gera vognskúr v.m. til Býlingshúsið á Ternuryggi og at leggja lisitatiónsúrslitið aftur fyri nevnd til støðutakan.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Lisitatión fyri vognrúmi v.m. var tann 04.08.2023. Fimm arbeiðstakarar vórðu bodnir at bjóða, og fýra lótu tilboð inn. Lægsta tilboðið átti Sp/f JEP Smíð kr. 2.111.287,00 (HVÚ). Aftrat kemur ókent 10%, fakeftirlit og byggileiðsla, tillaging av lásaskipan, endareingerðing og kommunalt mvg, tilsamans kr. 2.731.565.

Lisitatiónin umfataði eisini at skifta tekju á verandi bygningi, hettar verður fíggja umvegis rakstur av kontu 6110.

À kontu 3175 Barnaansing LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum eru tøkar kr. 2,5 mió til byggingina. Restupphæddin og tekjan o.a. verður fíggjað av rakstri kontu 6110.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at taka av lægsta tilboðnum hjá JEP Smíð, og í hesum sambandi at flyta kr. 2,5 mió. kr. av løgukarmi LK31015 Tillagingar á dagsovnaøkinum til nýggja lønarkontu Býlingshúsið á Ternuryggi, og at írestandi játtanin verður fíggjað av rakstri kontu 6110. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við fíggjarnevndini.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 275/23 Spælipláss til Miðstovnin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 50/23 | 23/01292-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.05.2023 | 94/23 | 23/01292-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 170/23 | 23/01292-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 262/23 | 23/01292-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 241/23 | 23/01292-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 275/23 | 23/01292-1 |

**Upprunin til málið**
Gerast skal spælipláss til dagstovnin Miðstovnin.

**Lýsing av málinum**
Umbyggingin av bygninginum í Kongagøtu til Miðstovnin er liðug. Aftrat Kongagøtu eru børn í gamla realskúlanum og húsini hjá Frk. Cohr verða eisini brúkt.

Stórur tørvur er á at skipa og gera stovninum vælvirkandi spælipláss, sum eisini brúkar og tekur atlit at serstaka umhvørvinum.

Hjálagt er uppskot frá byggi- og býarskipanardeildini til skipan av økinum, og hvussu tað viðvíkjandi umhvørvi, hentleikum o.ø. kundi sæð út. Sambært hesum er talan bæði um økið við Tróndargøtu/Kongagøtu og økið við gamla realskúlan/gamla kommunuskúlagarðin.

Týdningarmikið er, at leiðsla og starvsfólk á stovninum verða tikin við í ætlanina soleiðis, at eisini tey námsfrøðiligu atlitini verða tikin við.

Skotið verður upp, at umsitingin saman við stovninum ger eitt fullfíggjað uppskot bæði í mun til skipan av økinum og við spæliútgerð v.m.. Aftrat skal kostnaðarmeting og tíðarætlan fáast til vega.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til, at umsitingin saman við stovninum ger uppskot til spælipláss, harundir at gera kostnaðarmeting og tíðarætlan at leggja aftur fyri nevndina á fundinum í apríl.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Við støði í hugskotsskitsuni hjá Býarskipanardeildini, sum varð løgd fyri nevndini 8. mars, eru ymsu spæliøkini og atknýttar høvuðsfunktiónir løgd fyri leiðslu og starvsfólk á stovninum. Semja er um, at hetta er eitt gott grundarlag at arbeiða víðari við.

Umsitingin mælir til at seta ein uttanhýsis ráðgevara, sum skal útgreina ynskir í eini byggiskrá og standa fyri útboðnum sum heildararbeiðstøka. Ásannast má, at talan er ikki bert um eitt spælipláss til ein dagstovn, men er uttanfyri vanligu upplatingartíðirnar eisini at síggja sum hentleiki til miðbýin saman við spæliøkinum í Grasagarði. Hetta setir krøv bæði um dygd og funktión.

Tá útbjóðingartilfarið er klárt, verður tað sent í avmarkað útboð millum heildararbeiðstakarar, sum hava tekniskar og fakligar førleikar at byggja spæliplássið í tráð við galdandi reglur og normar.

Bygningsdeildin hevur royndir við trimum ella fýra arbeiðstakarum, sum hava samband við útlendskar veitarar av góðskuútgerð til spælipláss, og kunnu koma við kvalifiseraðum tilboðið uppá loysn, útgerð, arbeiði og prís.

Ráðgevin verður eisini settur til at hava byggileiðslu og eftirlit við sjálvum arbeiðnum.

Kostnaðarmeting
Bygningsdeildin hevur við støði í omanfyri standandi gjørt eina varisliga kostnaðarmeting, sum byggir á fermetraprísin á øðrum spæliplássum, sum nýliga eru gjørd í Tórshavnar kommunu. Kostnaðarmetingin liggur um kr. 3-3,5 mió og fevnir tá um útboð, ráðgeving/eftirlit, prosjektering, annleggsarbeiði, belegningar og leikur til økini (umframt mvg og byggiharraútreiðslur):

- Økið 1-3 ára gomul
- Økið 3-6 ára gomul
- Súkklubreyt
- Økið til útihugna

Tíðarmeting
Útbjóðingtilgongd og tilboðstíðarskeið tekur væntandi umleið tveir mánaðir. Sáttmáli kann sostatt í fyrsta lagi gerast um mánaðarskiftið august/september 2023, um Tórshavnar kommuna tekur av einum av innkomnu tilboðunum.

Arbeiðið kann væntast at taka 7-8 mánaðir í effektivari arbeiðstíð. Royndirnar eru, at tað er sera trupult at leggja síðstu hond á arbeiðir við spæliplássum (fallundirlag, sandur og grøn økir) um veturin. Tí má roknast við at arbeiðið í fyrsta lagi verður heilt liðugt um 1. juni 2024.

Í løguætlanin eru kr. 1 mió settar av til útiøki løgukonta 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, ið kundi verið brúkt til endamálið, har restfígging verður játtað seinni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja:

- at fáa til vega útbjóðingartilfar,
- at bjóða arbeiðið út millum tríggjar arbeiðstakarar í heildararbeiðstøku, og
  at úrslitið verður lagt aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 04. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygningsdeildin hevur gjørt avtalu við EYA arkitektar um at fáa til vega útbjóðingartilfar. Ein samlað verkætlan er mett til uml. 3 mió.

Fígging er ikki tøk til fullfíggjaða verkætlan. Fyri at fáa gongd á verkætlanina verður mælt til, at verkætlanin verður framd stígvíst so hvørt sum fígging fæst til vega. Á løgukarmi 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, eru tøkar kr. 1 mió. Víst verður tó eisini til mál 23/05741 um tørv á útbúnaði til spælipláss í Dagstovninum á Argjum, har skotið verður upp at býta játtanina soleiðis, at hálv millión verður játtað til spæliplássið til Miðstovnin og hálv millión til spæliplássið hjá Dagstovninum á Argjum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at játta kr. 500.000 av løgukontu 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, til rakstrarkontu 6110 markað til spælipláss hjá Miðstovninum.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Súsanna Olsen, taka undir við tilmælinum við tí broyting, at játtaðar verða kr. 1 mió av løgukontu 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, og kr. 0,5 mió av løgukarmi LK31017 Dagføring frítíðarskúlar til rakstrarkontu 6110 markað til spælipláss hjá Miðstovninum.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at fíggja spæliplássið av løgukontu 8375 Rakstrargøgn.

Málið at beina í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við fíggjarnevndini.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 276/23 Dagstovnurin á Argjum – Spælitorn í garðinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 171/23 | 23/05741-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 263/23 | 23/05741-3 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 242/23 | 23/05741-3 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 276/23 | 23/05741-3 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á nýggjum spælitorni.

**Lýsing av málinum**
Eftir eina eftirlitskanning frá Nordisk Legegpladsinstitut í summar varð avgjørt at taka niður spælitornið í garðinum niður, tí at tað var í so ringum standi, at tað var ikki ráðiligt at lata børn spæla í tí. Stórur tørvur er á at fáa eitt nýtt spælitorn, tí nógv annað er ikki í garðinum.

Á løgukarmi 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, eru tøkar kr. 1 mió. Víst verður tó til mál nr. 23/01292 um spæliøkið hjá Miðstovninum, har skotið verður upp at býta játtanina soleiðis, at hálv millión verður játtað til útbúnað á spælipássinum í dagstovninum á Argjum og hálv millión til spælipláissið hjá Miðstovninum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1139 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | LK31016 | Dagstovnar uttanumøk | 6110 | Uttanumøki | Dagstovnuri á Argjum | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla til at játta kr. 500.000 av løgukontu 3175 LK31016 Dagstovnar, uttanumøki, til rakstrarkontu 6110 markað til spælipláss hjá Dagstovninum á Argjum.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Súsanna Olsen, taka undir við tilmælinum við tí broyting, at játtaðar verða kr. 0,5 mió av løgukarmi 31017 Dagføring frítíðarskúlar.
Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at fíggja spæliplássið av løgukontu 8375 Rakstrargøgn.
Málið at beina í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálaevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við fíggjarnevndini.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 277/23 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 152/19 | 18/04396-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 187/19 | 18/04396-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 10/20 | 18/04396-3 |
| 4 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 31/20 | 18/04396-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 112/20 | 18/04396-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 130/20 | 18/04396-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 169/20 | 18/04396-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 175/20 | 18/04396-3 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 229/20 | 18/04396-3 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 19/21 | 18/04396-3 |
| 11 Trivnaðarnevndin | 06.05.2021 | 36/21 | 18/04396-3 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 10.06.2021 | 42/21 | 18/04396-3 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 65/21 | 18/04396-3 |
| 14 Trivnaðarnevndin | 29.11.2021 | 92/21 | 18/04396-3 |
| 15 Trivnaðarnevndin | 10.02.2022 | 10/22 | 18/04396-3 |
| 16 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 28/22 | 18/04396-3 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 42/22 | 18/04396-3 |
| 18 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 127/22 | 18/04396-3 |
| 19 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 117/22 | 18/04396-3 |
| 20 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 140/22 | 18/04396-3 |
| 21 Trivnaðarnevndin | 02.11.2023 | 52/23 | 18/04396-3 |
| 22 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 296/23 | 18/04396-3 |
| 23 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 277/23 | 18/04396-3 |

**Upprunin til málið:**
Mentamáldeildin og fundir um evnið

**Lýsing av málinum**
Mentamáladeildin hevur havt fund við partar sum varða av sernámsfrøðiliga økinum, og hvørji atlit Tórshavnar kommuna eigur at taka viðvíkjandi hølisviðurskiftum. Endamálið við fundinum var at fáa lýst økið og fáa greiði á ymsum viðurskiftum, sum ávirka rakstur og hølistørv til økið. Evnini, sum vórðu

viðgjørd, eru málsetningar fyri sertilboðini, sum eru í Tórshavnar kommunu, hvørji atlit skulu takast viðvíkjandi bygningum, eftirmeting av økinum, og leikluturin hjá Sernámi og hjá Skúlanum á Trøðni.

4-10 er í Skúlanum á Fløtum - eindini við Landavegin í bygningi fyri seg. Tilboðið er ætlað næmingum í 4.-10. fl., sum ikki rúmast í einum vanligum flokki, tí at ólagið ella trupulleikin hjá næminginum, krevur eina undirvísing og ein pedagogik, sum torført er at fremja í verki í einum vanligum flokki. Tilboðið er lýst, men tann lýsingin eigur at verða dagførd

Í Hoyvíkar skúla er tilboð til næmingar við autismu. Tilboðið er til næmingar í 1.-9.fl. og næmingarnir í grunddeildini ganga eisini í Frítíðarskúlan í Hoyvík. Eingin lýsing er av tilboðnum.

Lopfjølin heldur til í Margarinfabrikkini og er ætlað næmingum, sum av sosialum ella psykiskum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Endamálið er, at næmingarnir taka fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tilboðið er til næmingar í 7.-10. fl. lýsing er av Lopfjølini, og hon verður eftirmett nú.

Í Sankta Frans skúla er tilboð til næmingar við orðblindni. Tilboðið er til næmingar 3.- 7. fl.

Ætlanin er at halda fram at samskifta við ymsu partarnar við tí endamálið at fáa lýsing av øllum tilboðunum, at visitatónsreglurnar eru sjónligar, so foreldur, starvsfólk í skúlum og stovnum og myndugleikar kenna mannagongdirnar viðvíkjandi upptøku í ymsu tilboðini. Haraftrat er neyðugt, at greitt er, hvør tørvur er á sertilboðum í Tórshavnar kommunu. t.d. eftirlýsa skúlaleiðarar einum tilboði til børn í 0.-3. flokki og Undirvísingarstýrið hevur munnligan fyrispurning um pláss er til eitt tilboð til uml. 30 næmingar í einum á av fólkaskúlunum í kommununi.

Tá sertilboð er til børn í 0.- 3. flokki er talan bæði um skúla og frítíðarskúla, og tí er neyðugt at tilboðið er bæði í skúla og frítíðarskúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fólkaskúlalógin § 45 stk. 6

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Frágreiðing frá fundi um sernámsfrøðiliga økið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**

**Upprunin til málið:**
Mentamáldeildin og fundir um evnið

**Lýsing av málinum**
Mentamáladeildin hevur havt fund við partar sum varða av sernámsfrøðiliga økinum, og hvørji atlit Tórshavnar kommuna eigur at taka viðvíkjandi hølisviðurskiftum. Endamálið við fundinum var at fáa lýst økið og fáa greiði á ymsum viðurskiftum, sum ávirka rakstur og hølistørv til økið. Evnini, sum vórðu viðgjørd, eru málsetningar fyri sertilboðini, sum eru í Tórshavnar kommunu, hvørji atlit skulu takast viðvíkjandi bygningum, eftirmeting av økinum, og leikluturin hjá Sernámi og hjá Skúlanum á Trøðni.

4-10 er í Skúlanum á Fløtum - eindini við Landavegin í bygningi fyri seg. Tilboðið er ætlað næmingum í 4.-10. fl., sum ikki rúmast í einum vanligum flokki, tí at ólagið ella trupulleikin hjá næminginum, krevur eina undirvísing og ein pedagogik, sum torført er at fremja í verki í einum vanligum flokki. Tilboðið er lýst, men tann lýsingin eigur at verða dagførd

Í Hoyvíkar skúla er tilboð til næmingar við autismu. Tilboðið er til næmingar í 1.-9.fl. og næmingarnir í grunddeildini ganga eisini í Frítíðarskúlan í Hoyvík. Eingin lýsing er av tilboðnum.

Lopfjølin heldur til í Margarinfabrikkini og er ætlað næmingum, sum av sosialum ella psykiskum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Endamálið er, at næmingarnir taka fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tilboðið er til næmingar í 7.-10. fl. lýsing er av Lopfjølini, og hon verður eftirmett nú.

Í Sankta Frans skúla er tilboð til næmingar við orðblindni. Tilboðið er til næmingar 3.- 7. fl.

Ætlanin er at halda fram at samskifta við ymsu partarnar við tí endamálið at fáa lýsing av øllum tilboðunum, at visitatónsreglurnar eru sjónligar, so foreldur, starvsfólk í skúlum og stovnum og myndugleikar kenna mannagongdirnar viðvíkjandi upptøku í ymsu tilboðini. Haraftrat er neyðugt, at greitt er, hvør tørvur er á sertilboðum í Tórshavnar kommunu. t.d. eftirlýsa skúlaleiðarar einum tilboði til børn í 0.-3. flokki og Undirvísingarstýrið hevur munnligan fyrispurning um pláss er til eitt tilboð til uml. 30 næmingar í einum á av fólkaskúlunum í kommununi.

Tá sertilboð er til børn í 0.- 3. flokki er talan bæði um skúla og frítíðarskúla, og tí er neyðugt at tilboðið er bæði í skúla og frítíðarskúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fólkaskúlalógin § 45 stk. 6

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Frágreiðing frá fundi um sernámsfrøðiliga økið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Ískoyti**
Ein virknaðareftirmeting er gjørd av Lopfjølini. Tað er Mentamálaráðið, sum hevur biðið um hesa eftirmeting. Endamálið við eftirmetingini var at fáa staðfest, í hvønn mun málini fyri skúlatilboðið eru rokkin, og um tað er grundarlag fyri menning av tílíkum tilboðum.

Niðurstøðan í kanningini er, at tað er tørvur á tílíkum tilboðið, og at virksemið á Lopfjølini hevur positiva ávirkan á næmingarnar. Teir flestu hava fingið eitt fólkaskúlaprógv, og útlitini eru góð fyri, at teir eftir lokna gongd á Lopfjølini halda fram móri víðari útbúgving og/ella arbeiði.

Samstarv og samskifti millum fólkaskúlan og Lopfjølina er vantandi.

Innanhýsis í Lopfjølini er gott samskifti og samstarv.

Tilmælini eru, at Lopfjølin heldur fram, at lýsingin av tilboðnum skal endurskoðast, at tímatalið verður hækkað, at tilboðið verður til næmingar úr 5. – 9. flokk., at tað ikki er treyt, at næmingurin er í barnaverndarvirkisøki, samstarvið millum upprunaskúla og Lopfjølina verður styrkt og at kunnað verður um Lopfjølina.
Eftirmetingin er hjáløgd

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í heyst var verkstova um sernámsfrøðiliga økið. Frágreiðing frá verkstovuni er hjáløgd.

Í desember var fundur um støðuna og akutta tørvin. Á fundinum vóru umboð fyri Undirvísingarstýrið, Sernám og Tórshavnar kommunu. Umsitingin (barna- og ungdómsdeildin og mentamáladeildin) hava fund í januar, um m.a. tørvin á plássum og lýsing av heildartilboði, tvs. sertilboði, sum fatar um bæði skúla og frítíðarskúla.

Freistin fyri innskriving er 16. januar og stutt eftir, at freistin er farin ber til at siga, hvussu nógv børn, sum eru innskrivað, hava tørv á sertilboði. Væntandi eru tey eini fimm børn, sum hava akuttan tørv, og so eru nøkur aftrat.

**Komandi skúlaár**
Viðvíkjandi hølum til komandi skúlaár hevur umsitingin umrøtt hesar møguleikar:

a. fyribilshøli við Eysturskúlan, talan kann vera um fýra flokshøli, sum vanligir flokkar flyta út í, og so kann sertilboð vera inni í skúlanum.
b. fyribilshøli í garðinum í Eindini við Landavegin hjá Skúlanum á Fløtum (Ytra skúla), so kann 4-10 tilboðið víðkast til at umfata børn frá forskúla/fyrsta flokki til og við 10. flokki.
c. Lon 4 (ovara hæddin) á Frælsinum, sum kann vera til annan málbólk enn tann í 4-10 og samstarva við 4-10 tilboðið.
d. Lon 4 og lon 7, har eru 10 flokshøli, tvær skrivstovur, starvsfólkarúm, bókasavn, trý bólkarúm, goymslurúm, fimleikahøll og í niðaru hæddini í lon 7 eru høli til handaverk og list.
e. Lon 7 til sertilboð, men um lon 4 ikki er við, so skal lon 7 tillagast til tørvin.
f. Nám X flytur út á Frælsið, og sertilboð verður í hølunum hjá Nám X í Eysturskúlanum.

Stutt frágreiðing um nevndu møguleikar.

a.

Fyribilshølini talan kann vera um, eru tey, sum verða brúkt til Skúlan á Fløtum, byggingina. Um henda loysn verður vald, fara fýra flokkar í Eysturskúlanum at hava hesi høli til flokstovur, og so fær eitt sertilboð høli inni í skúlanum. Hetta sertilboð verður stovnað undir leiðsluni í Eysurskúlanum, og kann t.d. vera eitt tilboð fyri yngri næmingar, forskúla til við 3. flokki.

b.
Fyribilshølini talan kann vera um, eru tey sum verða brúkt til Skúlan á Fløtum, byggingina, ella tey, sum eru í garðinum hjá frk. Cohr. Verður hetta loysnin, verður 4- 10 tilboðið útbygt til at umfata forskúla til og við 10. flokki, og tilboðið verður framhaldandi undir leiðsluni í Skúlanum á Fløtum.

c.
Um lon 4 verður brúkt til sertilboð, ber ikki til at hava frítíðarvirksemi har, tó ber kanska til, at Havnar Dartfelag fær høli í kjallaranum, men tað krevur, at ventilatión verður gjørd har. Sum er verða hølini í kjallaranum í lon 4 bert brúkt til goymslu.

d.
Um talan verður um lon 4 og 7 á Frælsinum er neyðugt at gera ein sáttmála við landið, sum í minsta lagi er galdandi í fimm ár. Um bæði lon 4 og lon 7 verða tøk til sertiboð, verður 4-10 flutt úr eindini við Landavegin og nýggj størri eind, sum umfatar allar árgangirnar, verður skipað á á Frælsinum undir leiðslu av Skúlanum á Fløtum. Eindin kann so býtast sundur í tveir ella tríggjar aldursbóllkar, ella í tveir bólkar eftir, hvør tørvurin hjá næmingunum er.

Frítíðarskúlin í Kongagøtu hevur eina eind í leigaðum hølum á Frælsinum. Í hesi eind eru nøkur børn, sum ganga í Skúlanum á Trøðni. Um sertilboð verða í lon 4 og lon 7 á Frælsinum, hevði borið til at brúkt høli har til henda partin av frítíðarskúlanum, og so sagt leigumálið upp.

Um farið verður úr eindini hjá Skúlanum á Fløtum við Landavegin, verður bygningurin tøkur til onnur endamál, og tað kundi so verið til onkrar av frítíðarfelagsskapunum, sum hava verið frammi í sambandi við bygningin á Frælsinum. Haraftrat kann talan vera um Skansastovu til onkrar av hesum felagsskapum.

e.
Um talan bert verður um lon 7 er neyðugt at gera ymsar tillagingar, t.d. til starvsfólkahøli, og talan kann so antin verða um eitt tilboð aftrat  ella til 4-10, sum so fær tikið eitt sindur fleiri næmingar.

f.
Um Nám X flytur út á Frælsið verður neyðugt at gera ein sáttmála við landið um lon 7 umframt onnur serhøli í bygninginum. Um Nám X flytur út ber til at skipa eitt stórt  sertilboð í Eysturskúlanum, sum verður undir leiðsluni í skúlanum.

**Langtíðarloysnir**
Tær langtíðarlosynir, sum eru eyðsýndar eru:
- at Nám X flytur út á Argir, og so verða høli tøk í Eysturskúlanum.
- í sambandi við høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla, verður skúlin útbygdur, so pláss verður fyri einum sertilboði aftrat ella fyri einum størri tilboði fyri næmingar við autismu
- at byggja Eysturskúlan út, so pláss verður fyri einum sertilboði har.

**Fíggjarligar avleiðingar**
Viðvíkjandi fyribilshølum er avgerandi um til ber at nýta hølini, sum Tórshavnar kommunu longu eigur. Kostnaðurin aftrat verður so fyri flyting og fundament umframt tillaging av hølum.

Viðvíkjandi bygninginum á Frælsinum verður neyðugt at økja um viðlíkahaldsútreiðslurnar av lon 4 og saman við Landsverki økja útreiðslurnar til viðlíkahald fyri tann partin, sum er felagsogn, og haraftrat gera nýggjan sáttmála og avtalu við landið um møguligu leigu. Harumframt er ætlanin um gerðabýti við landið um bygningin í sambandi við kampusætlanina.

Aftrat hesum verða stovningarútreiðslur til fleiri serflokkar umframt rakstrarútreiðslur til hesar flokkar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin 5. feb. 2020.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umboð fyri Mentamáladeildina, Barna- og ungdómsdeildina og Húsaumsitingina hava verið á fundi við leiðsluna í Eysturskúlanum og hugt at umstøðunum har. Tosað varð um at flyta fyribilshølini, sum eru í garðinum hjá frk. Cohr niðan til Eysturskúlan, so til ber at skipa eitt sertilboð til børn í forskúla til og við 3. flokki í skúlanum. Í løtuni eru tríggir næmingar í fyrsta flokki í Eysturskúlanum í lonunum í Hoydølum meginpartin av skúladegnum.

Tørvur er á fleiri plássum í sertilboðum í Tórshavnar kommunu, og mett verður, at tað er umráðandi at skipa eitt skúla- og frítíðarskúlatilboð til tey yngstu børnini líknandi tilboðnum, sum er í Skúlanum á Fløtum til næmingar í 4. til og við 10. flokki. Tilboðið í Skúlanum á Fløtum er tó bert eitt skúlatilboð, einki skipað frítíðartilboð er til 4-10.

Á fundinum vísti leiðslan í Eysturskúlanum á møguleikan, at um fyribilshølini í garðinum hjá frk. Cohr verða flutt niðan til Eysturskúlan, so kunnu hølini verða til lærugreinina náttúru og tøkni, og eitt sertilboð kann so skipast í hølunum í A-lonini, sum verða brúkt til náttúru og tøkni í dag. Hølini eru beint við førleikastovuna og í sernámsfrøðiliga økinum hjá skúlanum.

Fyrimunirnir við at skipa eitt sertilboð inni í einum skúla eru, at tilboðið er tættari at skúlanum, at næmingarnir eru ein partur av skúlanum, næmingarnir hava størri møguleika at kenna seg sum ein part av felagsskapinum, starvsfólkini eru ikki í bygningi fyri seg, men partur av starvsfólkahópinum, og leiðslan er á staðnum.

Mett verður, at uml. fimm børn, sum eru innskrivað í fyrsta flokk skúlaárið 2020/21, hava tørv á serligum tilboði. Um eitt sertilboð til 1. – 3. flokk verður í Eysturskúlanum, verður tað til uml. 15 børn, ætlanin er tó ikki at byrja við so nógvum, men heldur taka børn inn so við og við, so tað um eini tvey ár er komið upp á fult næmingatal.

Tey fyrstu árini verður bert talan um børn í 1.- 3. flokki, ætlanin er so, at seinni kann sertilboðið víðkast til at fevna um forskúlabørn eisini.

Hugt var at økinum við Eysturskúlan, og mett var, at fyribilshølini kundu verið sett upp í skúlagarðinum við A-lonina móti Djóna í Geilgøtu. Kostnaðarmetingin at flyta hølini, gera fundament, seta tey upp aftur við Eysturskúlan og gera neyðugar installatiónir er 650.000 kr.

Kostnaðarmetingin at laga hølini inni í skúlanum slíkt sertilboð er er 60.000 kr., talan er í hesum sambandi um at seta ein vegg upp og seta hurð í, sum gongur út í garðin. Aftrat hesum er tørvur á innbúgvi, útgerð og tilfarið til bólkin, mettur kostnaður fyri tað er 165.000 kr.

Leigumálið um lonirnar í Hoydølum er galdandi til 31. desember 2020, tí kann tilboðið vera í Hoydølum hetta árið út. Men best er, um til ber at flyta í Eysturskúlan sum skjótast. Frítíðarskúlin í Kongagøtu brúkar fyribilshølini, og verða tey sostatt ikki tøk fyrrenn flutt er í nýggja bygningin úti á Fløtum í summar. Tað kann verða ein avbjóðing at fáa hølini flutt og tøk hjá Eysturskúlanum at taka í nýtslu til

skúlaársbyrjan í august. Tað er óivað meir sannlíkt, at hølini kunnu vera liðug eftir heystfrítíðina í oktober.

Frítíðarskúlin hjá børnunum í sertilboðnum er Smílibýlið. Ætlanin er, at frítíðarskúlin Smílibýlið brúkar fyribilshølini seinnapart, tá skúlavirksemið eru liðugt, Tað eru næmingar í 4.- 6- árgangi, sum hava náttúru og tøkni Um hølini verða innrættað til lærugreinina náttúru og tøkni, ber eisini væl til hjá frítíðarskúlanum at skipa virksemið har við denti á náttúruna.

Ætlanin er at gera leiðreglu um sertilboðið líknandi henni, sum eru galdandi fyri tilboðið, ið er í Eysturskúlanum hetta skúlaárið (í lonunum í Hoydølum). Samstarvspartarnir eru Eysturskúlin, Barna- og ungdómsdeildin, Mentamáladeildin, Undirvísingarstýrið/ Uttanríkis- og mentamálaráðið og Sernám.

Nýggi parturin av Argja skúla verður eisini tøkur, tá Skúlin á Fløtum flytur í nýggja skúlan. Har ber til at skipa sertilboð, og talan kundi so verið um, at 4-10 fer úr skúlabygninginum við Landavegin (Gula skúla) og út á Argir. Tilboðið hevði so verið víðkað til næmingar í grunddeildini og verið til uml. 60 næmingar, sum vóru býttir í tríggjar deildir, grund-, mið- og hádeild. Hetta kundi verið ein fyribilsloysn í eini 5 ár, og sertilboðið hevði hildið fram undir leiðsluni í Skúlanum á Fløtum.

Arbeitt eigur at verða fram ímóti, at sertilboð í mest møguligan mun verða inni í skúlum, tí verður mett skilabest at skipa sertilboð til yngru næmingarnar í Eysturskúlanum og undir leiðsluni har. Tað er eisini umráðandi, at sertilboðini ikki blíva ov stór, tí tað er avmarkað, hvussu nógvir næmingarnir kunnu vera í einum skúla, áðrenn tað fyllir ov nógv í vanliga gerandisdegnum í skúlanum.

Kostnaðarmetingin at skipa sertilboð til grunddeild í Eysturskúlanum er 815.000 kr. Sí hjálagda kostnaðarmeting.

Um samtykt verður at seta á stovn serrtilboð í Eysturskúlanum, verður málið lagt fyri aftur á næsta fundi í mentamálanevndini við tilmæli um fígging og leiðreglu/samstarvsskjali fyri skipanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at samtykkja at seta á stovn sertilboð til grunddeild í Eysturskúlanum og at farið verður undir endaligar fyrireikingar at skipa tilboðið.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Víst verður til hjáløgdu kostnaðarmeting. Umsitingin hevur mett um møguleikar fyri fígging og vil mæla til at verkætlanin verður fíggjað av fylgjandi kontum:

Konta 4140 Ætlanir á skúlaøkinum – 275 tkr. (tøkt at raðfesta)
Konta 4113 Velbastaðar skúli – 50 tkr. (minni tørvur)
Konta 4175 Dagføring av skúlum 158 tkr. (játtan áður ætlað til gerð av byggiskrá til framtíðar høvuðsumvæling v.m. av Hoyvíkar skúla. Er ikki aktuelt í 2020).
Konta 4124 Frískúlin í Havn 275 tkr. (minni tørvur)
Tilsamans 758 tkr.

Samstarvsskipan o.a.
Leiðreglur/samstarvsskjal millum avvarðandi partar og gjøllari lýsing av tilboðnum verður lagt fyri nevndina til komandi fund. Støðið verður tikið í leiðregluni frá í fjør-

Hoyring av skúlastýrinun í Eysturskúlanum
Av tí at talan er um ávísar broytingar í undirvísingarligum og praktiskum viðurskiftum í skúlanum eigur málið at vera sent til ummælis í skúlastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at senda ætlanina til ummælis hjá skúlastýrinum í Eysturskúlanum
og
at tilboðið til 1.-3.flokk í Eysturskúlanum verður fíggjað við at flyta:
b). 50 tkr. av kontu 4113 til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
c). 50 tkr. av kontu 4113 Velbastaðar skúli til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
d). 158 tkr. av kontu 4175 Dagføring av skúlum til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
e). 275 tkr. av kontu 4124 Frískúlin í Havn til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Ætlanin at skipa sertilboð er send skúlastýrinum í Eysturskúlanum til ummælis. Svarið frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum er hjálagt.

Skúlastýrið mælir frá, at fyribilshøli verða sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum, men staðfestir tó, at tað er tørvur á tílíkum tilboði í Tórshavnar kommunu, og at bæði leiðsla og starvsfólk í skúlanum rúma væl hesum tilboði.

Grundgevingarnar fyri frámælinum eru:
1.
a) at tað er ikki nøktandi at seta fyribilshøli upp í skúlagarðinum
b) at Tórshavnar kommuna ikki leggur í tilboðið, tá ið hølisviðurskiftini, sum kommunan bjóðar skúlanum afturfyri at rúma tilboðnum, eru tvey brúkt fyribilshøli
2.
a) at tað minkar munandi um tað lítla økið, børnini hava at spæla á
b) at tað misprýðir skúlan, at hølini arkitektoniskt ikki hóska til skúlabygningin, og tað sendir eitt signal um, at hetta ikki verður gjørt heilhjartað
c) at vandi er fyri, at hølini verða standandi
d) at økið við skúlan kann ikki samanberast við grøna umhvørvið í Hoydølum, sum er stórur partur av læringsætlanini hjá serflokkinum
e) at skal sertilboðið vera á sama matrikli sum Eysturskúlin, so mælir skúlastýrið til, at skúlin verður útbygdur við einari lon aftrat, og at umstøðurnar í útiøkinum verða betri.

Skúlastýrið mælir til at skipa verður soleiðis fyri, at sertilboðið kann verða verandi í Hoydølum, til ein útbygging er farin fram í Eysturskúlanum, sum nøktar tørvin hjá sertilboðnum. Viðmerkingarnar frá skúlastýrinum verða tiknar við í viðgerðini av staðsetingarmøguleikum og í sambandi við byggimálsviðgerðina í verður í næstum.

**Fígging**
Feilur er í upphæddunum og kontunum í tilmælinum, sum varð samtykt á fundinum í mentamálanevndini 13. mai, og verður uppskotið til fígging, tí lagt fyri nevndina aftur.

Mælt verður til at fíggja verkætlanina av hesum kontum:
4113 Velbastaðar skúli 75 tkr.
4124 Frískúlin í Havn 315 tkr.
4126 Forskúli til Lítlaskúla 20 tkr.
4140 Ætlanir á skúlaøkinum 275 tkr.
4141 Undirvísingarportalur 10 tkr.

4142 Aðrar útreiðslur skúlar 29 tkr.
4144 Skúlabarnaflutningur 30 tkr.
Tilsamans 754 tkr.

Ætlanin er at megna at fíggja ætlanina innanfyri henda fíggjarkarm, hóast talan er um lægri upphædd, enn kostnaðarmetingin er.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at sertilboðið í Eysturskúlanum verður fíggjað av hesum kontum:
a) 275 tkr. av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
b) 75 tkr. av 4113 Velbastaðar skúli
c) 315 tkr. av 4124 Frískúlin í Havn
d) 20 tkr. av Forskúli til Lítlaskúla
e) 10 tkr. av 4141 Undirvísingarportalur
f) 29 tkr. av 4142 Aðrar útreiðslur skúlar
g) 30 tkr. av 4144 Skúlabarnaflutningur
h) Mælt verður eisini til at játtaðu upphæddirnar verða fluttar á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Í sambandi við at ADHD felagið hevur sent opið bræv um at finna pláss til serflokkar, serliga í Skúlanum á Fløtum, hava umboð fyri mentamáladeildina havt fund við felagið, har greitt var frá, at málið er partur av størri evni um alt sernámsfrøðiliga økið, og at umsitingin í Tórshavnar kommunu hevur havt fundir og verkstovur við avvarðandi myndugleikar –serliga um verandi tilboð.

Á skúlaøkinum eru hesi tilboð:

- Hoyvíkar skúli hevur eitt tilboð til børn í autismu-spektrinum. 15 næmingar eru í tilboðnum
- Í Eysturskúlanum er tilboð til børn við ymsum avbjóðingum. Tilboðið er til børn í 1-3. árgangi og er í lonunum í Hoydølum, men flytur inn í Eysturskúlan seinni í ár. 6 næmingar eru í tilboðnum.
- Lopfjølin er eitt tilboð til næmingar, ið av ymsum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Tilboðið er í Margarinfabrikkini, og skúlaparturin er undir Skúlanum á Fløtum 11 næmingar eru í tilboðnum.
- 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum var upprunaliga til næmingar við ADHD, men er nú til næmingar við ymsum avbjóðingum. Tilboðið er í gula skúla við Landavegin, men fer út á Argir, tá Skúlin á Fløtum flytur í nýggja bygningin. 33 næmingar eru í tilboðnum.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
**Viðv. flyting av fyribils hølunum til Eysturskúlan**
Ætlanin er sett í fyribils bíðistøðu.

**Greiningar**
Forkvinnan í trivnaðarnevndini Súna Mørk setur fram ynski um at fáa greinað fylgjandi viðurskifti:
- At fáa lýst hvørji tilboð eru á sernámsfrøðiliga økinum sum eitt samlað yvirlit íroknað førleikastovur, sertilboð og serflokkar.
- Hvat fakliga verður mett, tørvur er at fáa afturat, hvat manglar?
- Hvat verður mett, er neyðugt at uppraðfesta?
- Hvat ítøkiliga "skríggjar" eftir hjálp?
- Tørvur er kanska eisini at vit "foreinkla" skipanina" ella fáa eitt meira greiðari yvirlit hvørji tilboð eru, hvar tey eru, hvar skal eg venda mær osfr
- Hvussu arbeiða vit okkum víðari fram við at fáa fleiri serstovur?
- Skuldi man uppraðfest stuðulstímar inni í flokkunum, til tað vanligu undirvísingina?
- Tilboðið við serflokki til børn 1 til 3 flokk, hvussu ber til at fáa sett tað á stovn? Eysturskúlin/Hoydalar sum er ein royndarverkætlan í dag
- Hvussu nógvir pengar eru avsettir til serøkið?

Meting hjá umsitingini
Talan er um viðurskifti og greiningar, ið tað ber til at fáa greinað her í vár at leggja aftur fyri nevnd. Neyðugt verður við einum breiðum samskifti við skúlar og aðrar myndugleikar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um umsitingin skal fara undir hesar greiningar.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at umsitingin fer undir hesar greiningar, at leggja aftur fyri nevndina.

**Ískoyti:**
Hóast mentamálanevndin hevur samtykt at seta á stovn sertilboð í Eysturskúlanum, so hevur tilboðið ikki fingið endaliga góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

Umsitingin hevur verið á fundi við Uttanríkis- og mentamálaráðið um serøkið í Tórshavnar kommunu. Á fundinum varð kunnað um, at Undirvísingarstýrið og Sernám hava sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum tilmæli at skipa sertilboð í Eysturskúlanum. Mælt verður til, at sertilboð ætlað næmingum í 1.-3. fl. verður skipað eftir kunngerð nr. 24 frá 2019 "Kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð." Tilboðið í Eysturskúlanum er enn ein royndarskipan, og tí eru starvsfólkini ikki sett eftir skipanini við sjálvstýrandi toymum.

Tilmælið frá Undirvísingarstýrinum og Sernámi er treytað av, at Tórshavnar kommuna kann veita neyðug høli til endamálið. Skal skipanin halda fram og útbyggjast, er neyðugt við støðugum kørmum, sum eru tættari skúlanum

Samtykt er at flyta fyribilshølini í garðinum hjá frk. Cohr, niðan í skúlagarðin í Eysturskúlanum, men hølini eru ikki flutt, og tí heldur tilboðið heldur enn til í lonunum í Hoydølum.

Ætlanin er, at serhølini verða brúkt til lærugreinina náttúru og tøkni, og umframt Eysturskúlan fer Smílibýlið at brúka hølini. Skal sertilboðið flyta inn í Eysturskúlan komandi skúlaár, er neyðugt at fara undir at flyta fyribilshølini nú, so tey kunnu vera tikin í nýtslu í august, og hølini inni í skúlanum kunnu vera klár til sertilboðið til grunddeildina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at fyribilshølini í garðinum hjá Frk. Cohr verða flutt í Eysturskúlan so skjótt góðkenning er komin frá UMMR um at skipa sertilboð í Eysturskúlanum.

**Trivnaðarnevndin 06. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Við støði í spurningunum, sum forkvinnan í trivnaðarnevndini hevur sett um ymisk viðurskifti á sernámsfrøðiliga økinum, hevur umsitingin skrivað eitt upprit, sum verður lagt fram á fundinum. Víst verður til samtykt á fundi í trivnaðarnevndini tann 11. mars 2021.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða uppritið.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2021:** Uppritið umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt er dagført upprit um sernámsfrøðiliga økið.

Fyrra útgávan av uppritinum hevur verið til hoyringar hjá skúlaleiðslunum og er viðgjørt á fundi við umboð fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Undirvísingarstýrið, Sernám, Eysturskúlan og Skúlan á Fløtum. Uppritið er dagført við støði í tí fundinum og í hoyringarsvari.

Við støði í uppritinum er ætlanin at raðfesta og fara í gongd við at gera kostnaðarmeting viðvíkjandi umbygging og tillaging av hølum til serflokkar og sernámsfrøðiliga økið sum heild.

Málið um dagføring av skúlabygnaðinum (mál 21/02652) verður lagt fyri trivnaðarnevndina á næsta fundi, og avgerðir í tí málinum hava ávirkan á, hvussu høliskapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur og sostatt eisini, hvørji høli møguliga eru tøk til sernámsfrøðiliga økið.

Skúlin á Argjahamri (mál 21/03568) hevur ætlanir um at søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn serflokk í skúlanum. Hesin serflokkur er ætlaður næmingum í grund- og miðdeild. Á s. 6 í uppritinum stendur, at tørvur er á einum tilboði aftrat til næmingar við autismu ella líknandi avbjóðingum, og at hetta tilboð kundi verið í Skúlanum á Argjahamri, men neyðugt er at finna hølisloysn til tað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at umsitingin saman við avvarðandi pørtum raðfestir og fær til vega kostnaðarmeting av nøkrum uppskotum í uppritinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Skúlin á Argjahamri hevur ætlanir um at søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn serflokk í skúlanum (mál 21/03568). Í hesum sambandi samtykti trivnaðarnevndin 7. oktober í 2021, at umsitingin saman við skúlanum kannar, um tað ber til at finna aðrar góðar hølisloysnir til serflokk í Skúlanum á Argjahamri.

Umboð fyri byggningsdeildina og mentamáladeildina hava verið ástaðarfundi saman við skúlaleiðsluni og hugt at hølismøguleikum til serflokk í Skúlanum á Argjahamri.

Á fundinum vórðu hesir møguleikar umrøddir:

a) tannlæknahølini, men so má tannlæknin flyta. Ein møguleiki er at flyta tannlæknahølini í niðasta partin av Látrinum, innanfyri stólparnar har garaguhurðin er. Men tað gevur lítla meining at taka dýr høli niður í bygninginum, og síðani byggja tey aftur av nýggjum í sama bygningi.

b) innrættað part av Látrinum til serflokk. Skúlastjórin metir ikki, at tað er ein hóskandi loysn. Har er ov ófriðarligt. Atgongd verður ikki beinleiðis inn í skúlan, tað verður antin soleiðis, at tú fer út, og so inn gjøgnum høvuðsdyrnar inn í skúlan aftur ella gjøgnum Látrið, sum er innandura spæliøki.

c) í frítíðarskúlanum, tí partinum, sum er útbygdur, skúlin metir ikki, at tað er ein loysn, tí tað eru høli hjá frítíðarskúlanum.

d) byggja lon aftrat niðaneftir, har sum frítíðarskúlin er. Seta fyribilshøli upp, meðan bygt verður

e) seta fyribilshøli upp niðanfyri høllina, men spurningurin er, um tað er hóskandi økið til serflokk, tað er nakað árent. Hølini kundu verið til tveir flokkar í skúlanum, men so verður deildarbýtið brotið, og tað er ikki so heppið. Skúlin er bygdur soleiðis, at grund-, mið- og hádeild hava heimastovur, sum eru í hvør síni eind.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðanin mæla nevndini til at umrøða málið og taka støðu til, hvørjum møguleika arbeiðast skal víðari við at greina gjøllari.

**Trivnaðarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við at greina møguleika b.

**Ískoyti:**
Umsitingin er í holt við at kanna loysnir á ymisu skúlunum viðv. evt. neyðugum hølisloysnum til serøkið, og er hesaferð komin til eina ávegis niðurstøðu fyri Skúlan á Argjahamri. Uppskot til loysnir á øðrum skúlum kemur stigvíst gjøgnum árið.

Ein loysn er møgulig har innrættaði vera serstøk hølir til endamálið inni í hølinum, ið verður nevnt Látrið. Hóast tað vera tiknir fermetrar frá Látrinum, ið virkar sum eina innanhýsis skúlagarður og virknishøll, so vil funktiónin vera at kalla ótarnað. Sí hjáløgdu tekning. Skúlastjórin tekur undir við loysnini.

Umsitingin vil á fundinum greiða frá mettum kostnaði. Um ætlanin skal fremjast verður hon at raðfesta t.d. í sambandi við fíggjarætlanartilgongdina fyri 2023.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli til komandi fund.

**Trivnaðarnevndin 10. februar 2022:** Ein meiriluti, Súna Mørk, Bjørg Dam og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Jákup Dam, ynskja at fáa lýst avleiðingarnar av at taka burturav innandura spæliøkinum, Látrinum.

**Ískoyti**
Eftir ætlan skal 1-3 sertilboðið í Eysturskúlanum flyta omann í skúlan. Hølini í Eysturskúlanum vera væntandi liðug til summarferiuna.

Málið við tilboðnum er at geva børnunum eitt hóskandi tilboð so tíðliga sum møguligt við tí endamáli, at tey fara í vanligan flokk í seinasta lagi, tá tey skulu í 4. flokk. Um hetta í onkrum førum ikki ber til, eiga tey tá at verða visiterað til 4-10.

Størstu avbjóðingarnar, sum tilboðið arbeiðir við, eru kenslulig órógv og tilknýtisórógv, har tað at vera í einum stórum flokki, byggir upp eina strongd, sum næmingarnir hava torført at stýra.

Skúlaárið 2021/22 eru 10 børn í tilboðunum, og tvey av teimum verða visiterað úr tilboðnum hetta skúlaárið.

Nøkur børn eru visiterað inn í tilboðið úr øðrum skúlum. Hetta eru børn, sum hava gingið í vanligan flokk, men ikki megna tað og heldur ikki megna at vera í einum sertilboði, sum er staðsett inni í einum skúla. Talan er um børn, sum hava tørv á tilboði líknandi 4-10 tilboðnum.

Mikudagin 23. mars var fundur um sertilboð í Tórshavnar kommunu. Á fundinum vóru umboð fyri skúlar og frítíðarskúlar í kommununi, sum hava sertilboð, umboð fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Sernám, Barna- og ungdómsdeildina og Mentamáladeildina. Tosað varð um 1-3 tilboðið, og at tørvur er á tilboði aftrat til tey børnini, sum ikki megna at fara í vanligan flokk.

Ein møguleiki er, at 1-3 tilboðið verður í tveimum eindum, og at onnur eindin fyribils verður í lonunum í Hoydølum. Børnini í hesi eindini eru tey, sum ikki megna at fara inn í vanligan flokk. Bæði Sernám og skúlin vísa á, at í Hoydalar er eitt sera gott umhvørvið til henda málbólkin, har børnini bæði trívast og mennast.

Lonirnar í Hoydølum eru ein fyribilsloysn, so neyðugt verður at finna eina varandi hølisloysn til tann bólkin í 1-3, ið neyvan fer at megna ein vanligan flokk, og tí verða visiterað inn í 4-10, tá tey fara úr 1-3.

Dagstovnavirksemið, sum er í lonunum, skal útbyggjast, so øll niðara hæddin verður dagstovnur burturav, og tí verður bert ovara hæddin tøk til sertilboðið, og tað er ikki vist, at tað er nøktandi til sertilboðið.

Hin eindin verður so inni í serstovuni í Eysturskúlanum. Hetta eru tey børnini, sum so líðandi kunnu fara inn í vanligan flokk, og har málið er, at tey í seinasta lagi, tá tey skulu í 4. flokk fara ella eru farin í vanligan flokk burturav.

Í eindini í Eysturskúlanum er pláss fyri 15 børnum, meðan í eindini í Hoydølum í ovaru hæddini í syðra enda á bygninginum kunnu í mesta lagi vera 6 børn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeilini mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at partur av 1-3 sertilboðnum heldur fram í lonunum í Hoydølum.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælin

**Ískoyti**
Í skrivi, dagf. 27. mai 2021, góðkendi landsstýrismaðurin sertilboðið í Eysturskúlanum. Ein treyt fyri góðkenningini er, at Tórshavnar Kommuna kann veita neyðugu hølini til sertilboðið *inni* í Eysturskúlanum.

Fyribilshølini eru sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum, fyirbilshølini verða brúkt til náttúru og tøkni, og so er eitt høli aftrat. Eysturskúlin og Frítíðarskúlin Smílibýlið fara at brúka hølini. Hølini til náttúru og tøkni inni skúlanum, kunnu nú innrættast til sertilboðið.

Upprunaliga varð mett, at bert ein skilaveggur skuldi setast upp í hølinum til náttúru og tøkni, soleiðis at tvey høli blivu til sertilboðið, men tað er als ikki nøktandi. Tørvur er á tveimum lítlum stovum, einum bólkarúmi og felagsøki við lítlum tekøki. (Tekning er hjáløgd).

Kostnaðarmetingin fyri innrætting av hølinum (náttúru og tøkni hølinum) í A-lonini til sertilboðið er 641.400,-kr. (Kostnaðarmetingin er hjáløgd). Játtan er ikki sett av til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at fáa gjørt hølini til sertilboðið, men vísir á, at játtan er ikki tøk til endamálið.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og játta kr. 641.000,00 av konto 20910 og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Verkætlanin at gera um fyribilshølini í garðinum hjá Eysturskúlanum er liðugt og er gjørd upp fíggjarliga (konta 4175 Dagføring av skúlum L41015 Eysturskúlin, fyribilshøli til sertilboð).

Staðfest er ein minninýtsla kr. 166.875. Upphæddin verður at flyta aftur á løgukarmin.

Skúlin og frítíðarskúlin hava hetta tíðarskeiðið samstarvað um brúkið av hesum hølum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loka løgukontu 4175 L41015 Eysturskúlin, fyribilshøli til sertilboð, og at flyta avlopið kr. 166.875 aftur til løgukarmin 41999. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 02. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 278/23 Tórshavnar býarsavn : Umbygging av savnsbygninginum á Frúutrøð 1, matr. nr. 645a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.10.2020 | 255/20 | 20/03466-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 327/20 | 20/03466-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 328/20 | 20/03466-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 299/20 | 20/03466-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 251/21 | 20/03466-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 03.11.2021 | 255/21 | 20/03466-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 16/22 | 20/03466-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 183/23 | 20/03466-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 297/23 | 20/03466-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 278/23 | 20/03466-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Leiðarin á Tórshavnar býarsavni hevur saman við umsitingini arbeitt við at lýsa tríggjar ymiskar valmøguleikar fyri umvæling og umbygging av bygninginum á Frúutrøð 1 til framtíðar savnsvirksemi, herundir fevna um fasta framsýning, skiftandi framsýningar og umsiting og lutvíst goymsla. Sí hjálagt upprit.

Til fundin kemur umsitingin at greiða nærri frá uppritinum.

Næsta stig vildi verið at fingið gjørt nærri metingar um kostna fyri eitt ella fleiri av stigunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Málið um framtíðar íbúðarbygging á Frúutrøð.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongir.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Sí hjáløgdu frágreiðing.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, býararktitekturin, leiðarin á Húsaumsitingini og mentamála-leiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal halda fram við fyrireikingunum við støði í stig 1, 2 ella 3.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við at arbeitt verður við stig 1, løtt loysn.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Játtan
Á fundi í mentamálanevndini 5. oktober 2020 var samtykt at arbeiða víðari við stig 1 sbrt. hjálagda uppriti.

Í fíggjarætlanini fyri 2021 hevur býráðið 26. november 2020 samtykt at játta 1.500 tkr. sum løgujáttan til Tórshavnar býarsavn.

Fyrireikingar og útinning
Tískil eru nú grundarlag fyri at fara undir fyrireikingar og seinni útinning av stig 1, løtt loysn, har dentur verður lagdur á at fáa betrað munandi um fyritreytirnar fyri at hava eina fasta framsýning og møguligar evnisframsýningar og har tað samstundis verður roynt at fáa funktiónina í bygninginum so góða sum tilber innanfyri givna fíggjarkarmin m.a. við at gera brunatiltøk, ið gera tað møguligt at fáa nýtsluloyvi til at hava væl fleiri fólk inni í senn og soleiðis økja um nyttuvirði og eisini inntøkurnar.

Neyðugar tillagingar v.m.
Lætta loysnin inniber at framsýningarrúm vera tillagaði, at ávísir veggir vera tiknir niður/fluttir og aðrir skilaveggir gjørdir fyri at fáa meiri framsýningarpláss, umframt aðrar neyðugar funktiónir.

Aðrar ábøtur sum avleiðing av tillagingunum, er at skifta gólv, umframt mála veggir og loft, umframt at betra um vesi-viðurskiftini sbrt. galdandi byggikunngerð. Eisini vera tiltøk gjørd fyri at fáa ljósviðurskiftini betri egnaði til framsýningarvirksemi, umframt aðrar smærri tillagingar, alt eftir sum tøka fíggingin nú røkkur til.

Fyri at fáa sum mest burturúr tøku játtanini er hugsanin at fáa ráðgeva at gera grundleggjandi kanningar og projektering og síðani at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tvær fyritøkur. Ætlandi kunnu fyrireikingarnar byrja í næstum og síðani heinta inn tilboð í januar 2021 og fara undir útinning í januar/feb. 2021. Væntandi tekur arbeiðið umleið 3-4 mánaðir og kann so væntandi vera klárt til at ein føst framsýning kann lata upp á sumri 2021. Verkætlanin verður tillagað alt eftir hvussu útboðið hildnast.

Verkætlanarbólkur
Innanhýsis í kommununi kemur verkætlanin at vera eitt samstarv millum Tórshavnar býarsavn, býarskipanardeildina, trivnaðarfyrisitingina/mentamáladeildina og húsaumsitingina. Húsaumsitingin kemur at hava verkætlanarleiðsluna um hendi og vera byggiharri.

Møgulig framtíðar stig
So vítt tilber, vil tað í hesi verkætlanini vera tikin atlit til at henda verkætlanin tekur hædd fyri møguligum seinni framhaldi til stig 2 og 3 í uppritinum um hølisviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Húsaumsitingini, býararkitekturin og mentamála-leiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at játta 1.500 tkr. av løgujáttan (2021) - 5575 Søvn og mentanararvur til nýggja projektkontu - Tórshavnar býarsavn.

b). at heimila umsitingini at fáa projekterað umbygging og umvælingar av bygninginum á Frúutrøð 1 og at søkja um byggiloyvi.

c). at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð antin sum høvuðsarbeiðstøku ella sum fakarbeiðstøkur og innganga sáttmálar innan tøka fíggjarkarmin.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt, vegna vantandi heildarætlan og kostnaðarætlan.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Annika Olsen, býráðslimur ynskir at fáa málið á skrá, umframt at leiðarin fyri Tórshavnar býarsavn skal koma á fundin og greiða frá støðuni.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Umrøtt. Málið verður tikið upp aftur á næsta fundi.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Síðani samtyktina í fjør hevur umsitingin fingið nágreinað nærri viðurskiftini kring eina umbygging av bygninginum á Frúutrøð 1. Ein verkætlan, ið tekur hædd fyri øllum neyðugum krøvum sbrt. BK17 byggikunngerðini, umframt tørv og funktión hjá Býarsavninum sbrt. upplegginum 'løtt loysn', ið var viðgjørd í fjør, og sum var grundarlagið undir samtyktini í býráðnum 17. desember 2020.
Umsitingin greiðir á fundinum nærri frá kostnaðarmeting v.m. Støðan er at verandi fígging ikki røkkur til ætlanina, men er talan um ca. tvífalda upphædd.

**Fundur í savnsnevndini**
Víst verður til viðgerð á seinasta fundi. Sbrt. grein 2, stk. 2, 1. pettið í viðtøkunum fyri Tórshavnar býarsavn er mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs er savnsnevnd hjá Tórshavnar býarsavni og hevur ábyrgd av rakstrinum. Sí hjálagt viðtøkurnar.

Á fundinum kemur leiðarin fyri Tórshavnar býarsavn at greiða frá virkseminum og ætlaðu umbyggingini og viðurskifti í hesum sambandi og at viðgera tað saman við nevndini. Sí hjálagt ársfrágreiðing 2020 og virksemisætlanina fyri 2021.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at viðgera um farast skal víðari við fyrireikingunum at umvæla savnsbygningin á Frúutrøð 1 og útvega neyðuga fígging.
b). sum savnsnevnd at viðgera virksemi hjá Tórshavnar býarsavni nú og framyvir.

**Mentamálanevndin 03. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælunum.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá Annfinni Brekksteini at beina málið aftur í Mentamálanevndina, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 blonkum og ongari fyri.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Birita B. Iversen, Annika Olsen, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Løguverkætlan L55001 Tórshavnar býarsavn, umbygging á Frúðutrøð, skal lokast.
Játtaðar vórðu kr. 1,5 mió til umbyggingar, men arbeiðið varð ikki sett í verk, og sum eykajátatn er upphæddin flutt til annað endamál.

Goldið er tó fyri arkitektaráðgeving í sambandi við umbyggingarætlanina. Tað ger, at løgukontan hevur eitt hall uppá kr. 35.000.

Skotið verður upp at fíggja hetta av løgukarmi 5475 LK54001 Býarbókasavnið.

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 5475 | LK54001 | Býarbókasavnið |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 5510 | L55001 | Tórshavnar býarsavn | |

| **Upphædd** |
|---|
| 35.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 35.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loka verkætlanina og í hesum sambandi at játta kr. 35.000 av løgukarmi 5475 LK54001 Býarbókasavnið til løgukontu 5510 L55001 Tórshavnar býarsavn.

Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndini.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, tveimum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Súsanna Olsen og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu: Gunvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddu: Turið Horn og Bogi Andreasen.

# 279/23 Brúkaragjøld búpláss, heimahjálp og umlætting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 31.10.2023 | 27/23 | 23/06202-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 301/23 | 23/06202-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 279/23 | 23/06202-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Nýggj kunngerð um eldratænastur kom í gildi 1. apríl 2023, sum gav kommununum heimild til sjálv at áseta gjøld fyri sínar eldratænastur eftir ávísum leisti, sum er lýstur í kunngerðini.

Kommunufelagið legði í hesum sambandi fram uppskot um felags leist fyri áseting av gjøldum fyri árini 2023, 2024 og 2025.

Á býráðsfundi 23. februar 2023 samtykti Tórshavnar býráð at lýsa broytingar í gjøldum fyri heimatænastu, pláss á eldrabústovni og fyri umlætting fyri 2023 sambært felags leistinum hjá Kommunufelagnum. Áðrenn hesa samtykt hava somu gjøld verið galdandi fyri eldratænastur síðan 2015.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2024 eru gjøldini fyri heimatænastu, pláss á eldrabústovni og fyri umlætting dagførd sambært uppskot til felags leist frá Kommunufelagnum fyri 2024.
Sambært broyttu kunngerðini skal kommunan í seinasta lagi 1. desember lýsa gjøldini fyri komandi ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at lýsa broytingar í gjøldum fyri heimatænastu, pláss á eldrabústovni og fyri umlætting áðrenn 1. desembur 2023 galdandi frá 1. januar 2024 eftir uppskotið hjá Kommunufelagnum, og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 31. oktober 2023:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen og Súna Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður ímóti.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við heilsu- og eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Bogi Andreasen.

## 280/23 Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 18/23 | 23/03546-1 |
| 2 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 148/23 | 23/03546-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.07.2023 | 210/23 | 23/03546-1 |
| 4 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 187/23 | 23/03546-1 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 31.10.2023 | 26/23 | 23/03546-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 302/23 | 23/03546-1 |
| 7 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 280/23 | 23/03546-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna stendur, eins og Føroyar sum heild, yvir fyri stórum fólkafrøðiligum avbjóðingum, sum setur verandi vælferðartænastur, sum kommunan hevur ábyrgd av, undir trýst.

Á eldraøkinum eru avbjóðingarnar stórar, samansettar og vaksandi.

Talið av eldri fólki økist, fólk liva longur, viðgerðarhættir í heilsuverkinum gerast alsamt betri. Tørvurin á tænastum og búplássum frá kommununi verður tískil alsamt størri. Í tráð við, at tað gerast fleiri eldri fólk, og at livialdurin hækkar, verða eisini elsamt fleiri borgarar við ellisbrekum og varandi sjúkum, og nógvir teirra fáa tørv á persónligari og praktiskari hjálp í gerandisdegnum. Tað er týdningarmikið, at hesir borgarar fáa góða umsorgan og røkt, sum tekur stæði í tørvinum hjá tí einstaka.

Harumframt eru borgarar vorðnir meira tilvitaðir, og seta alsamt størri krøv til, at kommunan skal veita tænastur, hvørjar tænastur kommunan skal veita, hvussu tænasturnar verða veittar og til góðskuna á tænastunum.
Samstundis bendir alt á, at tað gerast færri skattgjaldarar at rinda fyri tænasturnar komandi árini.

Búskaparráðið hevur víst á, at tað er neyðugt, at neyv mál verða sett fyri, hvørjar framtíðar vælferðartænastur skulu veitast til hvørjar borgarar, um fólkafrøðiliga avbjóðingin og vantandi starvsfólkaorkan skal loysast.

Tórshavnar býráð hevur sett sær fyri at loysa avbjóðingarnar, sum síggjast á eldraøkinum og at fara undir átøk, sum skulu viðvirka til at framtíðartryggja grundleggjandi tænastur fyri borgaran í Tórshavnar kommunu.

Á fundi í Heilsu- og eldranevndini tann 5. juli 2021 varð samtykt, at seta ein arbeiðsbólk at lýsa og greina verandi avbjóðingar á eldraøkinum, og gera tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Ynski var um, at bæði borgarin, fakfólk og politiski myndugleikin skuldi takast við í arbeiðið.

Sum liður í hesum arbeiði eru settir tríggir arbeiðsbólkar, sum hava viðgjørt ávíkavist tænastur til heimabúgvandi fólkapensjónistar, tænastur á eldrabústovnunum og starvsfólk, útbúgving og rekruttering. Í arbeiðsbólkunum hava limir úr øllum fakbólkum verið umboðaðir. Endamálið við arbeiðsbólkunum hevur

verið, at fakfólk á eldraøkinum fáa møguleika at greiða frá teirra sjónarmiðum, at luttaka í kjaki og at koma við ískoyti til møguligar loysnir.

Í arbeiðsbólkunum verður nú arbeitt við at orðað tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Í hesum sambandi hevur arbeiðsbólkurin, sum hevur viðgjørt tænastur til heimabúgvandi pensjónistar, orðað tilmæli um reingerðartænastuna.

**Lýsing av reingerðartænastuni**

Reingerðartænastan er ein tænasta fyri heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið ikki megna at gera reint sjálvi, og sum ikki búgva saman við frískum hjúnafelaga/maka ella vaksnum yvir 18 ár, ið megna at gera reint. Játtan til reingerðartænastu er treytað av, at visitator metir, at heilsufakligt grundarlag er fyri reingerðartænastu.

Borgari, sum hevur ansara, fær ikki játtað reingerðartænastu. Í serligum førum verður reingerðartænasta játtað í avmarkað tíðarskeið. Tænastan er tilskilað einkult persóni, men í ávísum førum, t.d í samband við deysðfall, verður støða tikin til, um eftirsitandi makin hevur tørv á at varðveita tænastuna.

Visitatión til reingerðartænastu fevnir í dag ikki um eina ADL metan av borgaranum. Ein ADL metan er ein metan av, hvussu væl borgari megnar gerandis uppgávur í heiminum, til arbeiðis og í frítíðini. Hetta kunnu vera uppgávur so sum persónligt reinføri, at lata seg í/úr, at eta, fara á wc, innkeyp, matgerð og reingerð. Tað er ergoterapeutur, sum ger ADL metanina.

Reingerð verður veitt 3. hvørja viku í 2 manntímar, sum svara til antin 1 tíma ið tveimum reingerðarfólkum ella 2 tímar við einum reingerðarfólki. Tað, sum vanliga verður gjørt reint, er støvsúgving, vask av gólvum og vask av vesi og baðirúmið. Reingerðin fevnir um viðlíkahaldsreingerð. Høvuðsreingerð er ikki ein partur av tilboðnum.

Núverandi játtan til reingerðartænastu er kr. 800.000 árliga, og kostnaðurin fyri tænastuna er í dag kr. 1.663.569 v/ netto MVG. Brúkaragjaldið er á kr. 170 fyri hvørja reingerðarveiting, svarandi til í alt kr. 451.520 árliga.

Upprunaliga varð avgjørt, at 1/3 av kostnaðinum skuldi fíggjast við brúkaragjaldi. Í dag er brúkaragjaldið 27% av kostnaðinum.

Reingerðartænastan var áður ein partur av tí tænastu, sum heimatænastan veitti heimabúgvandi borgarum. Reingerð varð tikin úr hesi tænastu fyri áleið 15 árum síðani, og hevur ikki verið partur av heimatænastuni síðani.

Tórshavnar kommuna valdi at seta reingerðartænastuna inn aftur í 2019, men skipað á tann hátt, at privat reingerðarfyritøka veitti reingerðarhjálpina.

Fyrsta tíðin var royndartíð, sum varð skipað soleiðis, at tað vóru teir borgarar, sum ikki megnaðu sjálvir at gera reint og sum ikki búðu saman við persóni sum kundi gera reint, sum kundu fáa reingerðartænastu. Eftir 1 ár varð skipanin sett í verk, og tá var brúkaragjald ásett. Við støði í royndarverkætlanini var mett, at pláss skuldi vera fyri 110 borgarum í skipanini.

Í 2021, tá sáttmálin við reingerðarfyritøkuna skuldi leingjast, varð víst á, at fleiri borgarar enn væntað, vóru í skipanini, og kostnaðurin av tí sama hækkaði. Tá varð avgjørt, at kommunan bar hækkingina, og brúkaragjaldið sostatt skuldi vera óbroytt.

Tað eru í løtuni 166 borgarar, sum fáa reingerðartænastu, og 42 borgarar hava fingið játta reingerðartænastu men eru á bíðilista til reingerð.

Um reingerðartænasta skal veitast teimum 208 borgarum, sum í dag hava fingið játtað reingerðartænastu, og støði verður tikið í núverandi kostnaði, fer tænastan at kosta kr. 2.084.472 v/ netto MVG.

Sáttmálin við verandi reingerðarfyritøku er gingin út, og reingerðartænastan hevur tí júst verið í útboð. Um tikið verður av einum av innkomnu tilboðunum, fer kostnaðurin av reingerðartænastuni at hækka frameftir. Harumframt fer talið av eldri borgarum at hækka komandi árini, og tað verða tí helst fleiri og fleiri borgarar, sum fara at søkja um reingerðartænastu.

Sí viðfest um nøgdsemi við reingerðartænastuna

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan skal síggjast tí breiða høpinum, og í mun til tær avbjóðingar, sum eru fyri framman. Talið á eldri borgarum í Tórshavnar kommunu fer at vaksa skjótari komandi árini, og skal kommunan megna at veita neyðturviligar røktartænastur, verður neyðugt at raðfesta og møguliga eisini at skerja tænasturnar.

Um Tórshavnar kommuna skal raðfesta við støði í teimum tænastum, sum kommunan veitir eldri borgarum í dag, so er reingerðartænastan ein tænasta, sum kann verða avtikin. Hetta við atliti til, at hetta er ein tænasta, sum privatar fyritøkur kunnu veita borgarum, og sum borgarin tí kann keypa seg til sjálvur. Í hesum sambandi vísur nøgdsemiskanningin eisini, at reingerðarhjálp frá privatari fyritøku er á einum støði, sum er nøktandi fyri borgaran og avvarðandi.

Verður avgerð tikin um, at reingerðartænasta framhaldandi skal veitast, mælir arbeiðsbólkurin til, at skipanin verður endurskoðað og at kanna verður, um tænastan kann skipast á annan hátt.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan verður avmarkað soleiðis, at tað verða settar neyvari treytir fyri at fáa tænastuna. Tað skulu einans vera teir borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, sum kunnu fáa játtað reingerðartænastu.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at tað verður gjørd ein ADL metan, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi, fáa reingerðartænastu.

Eitt uppskot er harumframt, at reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu. Um tørvur er á reingerðartænastu, kunnar visitator borgaran um, at viðkomandi kann søkja um tænastuna.

Arbeiðsbólkurin hevur somuleiðis umrøtt spurningin, um reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni. Vísandi til, at hjálp í heiminum fyri tað mesta verður veitt fyrrapartar, og at tað møguliga er rúm fyri, at starvsfólk kunnu brúka tíð seinnapart til reingerð.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at í minsta lagi 1/3 av kostnaðinum av tænastuni skal fíggjast við brúkaragjaldi, og at brúkaragjaldið verður hækkað um neyðugt.

Úrslitini frá nøgdsemiskanningini tala eisini fyri hesum, tá tey vísa á, at borgarar og avvarðandi yvirskipað eru nøgd við kostnaðarstøðið á tænastuni. Eitt hægri brúkaragjald hevði tí allarhelst ikki havt stórvegis ávirkan á, um borgarin valdi tænastuna til ella frá.

Arbeiðsbólkurin mælir Heilsu- og eldranevndini til at:
- Reingerðartænastan verður avtikin.

Verður reingerðartænastan ikki avtikin mælir arbeiðsbólkurin til, at:
- Neyvari treytir verða settar fyri at fáa játtað reingerðartænastu.

- Einans borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, kunnu fáa játtað reingerðartænastu.
- ADL metan verður gjørd, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi fáa reingerðartænastu.
- Reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu.
- Kanna møguleikan fyri, at reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni.
- Brúkaragjaldið á reingerðartænastuni verður hækkað, um tað er neyðugt fyri at røkka 1/3 av samlaða kostnaðinum av tænastuni.

**Viðmerkingar frá fyrisitingini:**
Sambært lóg um heimatænastu og eldrarøkt er tað ikki skylda hjá kommununi at veita fólkapensionistum reingerðartænastu. Tó kann kommunan seta tilboðið í verk um hon ynskir tað.

Umsitingin metir at tørvur er á at endurskoða reingerðartænastuna. At taka støðu til um reingerðartænastan skal halda fram og í øðrum lagi at gera skipanina soleiðis at tað er borgarin við veruligum tørvi sum kann fáa tænastuna. Hetta kann vera gjørt eftir leisti sum arbeiðsbólkurin mælir til. Umsitingin metir somuleiðis at reingerðartænastan altíð eigur at vera játta tíðaravmarka og tí skal revisiterast reguliga.

Reingerðartænastan er sera tíðarkrevjandi at umsita bæði fyrisitingarligt og hjá visitatiónini. Umsitingin metur at tíðin er koman at tillaga skipanina. Hetta kann gerast í trá við uppskoti frá arbeiðsbólkinum. Um skipanin skal halda fram sum nú, verður neyðugt at økja játtanina við áleið 1.5 mio. kr. í fíggjarætlanini fyri 2024

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla heilsu- og eldranevndini til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum í fyrstu syftu at reingerðartænastan skal niðurleggjast. Um nevndin ikki tekur undir við fyrsta tilmælinum so í øðrum lagi at taka undir við antin samlaða alternativa uppskotinum ella pørtum av hesum. At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Nevndin tekur ikki undir við at avtaka reingerðarskipanina.

Nevndin tekur undir við at endurskoða, tillaga og broyta reingerðartænastuna í samsvari við alternativa uppskotið hjá arbeiðsbólkinum umframt at reingerðartænastan verður játtað tíðaravmarkað og verður revisiterað regluliga.

Nevndin tekur ikki undir við at hækka brúkaragjaldið. Nevndin ynskir málið aftur í nevnd, tá ið omanfyri nevndu broytingar eru settar í verk og endaligur fíggjartørvur fyriliggur.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 05. juli 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini, og at málið verður lagt fyri eldranevndina, tá ið endaligur fíggjartørvur fyriliggur í mun til endurskoðaðu skipanina, sum alternativa uppskotið hjá arbeiðsbólkinum mælir til.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Sum liður í arbeiðinum at framtíðartryggja eldraøkið, varð samtykt á fundi í heilsu- og eldranevndini tann 19. juni 2023, at taka undir við tilmæli um at endurskoða, tillaga og broyta reingerðartænastuna í samsvari við uppskoti frá arbeiðsbólkinum. Harumframt varð samtykt, at reingerðartænastan skal játtast í avmarkað tíðarskeið og revisiterast árliga.

Heilsu- og eldranevndin ynskti málið aftur í nevnd, tá ið broytingar í reingerðartænastuni vóru settar í verk og endaligur fíggjartørvur staðfestur.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá eindarleiðsluni, heimatænastuni, visitatiónini, terapeuttoyminum og fyrisitingini hevur endurskoðað og tillagað reingerðartænastuna við støði í tilmælunum, og gjørt fylgjandi broytingar í reingerðartænastuni.

Borgarin skal fáa umfatandi heimahjálp fyri at fáa reingerðartænastu, og talan skal vera um varandi tørv – reingerðartænasta verður tí ikki játtað í styttri tíðarskeið. Umfatandi heimahjálp verður veitt borgara, sum við hjálp og stuðli kann luttaka aktivt fyri at nøkta egnan tørv, og borgara sum við fullari hjálp kann viðvirka til at nøkta egnan tørv.

Reingerðartænasta verður frameftir partur av visitatión til heimatænastu á tann hátt, at tá borgari søkir um heimatænastu, metir visitator eisini, um heilsufakligt grundarlag er fyri reingerðarhjálp. Um borgari lúkar treytirnar fyri reingerðartænastu, kunnar visitator borgara um, at viðkomandi kann søkja um tænastuna.

Reingerðartænasta verður játtað í eitt ár í senn, og revisitatión er árliga.

Reingerðartænasta verður ikki veitt í viku 30 og 51.

Ein tænastuveiting fevnir um reingerð av brúksrúmum og í mesta lagi fimm rúmum – gongd, køkur, ein stova, eitt kamar og eitt baðirúm/vesi.

Mett verður, at reingerðartænastan kann veitast av bæði heimatænastuni og uttanhýsis veitara. Um borgari fær reingerðartænastu frá heimatænastuni, útvegar borgari reingerðarútgerð.

Við støði í nýggju treytunum fyri reingerðartænastu væntast áleið 100 borgarar í skipanini. Mett verður, at heimatænastan kann veita reingerðarhjálp til 60 borgarar. 40 borgarar skulu tí hava reingerðartænastu frá uttanhýsis veitara. Við støði í hesum er metti bruttokostnaðurin fyri tænastuna kr. 750.000 árliga. Við einum brúkaragjaldið á kr. 170 svarandi til kr. 250.000 árliga, er nettokostnaðurin kr. 500.000 árliga.

Reingerðartænastan skal hava eitt loft svarandi til játtanina. Tá loftið er rokkið, verða fleiri borgarar ikki tiknir inn í skipanina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fulltrúi í H&U umsitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til at taka undir við endurskoðaðu skipanini av reingerðartænastuni.

**Heilsu- og eldranevndin 31. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við heilsu- og eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra blankum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Súsanna Olsen og Bogi Andreasen.

Blankt atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

## 281/23 Gøtan kring Havnina og fiskastykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 175/17 | 17/02247-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 246/17 | 17/02247-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 56/17 | 17/02247-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 54/17 | 17/02247-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 306/17 | 17/02247-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 308/17 | 17/02247-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 177/18 | 17/02247-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 56/18 | 17/02247-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 74/18 | 17/02247-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 251/18 | 17/02247-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 374/18 | 17/02247-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 358/18 | 17/02247-1 |
| 13 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 320/18 | 17/02247-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 17/19 | 17/02247-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 153/19 | 17/02247-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 242/19 | 17/02247-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 278/19 | 17/02247-1 |
| 18 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 250/19 | 17/02247-1 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 13/20 | 17/02247-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 21/20 | 17/02247-1 |
| 21 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 15/20 | 17/02247-1 |
| 22 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 98/20 | 17/02247-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 130/20 | 17/02247-1 |
| 24 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 101/20 | 17/02247-1 |
| 25 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 250/20 | 17/02247-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 359/20 | 17/02247-1 |
| 27 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 314/20 | 17/02247-1 |
| 28 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 184/23 | 17/02247-1 |
| 29 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 303/23 | 17/02247-1 |
| 30 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 281/23 | 17/02247-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ringrás kring Havnina. Ringrásin er eitt áleið 35 km langt gøtu- og vegasamband, sum liggur í landslagnum kring býin. Hugskotið er at leiða borgaran og ferðafólk út í náttúruna umframt at skapa søguligar og mentanarligar upplivingar á leiðini.

Ringrásin er eitt samanhangandi strekki, sum fevnir um seks styttri og longri leiðir við hvør sínum serliga eyðkenni - frá miðbýnum og niðan í fjallalendið. Ringrásin bjóðar tí náttúrupplivingar við rørslu og útsýni umframt upplivingar fram við bygdum øki, har surrandi býarlívið skilur seg týðiliga frá tí opna landslagnum. Landslagið er sermerkt við jørð, vatn og vindi, ið avgjørt setur sín dám á leiðina.

Ringrásin tillagar seg landslagið, og fylgir so vítt møguligt verandi vegum og gøtum, sum tilsamans telja 25 km av leiðini.

Gøtan millum bý og hav
Sum ein liður í heildarætlanini av ringrásini er uppskot at gera gøtu fram við strondini Yviri við Strond. Hugsanin er at skapa eitt samband frá Skansanum og niðan til Boðanes, har fólkið kann flyta seg burtur frá einum vegastrekki við nógvari ferðslu og tættari at náttúruni. Harafturat kann kommunan verja landslagið við at leiða fólk, hvar tey skulu ganga, hetta eisini í mun til vaksandi ferðafólkatalið.

Væl vitandi um, at hav og vindur setur sín dám á strondina, vil leiðin ikki altíð vera atkomulig, tá sjógvur skolar inn yvir. Arbeiðast skal við eini ítøkiligari ætlan, ið nemur við tilfarsval í mun til vatnføri, og hvussu sniðgivið verður við virðing fyri náttúruni.

Fiskastykkið
*Yviri við Strond er einasta fiskastykkið, sum eftir er í Havn. Hetta eigur at verða varðveitt og atkomuligt fyri almenningin.*

Leiðir leggja seg eftir, hvar menniskjan hevur havt ávirkan á landslagið. Hetta kemur m.a. til sjóndar í søguligum og mentanarligum slóðum. Eitt dømi um hetta er fiskastykkið Yviri við Strond, ið liggur á leiðini frá Skansanum til Boðanes. Økið varð nýtt til fiskaturking, eisini nevnt fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu.

"Helst eru tey farin at turka fisk á stykkinum yviri við Strond í seinnu helvt av 1920-árunum, ella kanska fyrst í 1930-árunum. Sostatt var virksemið hjá fyritøkuni stutt har yviri.
*Í 1934 søkti Johannes í Stórustovu um loyvi at byggja eitt pakkhús "ved Torgard anlagte Fisketørreplads har jeg tænkt mig opført midlertidig Fiskehus..." Byggiloyvið varð latið honum (Th. Bygningskommision, j. no. 32/1934) V.ø.o. hava tey turkað fisk á hellu og tí steinsetta lendinum á leigutrøðni hjá Johannesi, áðrenn húsið varð bygt. Ein abbasonur Johannes í Stórustovu, Johannes Jacobsen, f. 1935, vanliga nevndur Hannis í Stórustovu, veit at siga, at húsini, sum standa í dag, har feløgini Føroya Ellisakfør og Føroyskir Radioamatørar halda til, eru tey somu húsini, sum vórðu bygd til endamálið á sinni, men eru tó umvæld seinni..."*

Sí søguliga lýsing av fiskastykkinum í skjalinum "Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu". Verandi støða á fiskastykkinum í dag, er hin sama, sum lýst verður í skjalinum, og stendur soleiðis skrivað:

*"...Uttanfyri síggjast enn sjónligu sporini eftir gamla "Bukkvald", og longur uppi er tjaldingarplássið, har fremmandir gestir halda til um summarið. Framvið fjøruna og suður móti Tórgarðstanga, har fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu er, síggjast stórir tyrvdir dungar av alskyns tilfari, asfalt, betong og yvirskotsgróti. Hetta er til lítlan sóma fyri umhvørvið harúti. Fjøran er sum øllum kunnugt friðað, og nú átti tíðin verið búgvin at rudda økið. Undir hesum dungum eru uttan iva eisini leivdir av steinsetta fiskastykkinum.*
*Á fiskastykkinum liggur antennuútbúnaður, og har hevur tað ligið leingi. Niðriundir húsinum, oman móti fjøruni, stendur onnur útgerð og rustar. Hetta átti avvarðandi kommunalu myndugleikin, sum eigur og umsitur ognina, at síggja til at fáa beint burtur..."*

*"...Sum greitt frá omanfyri átti lendið við Tórgarðstanga at verið ruddað. Tað steinsetta lendið er í støðum vorðið meira ójavnt. Tað er farið av tíðarinnar tonn. Hømilia og illgras skora seg upp millum steinarnar, brotnar fløskur liggja og sløðast..."*

Økið fevnir um 11 matriklar, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, Føroya Landsstýri og privatum eigarum.

Fyri at fara undir verkætlanina, gøtu og fiskastykkið, er neyðugt at gera avtalur við avvarðandi eigarar og leigarar og at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Leigusáttmáli er við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør.

Á sumri 2017 var verkætlanin um "Tórsstien" løgd fram, sum starvsnæmingar gjørdu á býarskipanardeildini. Uppskotið er gott grundarlag at arbeiða út frá, og skal ein ítøkilig ætlan gerast, sum í høvuðsheitum fevnir um at rudda økið, gera gøtu og uppskot til skipan av fiskastykkinum og øðrum hóskandi

mentanarsøguligum minnum og útsýnisstøðum á strekkinum Yviri við Strond. Mælt verður somuleiðis til at ein ítøkilig ætlan verður gjørd í stigum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við strandarlinjuni Yviri við Strond liggur í umráðispartinum D1, umframt at ein partur av økinum liggur í B6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tílíkt. Um at skipa gøtur í B6 skal loyvi fáast frá eigarunum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið um varðveitan av nevnda fiskastykki varð reist í 1992. Økið varð skrásett og ein ítøkilig ætlan varð gjørd um at hampa økið og harnæst at varðveita fiskastykkið. Harafturat varð mett frá einum frílendissjónarmiði, at økið av Skansanum - ella Eystfalsskeri og niðan á Boðanes – átti at fatast sum ein heild, og tí er fiskastykkið yviri á Tórgarði áhugavert og hevur sjálvsagdan søguligan týdning. Málið var fyri í mentamálanevndini í 1995, men har kom tað ikki longur.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Økið er friðað sambært lóg um náttúrufriðing.

**Umhvørvisárin**
Mett verður ikki, at gøtan fer at hava serligt árin á umhvørvið.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Krøv frá eigarum og brúkarum av lendinum og ætlanarkostnaður.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ymisk viðurskifti framvið strond skulu gerast í samráð við mentamáladeildina.

Húsaumsitingin metir bygningin ikki vera í góðum standi, og mælir til, at bygningurin verður tikin niður.

Býarverkfrøðingurin tekur undir við ætlanini treytað av, at nýggj staðseting verður funnin til Reinhaldið til at umskipan av sópingarmaskinunum. Og atlit skulu takast til kloakkviðurskifti á staðnum.

**Skjøl:**
Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu, journal nr. 17/02247-2
*Tórsstien,* journal nr. 17/02247-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiliga verkætlan og at fara í samráðingar við avvarðandi myndugleikar og eigarar umframt at játta kr. 1 mió. av íløgunum fyri 2018 til verkætlanina og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti – kunning um verkætlanina:**
Fundur hevur verið við Ólav Frederiksen, formann hjá Føroyskum Radioamatørum,
um at fara í holt við at rudda fiskastykkið og at bjóða økið út til uttanhýsis ráðgeva at koma við uppskoti til, hvussu økið kann gerast til eitt uppihaldsstað, har ljós er varpað á søguna á økinum.
Sambært Ólav hevur felagið onga stórvegis útgerð á fiskastykkinum, og verkætlanin fer ikki at ávirka virksemið hjá felagnum. Ólavur viðmerkir tó, at tað hevði verið tryggast, um onkur forðing varð gjørd millum fiskastykkið og restina av matriklinum, soleiðis at vitjandi ikki fara inn á økið, har allir káplarnir liggja. Sí Fundarfrásøgn Fiskastykki, journal nr. 17-02247-25.

Umsitingin hevur móttikið skipanaruppskot til, hvussu fiskastykkið kann koma at síggja út og uppskot uppá hvussu verkætlanin kann býtast upp í átøk og byggistig frá ráðgeva EYA v/Eyðun Eliasen. EYA hevur tillagað uppskotið eftir kunning frá Ólavi sí Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, journal nr. 17-02247-26.

**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Uppskotið fevnir um økið frá norðanfyri vegnum móti campingøkinum og vegnum út á Bukkvald og suðurum lítlu "víkina" við matrikulmarkið (sí s. 12 í uppskotinum). Í skipanaruppskotinum verður mælt til at byggja uppá og fríðka um verandi øki við at:

- leggja tilfar afturat verandi rúgvu av mold, grasi o.l. fyri at gagnnýta økir við lívd, útsýnislinjum og sólargangi.
- reinsa og á summum støðum umvæla steinsetingina á Fiskastykkinum.

Í uppskotinum verður dentur lagdur á at geva vitjandi á fiskastykkinum best møguligu lívd. Uppskot er tí um at gera tvey innvik í skulpturellum skapi, sum vitandi kunnu uppihalda seg í. Innvikini verða skorin inn í steinlaðingina og helluna á Fiskastykkinum. Fyri at fólk skulu trívast á einum útiøki sum hesum, er týdningarmikið at økið ikki er ov vítt. Tí er dentur lagdur á at gera "verjugarðar" móti vestri, norðri og eystri á ovara partinum av fiskastykkinum. Eftir at økið er ruddað og nærri skrásett, verður støða tikin til, hvussu langt suðureftir tað broytta fiskastykkið skal fara. Skráarnir á økinum verða klæddir við timburbrettum, so hallið ikki verður ov stórt. Hetta ger tað eisini møguligt at skapa eina farleið, sum kann knýtast at ætlaðu 'Gøtuni kring Havnina'.
Uppskotið fevnir eisini um at gera parkeringsøkið har sum Reinhaldið heldur til í dag og at nýta asfaltrúgvuna móti sjónum til at geva lívd.

Harafturat verður eitt ítøkiligt átak skotið upp, ið snýr seg um at umskapa bygningin á ognini til endamál, sum hava tilknýti til fiskastykkið ella líknandi evni. Talan kann vera um eitt savn við framsýningum um fiskavinnu og –yrki og/ella eina matstovu, sum borðreiðir við saltfiskavørum. Hugskotið er sera áhugavert, men umsitingin metir, at tað verður torført og sera dýrt fyri Tórshavnar kommunu at flyta føroyskar radioamatørar, ið leiga matrikulin, á annað øki. Leigusáttmálin millum Føroyskir Radioamatørar og Tórshavnar kommunu er galdandi til 2029. Sambært Radioamatørunum eru káplar blivnir lagdir á lendið gjøgnum eitt langt áramál, og eru sera nógvir arbeiðstímar lagdir í hetta arbeiði. Káplarnir liggja sum eitt eiturkoppanet á einum stórum parti av økinum, og tað er nærum ómøguligt at flyta ella taka káplarnar uppaftur.

Uppskotið fevnir um 8 byggistig (sí s. 17 í uppskotinum). Umsitingin mælir til, at farið verður ígongd við at bjóða byggistig 1, 3, 4 og 8 út til ávikavist ráðgeva og tilboðsgeva at menna. Sí byggistig niðanfyri.

1. Skráseta økið neyvari fyri møguligar leivdir, lutir o.a.
3. Rudda alt økið. Fyrst leyst tilfar og órudd og síðan mold og óegnað gróttilfar o.a.
4. Gera og góðkenna endaligu verkætlanina og fáa loyvi frá friðingarmyndugleikum.
8. Bukkvald-verkætlanin gerast so hon eisini gerst ein natúrligur partur av økinum.

Umsitingin fer í næstum at finna nýggja staðseting til Reinhaldið.

**Skjøl:**
Fundarfrásøgn Fiskastykki, Journal nr.17-02247-25
Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, Journal nr. 17-02247-26

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður uppskotið uppá verkætlanina og beinir málið í teknisku nevnd til kunningar, umframt at umsitingin fer undir at seta ymisku átøkini í verk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti – nýggj staðseting til Reinhaldið**
Saman við teknisku deild hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot um nýggja staðseting til umlastuplássið hjá reinhaldinum í Gundadali.

Smáu feiu-bilarnir eru ikki egnaðir at koyra langar teinar, og arbeiðsfólk við trillubøru skulu sleppa av við ruskið uttan at skula ganga ov langt, tí er týdningarmikið at nýggja staðsetingin er nærhendis miðbýnum. Hugskotið er at savna øll umlastuplássini hjá reinhaldinum í Gundadali. Hetta merkir, at umlastuplássini á Skálatrøð og á Bukkvald verða flutt, og at hesi øki tí eisini verða tøk til framtíðar verkætlanir.

Uppskot upp á staðseting í Gundadali eru gomlu vaskiplássini hjá bilstøðini Bil, sum Tórshavnar kommuna er eigari av. Neyðugt verður at tillaga plássini til bingjur og gera vaskipláss við oljuútskiljara. Ein gamal oljuútskiljari er á plássinum, men um hesin kann brúkast má eftirkannast. Um tangin ikki kann brúkast, kann oljutangin á Bukkvald blíva tikin upp og staðsettur í Gundadali. Fólk frá Tórshavnar kommunu er frammanundan í Gundadali og rudda aftaná landsdystir og sunnudagsdystir. Tí er upplagt, at sameina hetta virksemið við umlastuplássið hjá Reinhaldinum og skipa alt hetta í Gundadali.

Fyri at plássið skal verða til so lítlan ampa fyri grannar, virksemi og vitjandi á økinum sum gjørligt, er neyðugt at gera ein uml. 2 m høgan garð uttan um plássið. Plássið liggur beint uppat einum grønum kliva av runnavøkstri, og tí vildi tað verið upplagt at plantað runnar uppat garðinum, soleiðis at plássið verður

betri sameina við verandi øki. Sum sæst á Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf journal nr. 17/02247-30, rennur Havnará vestan fyri plássið og mælt verður til at plássið verður flutt 2,5 m eystureftir burtur frá ánni og 0,5 m frá vegnum. Fyri at sleppa undan at hava inn- og útkoyring frá Gundadalsvegnum, verður mælt til at eitt automatiskt portur verður sett á eystaru síðu av plássinum, soleiðis at feiu-bilarnir kunnu koyra inn millum bingjurnar til tøming og vaskiplássið og at lastbilur kann koyra inn fyri at heinta bingjurnar. Samanlagt verður plássið uml. 250 fermetrar.

Kostnaðurin fyri at fyrireika verandi pláss á Bukkvald var uml. kr. 350.000. Av hesum plássi kann oljuútskiljari og skúrur brúkast aftur í Gundadali og harafturat kemur so garðurin.

**Skjøl:**
17/02247-30 Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekurin mæla til at samtykkja nýggja staðseting av umlastistøð til reinhaldið í Gundadali, at játta 350.000 kr. av L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið til flytan av verandi umlastistøð Yviri við Strond niðan í Gundadal, at beina málið í mentamálanevndina til kunningar og síðani í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyri at koma víðari við ringrásini/gøtuni kring Havnina og kunna byrja uppá strekkið Yviri við Strond, er neyðugt at fara í samráðingar við traðareigararnar (matrikuleigarar), umframt leigararnar av kommunalu stykkjunum.

Størsti partur av matriklunum Yviri við Strond er privatogn, tí verður viðmælt, at hvør einstaki eigari verður innkallaður til ein kunnandi fund við tí fyri eyga at finna eina loysn, ið báðir partar kunnu semjast um.

Væntast kann, at samráðingartíðin verður nakað drúgv. Væntast kann somuleiðis, at ikki allir matrikuleigarar eru eins jaligir fyri tankanum, um at fáa eina gøtu ígjøgnum teirra lendi, og kunnu tí spenna føtur fyri ætlanini ella krevja endurgjald fyri miss av lendi.

**Samandráttur av uppskotið frá SNA:**
Fyri jól lat umsitingin SNA uppgávuna at gera uppskot til staðseting av gøtuni frá Skansanum yvir til Boðanes, umframt staðsetingina skuldi uppskotið fevna um snið av gøtuni.

Uppskotið frá SNA fevnir um strekkið Yviri við Strond, og verður gøtan á hesum strekkinum kallað Strandargøtan. Gøtan strekkir seg góðar 2,5 km frá Skansanum og til Boðanes.

Uppskotið leggur dent á, at Strandargøtan leggur seg eftir landslagnum og er staðsett á markinum millum fjøruna og bøin. Hetta fyri at geva tí vitjandi møguleika at uppliva náttúruna, bøin, fjøruna og brúsandi havið.

Gøtan í sær sjálvum vísir á, at tað menniskjaliga er tilstaðar í økinum, millum land og hav. Hetta sæst aftur í støddarlutfallinum á gøtuni, har mát sum favnur, alin, føtur og tummar verða nýtt gjøgnum alla gøtuna. Hetta styrkir tankan um at gøtan er ein menniskjansskapur bulur, ið er skolaður uppá land, samstundis sum at gomlu máteindirnar verða varðveittar.

Tilfarsvalið verður rátt og einkult, sjálv gøtan kemur at liggja sum ein betong strukturur við eini stálrammu/veggi, men har verða økir, ið verða meir rúmlig og viðgjørd úr øðrum tilfari, so sum timbur, innstoyptir flísar í ymiskum litum og ljósi.

Ynski er, at gøtan minst møguligt er til ampa fyri lendið, tí kemur betongflísin at hava føtur, ið kunnu javnast eftir lendinum, haraftrat verða ljós innleggingar gjørdar, so gøtan verður upplýst.

Á strekkinum verður tann vitjandi kunnaður um áhugaverd støð á strekkinum, har tað er upp lagt at steðga á, og verða hesi steðgiplássini gjørd við bonkum til lívd, kagstøðum, brúgvum o.ø.
Dentur er lagdur á at uppliva skifti í landslagnum, sum at fara frá fjøru til hellu, vøkstur o.a. hetta sæst aftur í sjálvari gøtuni við at ymiskt tilfar verður nýtt sum bindiliður á gøtuni.

Sambandið oman til Strandargøtuna er raðfest við at leggja smáar gøtur úr løgasteinum ígjøgnum summar traðir.

**Fiskastykkið**
Ráðgevarafyritøkan EYA arbeiðir við fiskastykkinum, og í løtuni eru tey í samráðingum við Tjóðsavnið, har uppruna uppskotið verður tillagað. Meir kunning um verkætlanina Fiskastykkið kemur seinni.

**Átøk:**
Neyðugt er at fara í samráðingar við matrikuleigararnar fyri at finna eina loysn, ið hóvar øllum pørtum. Síðani skal Strandargøtan projekterast og setast í verk.

**Skjøl:**
- *Strandargøtan síður A3 print, journal nr. 17/02247-37*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at byrja samráðingar við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, fyri síðani at koma aftur í nevndina við einum ítøkiligum úrskurði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Skráseting av djóra og plantulívi:
Umsitingin hevur havt fundir við Tjóðsavnið um verkætlanina, og eru komin ásamt um at gera eina skráseting av djóra- og plantulívi á økinum, har gøtan er ætlað. Skráseting av djóralívi verður í eitt ár, og plantuskrásetingin á vári og summari.
Við hesum kann metast um møgulig umhvørvisárin av gøtuni sum frálíður.
Báðar kanningarnar eru farnar í gongd og er avtalað við Tjóðsavnið, at hava ein støðufund í vetur um gongdina, og innkomin úrslit av skrásetingini.

Gøtan kring Havnina:
Umsitingin hevur á vári í 2019 verið í samráð við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, og greitt teimum frá ætlanunum, ið Tórshavnar kommuna hevur í økinum. Samráðingarnar hava gingið væl og samanumtikið hevur undirtøkan verið positiv. Viðmerkingar av ymiskum slagi hava verið, og eru tær tiknar við í víðari viðgerðina av málinum.
Uttanhýsis ráðgevi hevur gjørt uppskot til loysn av elementum, sum skulu byggjast framvið sjóvarmálanum sum gøta.

Royndarverkætlan:
Ætlanin er gera element at byggja gøtuna upp við. Loysnin við elementum ger tað, at lendisviðurskiftini í fjøruni verða órógvað sum minst. Tilfarið av elementunum verður ymiskt, alt eftir hvussu økið er.
Í fyrsta umfari er ætlanin at gera eitt strekki við 3 ymiskum royndarelementum á matr.nr. 651l og 651b, so elementini kunnu roynast í ein vetur, og loysnin kann eftirmetast, áðrenn farið verður víðari.
Matr.nr. 651l og 651b, er ogn hjá Tórshavnar kommunu og verða nýtt til parkering. Royndarelementini verða lætt atkomilig, og koma ikki at órógva verandi virksemi á økinum.

Arbeiðstakarar eru ikki áhugaðir at geva tilboð uppá royndarelementini, men mett verður, at royndarelementini kunnu framleiðast og monterast á staðnum fyri 0,6 mió. kr.

**Skjøl:**
*17/02247-37 Strandargøtan síður A3 print*
*17-02247-76 K100_Betongelement_strandagøta*
*17-02247-76 gøta skitsa*
*17-02247-76 gøta perspektiv*

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at seta fyribils ætlanina við gøtuelementum í verk,
- at játta 0,6 mió. kr. av konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið,
- at heimila umsitingini at seta royndarverkætlanina í verk
  og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at arbeiðið ikki er boðið út.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og  Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2020 eru játtaðar 5.000. tkr á konto 6275 fríðkan av kommununi.
Royndarelement til gøtuna kring Havnina eru prosjekterað, boðin út og verða framleidd og sett upp í næstum.  Fyrsta stig við rudding av Fiskastykkinum er liðugt, og skal næsta stig setast í verk. Næsta stig er skurður í lendi, umvæling av lagingunum og atkomuviðurskifti til Fiskastykkið, sum verða sett í verk í samstarvi við ráðgeva og Tjóðsavnið.
Liðugtprosjektering av konstruktiva partinum av útsýnispallinum á Bukkvald skal setast í verk, og arbeiðið hareftir bjóðast út.

**Bindingar í lendi**
Løgfrøðilig ráðgeving ísv lendiseigarar og leigarar verður tikið uppaftur í sambandi við framhald av gøtuni. Leigusáttmálin við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør er galdandi inntil 2029. Býarskipanardeildin hevur samskift við Radioamatørarnar um hetta, og er semja um, at virksemi hjá teimum eigur at verða flutt, tá ið Fiskastykkið og Gøtan kring Havnina verður tikin í nýtslu sum alment brúksøki. Ynskiligt er tí, at nýggj staðseting  verður funnin, so teir kunnu byrja at fyrireika seg til at flyta av økinum skjótast til ber.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 2.500 tkr. til framhald av ætlanini um gøtuna kring Havnina, Fiskastykkið og Bukkvald av løgukarminum konto 6275, fríðkan av kommununi, á projektkonto L62032, Gøtan Kring Havnina, Fiskastykkið, og at geva býarskipanardeildini heimild at seta arbeiðið í verk.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:**
Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipananevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum í byggi- og býarskipanarnevndini 23. apríl 2020 varð uppskot til samband millum Sandagerði og Runding lagt fram. Uppskotið var kandidatuppgáva hjá nýútbúnum landslagsarkitekti.

Uppskotið er væl í tráð við ætlanina um ringin kring Havnina, men má tillagast ætlanina við H-Bygninginum hjá Landinum og ætlanina í Álakeri hjá Tórshavnar kommunu sí 19/00083-6 bátahylur í Álakeri – Byggiprogram.

Rætt hevði verið, at fingið landlagsarkitektin at gjørt eitt uppskot uppá hetta sambandið dagført í mun til hesar ætlanirnar, og at greina bindingarnar sum eru uppat sambandinum, fyri at hetta kann loysast í eini heild.

**Skjal:**
19/00083-6 bátahylur í Álakeri – Byggiprogram
17/02247-3 Tórsstien_2017_0

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 100.000,- kr. av L62032, Gøtan Kring Havnina Fiskastykkið, til at gera tillagað skipanaruppskot til loysn av sambandinum í økinum, og at greina bindingarnar, sum eru uppat økinum, fyri at hetta kann loysast í eini heild og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at umvæla Fiskastykkið er skipað í 3 byggistig.
Byggistig 1 snýr seg m.a. um innvik og gøtu frá vegnum inn til innvikið, og miðling av fiskastykkinum.
Byggistig 2 og 3 eru umskipað nakað í mun til upprunaliga ætlað, soleiðis at gøtan gjøgnum økið er samlað í byggistigi 2, og lendisarbeiðið er samlað í byggistigi 3.
Byggistig 1 er í gongd, gongur væl, og fylgir ætlanini.
Mett verður at tað er skilagott fyri samlaðu ætlanina at fáa gjørt gøtuskipanina gjøgnum økið lidna saman við byggistigi 1.
Fyri at halda áfram við byggistigi 2 og 3, er neyðugt við meirjáttan.

**Skjøl:** 19/03740-39 Fiskastykkið Yviri við Strond – yvirlit og 1. byggistig

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- sáttmáli verður gjørdur við arbeiðstakara uppá byggistig 2 og 3
- kr. 500.000 verða fluttar av kontu 6275 L00001 Løgukarmur fyri árið á kontu 6275, L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið
- kr. 900.000, ið 26. nov. 2020 vórðu  játtaðar til keyp á trøð í Hoydølum, verða fluttar á L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið, eftirsum trøðin er seld til annan
- kr. 700.000 verða fluttar av kontu 6210 Fríðkan og viðlíkahald á kontu 6275, L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið
- málið verður beint í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at:

- sáttmáli verður gjørdur við arbeiðstakara uppá byggistig 2 og 3
- kr. 500.000 verða fluttar av kontu 6275, L00001 Løgukarmur fyri árið á kontu 6275, L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 400.000 verða fluttar av konto 6275, L62019 Lendisgøtur á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 367.000 verða fluttar av konto 6275, L62023 Fílendið við Hoydalsá konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 993.000 verða fluttar av konto 6275, L62033 Havnadalur - fríøkið, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 370.000 verða fluttar av konto 6275, L62036 Fríðkan av kommununi – Træplanting á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 450.000 verða fluttar av konto 6275, L62040 Havnin sum súkklubýur á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 700.000 verða fluttar av konto 6275, L62041 Almenn wc í Tórshavnar kommunu á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.

- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samanumtøka:
Fiskaplássið er partur av yvirskipaðu ætlanini um gøtuna kring Havnina.
Málið um Fiskaplássið varð politiskt sett á skrá í sept í 2004.
Ein søgulig lýsing av økinum varð tá gjørd, og hevur hon ligið til grund fyri arbeiðinum at menna og fríðka um økið á Fiskaplássinum og at gera *Fiskaplássið livandi aftur.*

Ætlanin varð í 2018 boðin út í høvuðsarbeiðstøku.
EYA er høvuðsráðgevi og hevur sniðgivið økið, undirráðgevarar hava verið HMP Consult (stál) og Viggo Akraberg Hansen (el), Erling Isholm søgufrøðingur hevur orðað miðlingina, sum er á Fiskaplássinum.
Hjálpirót hevur framt arbeiðið í høvuðsarbeiðstøku.
Stál til ætlanina varð veitt í byggiharraveiting av Blikksmiðjuni.
Arbeiðstakarasáttmáli uppá 1. byggistig á Fiskaplássinum varð undirskrivaður 12. okt. 2020, og 2.-3. byggistig varð lagt afturat 21.12.2020.
Avhendingin av 1. byggistigið var 25.05.2022, og varð leiðin inn í økið, og innvikið tá tikið í brúk.
2. og 3. byggistig vórðu handað 13.09.2023, og er verkætlanin Fiskaplássið tískil endaliga avhandað.

Fíggjarviðurskifti.
Í juni 2022 vórðu 830.000,- kr av verkætlanini játtaðar til verkætlanina *jnr 21/00407 Miðbýarætlan - Havnará.*

Í sambandi við sluttuppgerðina av verkætlanini vísir tað seg, at tørvur er á at fáa 338.625,00 kr. innaftur á verkætlanina til gjald av seinastu rokningunum.

Framhaldandi tilgongd:
Upprudding av gamla Buckwald og fríðkan av økinum millum Fiskaplássið og kampingøkið eigur eisini at verða raðfest sum framhald av hesari ætlanini. Her er talan um stórar nøgdir av asfalti, sum máast burtur í brimi, og dálka økið fram við sjóvarmálanum yviri við Strond.

Framtíðar rakstur:
í gamlari tíð vórðu fiskaplássini saltað fleiri ferðir árliga, fyri at halda stykkini, og at halda gróðuri burtur. Játtan til hendan rakstur, umframt at halda plantaða økið eigur at verða lagdur afturat rakstrarjáttanini komandi árini, so rakstrardeildin tekur økið við í raksturin. Mett neyðug játtan til røkt og viðlíkahald er 50.000,- kr árliga.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6275 | LK62056 | Náttúruøkið í Dalinum Langa | 6275 | L62032 | Gøta kring Havnina og fiskastykkið | | 338.625.00 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 338.625.00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2020/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 50.000,- |

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og Býararkitekturin mæla til:

1. at játta 338.625,00 kr av konto 6275, LK62056 náttúruøkið í Dalinum langa á kontu 6275 L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
2. At verkætlanin, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið, verður lokað, tá seinastu rokningarnar eru goldnar. At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ískoyti:
Allar rokningar eru nú goldnar og verkætlanin er í hallið við kr. 305.281.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6275 | LK62056 | Náttúruøkið í Dalinum Langa | 6275 | L62032 | Gøta kring Havnina og fiskastykkið | | 305.281 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 305.281 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2020/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 50.000 |

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og Býararkitekturin mæla til:

- at játta 305.281 kr av konto 6275, LK62056 náttúruøkið í Dalinum langa á kontu 6275 L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- At verkætlanin, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið, verður lokað,
- At beina málið í býráðið

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

## 282/23 Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.04.2018 | 21/18 | 18/01334-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 114/18 | 18/01334-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 91/18 | 18/01334-2 |
| 4 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 176/18 | 18/01334-2 |
| 5 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 73/18 | 18/01334-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 333/18 | 18/01334-2 |
| 7 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 281/18 | 18/01334-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 214/19 | 18/01334-2 |
| 9 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 186/19 | 18/01334-2 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 183/23 | 18/01334-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 06.11.2023 | 60/23 | 18/01334-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 309/23 | 18/01334-2 |
| 13 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 282/23 | 18/01334-2 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við søluna av grundøkjum undir Kongavarða, er partur av sølupeninginum oyramerktur til at gera ymiskar manglar og ábøtur í økinum. Áheitan er komin frá eigarafelagnum undir Kongavarða, um ymisk ítøkilig átøk.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk ið ynski er um at fáa gjørd eru: Asfaltering og at fáa gongu- og súkklubreyt gjørda frá innkoyringini til býlingin og inn. Eisini skulu gerast 36 parkeringspláss inni frá vegnum. Spælipláss, sum eigarafelagið skal standa fyri at gera, skal gerast eystanfyri íbúðarblokkarnar, alt sambært uppskot 18/01334-1.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Kommunan hevur selt part, uml. 5500 m$^2$, av matr. nr. 255 a fyri 3 mill. Ætlanin er at brúka hesa upphædd til omanfyri nevndu átøk. Peningurin er tøkur á kt. 6175

Raðfesting er gjørd fyri tøka peningin, ið er kr. 3.000.000,-.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavn** | **Fyri ávís økir í** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | ar kommunu | kommunu ni | kar ella felagsskapir | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **nei** | **nei** | **nei** | **Nei** |
| **Umhvørvisavleiðingar** | **nei** | **nei** | **nei** | **nei** |
| **Sosialar avleiðingar** | | | **ja** | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **ja** | **nei** | **nei** | **nei** |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at peningurin verður brúktur av kt. 6175 at gera asfaltarbeiðið liðugt, at gera 36 P-básar og veita stuðul til at gera spælipláss eystan fyri verandi íbúðarblokkar.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð bjóðað út til hesi feløg um at geva undirhondstilboð. Útbjóðingartilfarið innihelt 30 p-básar, hetta tí við 3 x 12 p-básum varð ov langt millum gøtuljós.

1) Articon P/f
2) Jóan Petur Vang Sp/f

Bæði tilboðini komu inn.

a) Articon P/f kr. 1.988.435,00
b) Jóan Petur Vang sp/f kr. 2.113.855,50

Sp/f Ráð stóð fyri útbjóðingini og at eftirhyggja tilboðini.
Metingin frá ráðgeva ljóðaði uppá kr. 1.551.040,00, og lægra tilboðið var sostatt nakað hægra enn kostnaðarmetingin. Asfaltarbeiði av verandi vegi var ikki íroknað, og skal eftir ætlan gerast einaferð seinni í 2019.

Umsitingin hjá TK hevur hugt eftir tilboðnum, og tekniska deild mælir til at finna sparingar í tilboðnum. Eftirfylgjandi hava samráðingar verið millum umboð frá Articon P/f og teknisku fyrisiting, og tilboðsupphæddin er komin niður á 1.711.394,49 uttan mvg. Hetta verður gjørt við at gera nakrar broytingar, soleiðis at gongubreyt á 2 metrar verður øðrumegin.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri verkætlanardeildini mæla til at taka undir við nýggjari tilboðsupphædd frá Articon P/f, undirskriva arbeiðstakarasáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Játtanin til verkætlanina er áður samtykt og er tøk á L81033.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera átøk undir Kongavarða, herundir m.a. parkeringspláss og øki til spælipláss er nú liðugt.

Ymisk arbeiði, sum ikki vóru við í ætlanini, eru eftir at gera, herundir m.a. innrætting av spæliplássi og ferðslutrygdarlig átøk, tað er upplyftar flatur, gonguteigar við ljósi o.a.

Á økinum har NN Holding skulu byggja íbúðir, er nógv mold er komin at liggja. Moldin er frá aðrari bygging á staðnum.

Viðvíkjandi íbúðarbygging hjá NN Holding, verður víst til mál nr. 18/01973 Íbúðarbygging undir Kongavarða.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til, at peningurin sum kemur inn fyri søluna av økinum til NN Holding, kr. 1.600.000, verður játtaður til omanfyri nevndu átøk undir Kongavarða og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir vi tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir vil tilmælinum og mælir frá at selja til N.N. Holding, og at peningur til omanfyrinevndu átøk verður játtaður av 6275, fríðkan av býnum.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Atkvøtt varð um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrin Frýdal, Jógvan Arge, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Átøkini, sum vórðu sett í gongd í 2019, eru liðug, og málið skal tískil lokast.

Átøkini vóru:
- Nýggj gongubreyt
- Parkeringspláss
- Spælipláss

Verkætlanin L81033, Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir er í halli við 5.000 kr, nú øll átøkini eru framd. Mælt verður til, at hallið verður flutt á karmin LK81999, Vegaverkætlanir.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81033 | Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir | | 5.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 5.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2019-23 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- at verkætlanin verður lokað, og at hallið á L81033, Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir, á kr. 5.000 verður flutt á LK81999, Vegaverkætlanir.
  at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 283/23 Kloakkætlan 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 11/23 | 23/00660-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.11.2023 | 56/23 | 23/00660-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 310/23 | 23/00660-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 283/23 | 23/00660-1 |

**Upprunin til málið**
Á hvørjum ári er játtanarkarmur latin kloakkøkinum á kontunum 6810 (rakstur) og 6875 (Íløgur). Fyri 2023 er játtanarkarmurin á 6810 Kloakkir o.a. kr. 7.717.000 og á 6875 kloakkir (íløgur) kr. 8.000.000. Í hjáverandi máli verður lýst, hvørji arbeiði verða raðfest á hesum deildum.

**Lýsing av málinum**
Á íløgusíðu verða hesar nýgerðir og endurreisingar gjørdar (kr. 7.950.000)
- Hosufóðring (kr. 3 mió. eiga at verða lagdar av til 2023 til størri samlað arbeiði)
- MARK (Oyggjarvegur – kr. 750.000)
- Miðbýarætlanin (Leiðingar í Tórsgøtu og Reinsiverk at taka miðbýin – kr. 2.000.000)
- Pedda við Steins gøta (kr. 1.200.000)
- Filming og spuling (kr. 1.000.000)

Á rakstrarsíðu verða hesi arbeiði raðfest (kr. 3.000.000).
- Reynstún (kloakkir út móti nýggju gøtuni) (kr. 300.000)
- Magnus Heinasonargøta (kr. 800.000)
- Bøgøta (Niðari partur) (kr. 1.400.000)
- Miðhorn og Undir fjalli (umleggingar kr. 500.000)

Umframt hesi arbeiði verða á rakstrarsíðu bráðfeingis arbeiðir, sum uppstanda raðfest, herundir eisini kloakkarbeiðir, sum eru knýtt at vegaætlanini fyri 2023. Hesi kunnu verða raðfest fram um tey omanfyri nevndu arbeiðini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| Sosialar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevdin tekur undir við ætlanini innan kloakkøkið fyri 2023. Ætlanirnar á rakstrarsíðuni verða fíggjaðar av rakstri á konto 6810. Íløguverkætlanirnar verða at leggja fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráðið sambært játtanarreglunum, so hvørt tørvur verður á hesum.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Við endan á september mánaði 2023 er status í mun til kloakkætlanina soleiðis:
- Á íløgusíðuni:
  - Hosufóðringin varð framd í september mánaði. Faktureringin er ikki avgreidd.
  - Kloakk er løgd niðan til Mark á Oyggjarvegnum yvir rakstur
  - Filming og spuling í miðbýnum er í gongd.
- Á rakstrarsíðuni:
  - Reynstún er í gongd í sambandi við gerð av vendiplássum.
  - Magnus Heinasonargøta er útsett vegna ivamál um verkætlan í bygningum hjá Frants Restorff.
  - Bøgøta er útsett vegna væntaða mótstøðu frá handilslívi. Verður sett í verk (lutvíst) í fyrsta ársfjórðingi 2024
  - Miðhorn og undir Fjalli. Arbeiðið er ikki sett í verk enn.

Á rakstarsíðuni eru umframt omanfyri standandi arbeiðir eisini hesi arbeiðir gjørd:
- Nýggj stikk til Skúlan á Trøðni (82 tkr)
- Nýggj stikk til Sigmundargøta 30 & 32 (40 tkr)
- Lækka kloakk við Í Líðini 77 – frá húsum omanfyri (27 tkr)
- Nýggj stikk til Brekkugøta 6 gjøgnum Tvørgøtu 15 (31 tkr)
- Nýggj stikk til Ryskigøtu 46 (159 tkr)
- Kloakk-stikk til trøð omanfyri Lagatrøð 14 (47 tkr)
- Klokkaragøta 23 - lækka kloakkstikk frá húsi omanfyri (30 tkr)
- Flutt kloakk við Varðagøtu 35A vegna bygging (300 tkr)
- Nýggj klorleiðing millum vara og niðara vøll Gundadal (150 tkr)
- Atgongd til Havnará millum ovara og niðara vøll Gundadal (50 tkr)
- Dagført kloakk-leiðing gjøgnum undir Heygnum 8 og 14 metur við Velbastaðveg 34 (200 tkr)
- Nýggj stikk til Lambatrøð, Argjavegur 45 (50 tkr)
- Dagført kloakkleiðing frá Kráarvegi og út í Argjaveg (75 tkr)
- Dagført regnvatnsleiðing við Argjaveg 48-52 (71 tkr)
- Dagført regnvatnsleiðing við Argjaveg 48 (25 tkr)

Hesi arbeiðir eru mett til ein samlaðan kostnað á 1.282 tkr. Talan er um akutt arbeiðir, sum eru gjørd. Umframt hesi arbeiðir, sum eru gjørd av eksternum veitarum, eru eisini framd fleiri onnur smærri akutt arbeiðir av arbeiðsfólkunum á rakstrarstovninum.

Niðanfyri er sett í lista arbeiðir, sum tørvur er á at fáa framd sum íløgur. Arbeiðini kunnu øll setast í verk í 2023 innan fyri verandi løgukarm LK68999 Kloakkir á konto 6875 Kloakkir (íløgur).

| Býráðsfundur<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1188 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

1. Miðbýarætlanin – Kloakkleiðingar og reinsiverk í Tórsgøtu
    a. Bjóða út projektering.
    b. Gera sáttmála um projektering
2. Skipan til betri gagnnýtslu av filming av kloakkum
    a. Skipanin ger, at umsitingin í nógv størri mun er før fyri at taka skjótar og rættar avgerðir í samband við gjøgnumgongd av filmaðu kloakkleiðingunum.
    b. Innkeypa skipan og veiting av uppseting av dátum til skipanina.
    c. Mettur kostnaður 300.000 kr.
3. Umlegging/dagføring av leiðing gjøgnum Sigmundargøtu 30 og stikk til J.C.Svabosgøta 19
    a. Bjóða út arbeiðið og gera sáttmála.
    b. Mettur kostnaður 200.000 kr
4. Nýggj stikk til Lágarveg 17 gjøgnum Traðabrekku 23
    a. Bjóða út arbeiðið og gera sáttmála.
    b. Mettur kostnaður 300.000 kr
5. Umlegging av kloakk við Dungagøtu 3 & 5
    a. Bjóða út arbeiðið og gera sáttmála.
    b. Mettur kostnaður 100.000 kr
6. Leingjan av kloakk við undir Gráastein
    a. Bjóða út arbeiðið og gera sáttmála
    b. Mettur kostnaður 60.000 kr
7. Leingja kloakk og regnvatnsleiðing við Dalaveg í J. Paturssonargøtu (Kaggin)
    a. Bjóða út arbeiðið og gera sáttmála.
    b. Mettur kostnaður 125.000 kr
8. Avleiddar kloakkir við Miðhorn og undir Fjalli
    a. Bjóða út arbeiðið og gera sáttmála
    b. Mettur kostnaður 500.000 kr
9. Kanning av útlátum í Sandá
    a. Melcon kanna Sandá. Endurtøka av kanning frá 1996
    b. Kanningin skal staðseta útrensl frá dálkandi keldum fram við Sandá. Samanbera við støðið í 1996.
    c. Er týðandi í sambandi við eDNA-kanningar frá SMJ. Kann fokusera, hvar vit skulu seta inn fyri at minka um bakteriunøgdir í ósanum.
    d. Gera sáttmála um arbeiðið.
    e. Mettur kostnaður 150.000 kr

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verkætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | | Miðbýarætlanin – Kloakkleiðingar | ja |

| **Upphædd** |
|---|
| 750.000 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | og reinsiverk í Tórsgøtu | | |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Skipan til betri gagnnýtslu av filming av kloakkum | Ja | 300.000 |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Umlegging/dagføring av leiðing gjøgnum Sigmundargøtu 30 og stikk til J.C.S.gøta 19 | Ja | 200.000 |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Nýggj stikk til Lágarveg 17 gjøgnum Traðabrekku 23 | Ja | 300.000 |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Umlegging av kloakk við Dungagøtu 3 & 5 | Ja | 100.000 |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Leingjan av kloakk við undir Gráastein | Ja | 60.000 |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Leingjan av kloakk og regn við Dalaveg í J.Paturssonar gøtu (Kaggin) | Ja | 125.000 |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Avleiddar kloakkir við Miðhorn og undir Fjalli | ja | 500.000 |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 8175 | | Kanning av útlátum í Sandá | ja | 150.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | **3.235.000** |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tær í ískoytinum nevndu verkætlanir, sum tørvur er á at fremja sum íløgur, verða samtyktar at blíva settar í verk, og at játtan verður latin til hvørja verkætlan sær, sum lýst í omanfyri standandi talvu, og at málið verður beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina í teknisku nevnd tann 13. mars 2023, so verður mælt til at broyta tilmælið soleiðis at øll eykajáttanin á 2 485.000 kr. verður flutt á konto 6810. Eisini skal viðmerkjast at samanteljingin frá 13. mars var skeiv og nú er rættað.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1190 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6810 | | Kloakkir o.a. | | 2.485.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kr. 2.485.000,- verða játtaðar sum eykajáttan av konto 6875 Kloakkir (íløgur), løgukarmur LK68999 Kloakkir, á rakstrarkonto 6810 Kloakkir o.a. til at fíggja smærru verkætlanirnar, sum eru lýstar í hesum ískoytinum, og at málið verður beint víðari í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 284/23 Nýggj pumpuskipan til vatngoymsluna í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.10.2023 | 46/23 | 23/03112-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 276/23 | 23/03112-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 06.11.2023 | 61/23 | 23/03112-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 311/23 | 23/03112-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 284/23 | 23/03112-1 |

**Upprunin til málið**
Pumpurnar (tvær), sum fylla uppí vatnbrunnarnar í Kollafirði, eru nú í so ringum standi, at tær mugu skiftast út.

**Lýsing av málinum**
Vatnverkið hevur uppsett tvær pumpur, sum skulu hjálpa at fylla vatngoymsluna (2 vatnbrunnar) í Kollafirði. Pumpurnar flyta vatn úr Botnánni og 40 m niðan í goymsluna. Tá turkur er í eitt longri tíðarskeið, minkar vatnið úr hinum báðum inntøkunum, og tá er neyðugt at hava hesa pumpurnar at hjálpa til, so at vatngoymslan ikki tømist.

Pumpurnar standa úti, bert vardar móti veðrinum av krossfinérplátum, og standurin á pumpunum er nú so ringur, at tað ikki svarar seg at umvæla tær, og roknast kann við, at tær havarera innan stutta tíð.

Mettur kostnaður er tkr. 660,- íroknað tilfar, montering, óvæntað og mvg.

Ásannandi at hetta er eitt bráðfeingis átak, sum má gerast, fyri at TK kann røkja sína skyldu (at levera vatn til borgarar og annað virksemi í kommununi), og at hetta ikki kann fíggjast við verandi rakstrarjáttan, verður mælt til at fíggja pumpuskipanina við eini eykajáttan.

Um skipanin skal fíggjast av rakstri, noyðist vatnverkið at skerja sítt virksemi munandi, fyri at halda játtanina.
Vatnverkið hevur ein løgukarm til at fíggja prosjektering av nýggjum vatnreinsiverki í Havnardali, men ongin løgukarmur ella játtan er til at fíggja dýra útgerð, sum antin yvir tíð ella knappliga brotnar.

Konto 6710 er til og við apríl 12% yvir játtan, og við komandi rakstrarútreiðslum á vatndeildini verður tað ikki møguligt at viðlíkahalda eina niðurslitna pumpuskipan, hvørki í verandi ella komandi ári.

Fyri at vatnverkið framhaldandi kann veita góða tænastu, verður mælt til antin at hækka rakstrarjáttanina á 6710 við neyðugu upphæddini ella uppræꞇta ein løgukarm, til at fíggja kostnaðarmikið viðlíkahald.

**Skjøl**
23/03112-2 Kollafjørður Pumpur í ánni

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1192 | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

### Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☒

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6775 | | | Vatnpumpur við Sjógv |

| **Upphædd** |
|---|
| 660.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 660.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla í fyrsta lagi til:

- at verandi pumpuskipan verður skift út við nýggja skipan
- at eykajáttan á kr. 660.000,- verður latin til at fíggja pumpuskipanina
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina

Í øðrum lagi verður mælt til:

- at, um pumpuskipanin verður fíggjað av rakstri á konto 6710, verður virksemið hjá vatndeildini skert tilsvarandi.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við fyrra tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Málið beint aftur í teknisku nevnd við atliti til at ávísa fígging til ætlanina.

### Ískoyti:

Vatnmeistarin hevur kannað alternativar møguleikar fyri at skifta pumpurnar út. Hetta er loysn, har skift verður út til 2 grundfoss pumpur av nøkunlunda sama slag sum verandi pumpur. Harafturat verður stoypt fundament, og settur upp bjálvaður skúrur, at verja pumpurnar. Samlaður kostnaður fyri hetta er uml. kr. 300.000,-. Av tí at peningur ikki er tøkur innan rakstur, og talan er um, at pumpurnar ikki verða umvældar, men nýggjar settar upp á nýtt fundament og í nýggjan skúr, verður mett, at talan um íløgu, og at arbeiðið, verður fíggjað sum íløga.

Tað er veitingartíð upp á pumpuskipanina, men veitari kann fara undir at stoypa fundament og veita skúr 3-4 vikur eftir ordradafesting. Síðani kunnu pumpurnar installerast eftirfylgjandi.
Mett verður, at tað er av størsta týdningi fyri veitingartrygdina av reinum drekkivatni í Kollafirði, at henda íløga verður gjørd.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6775 | LK67005 | Vatnreinsiverk í Havnardali | 6775 | | Nýggj pumpuskipan í Kollafirði | ja | 300.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 300.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- heimild verður latin til, at sáttmálar verða gjørdir við veitarar um nýggja pumpuskipan við pumpum, fundamenti og bjálvaðum skúri.
- játtaðar verða kr. 300.000,- av løgukarmi LK67005 Vatnreinsiverk i Havnardali undir deild 6775 Vatnveiting (íløgur) á nýggja verkætlan «Nýggj pumpuskipan í Kollafirði» undir somu deild.
  beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at 300.000 kr. á løgukarmi LK67005 verða fluttar á konto 6710 vatnveiting.

Málið beint í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 285/23 Umsókn til ummælis um sundurbýti til eigaraíbúðir av matr.nr. 255el, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 231/23 | 23/05090-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 190/23 | 23/05090-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 307/23 | 23/05090-2 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 285/23 | 23/05090-2 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur fingið tvær umsóknir, ið viðvíkja matr.nr. 255el, Undir Kongavarða, Argir.

Onnur umsóknin kemur frá Umhvørvisstovuni, ið biður um ummæli til at sundurbýta matr. nr. 255el, Argir, ið er ein íbúðarbygningur við leiguíbúðum í 48 eigaraíbúðir.

Seinna umsóknin kemur frá eigaranum av ognini, ið søkir um at strika ásetingar í skeytinum um leiguíbúðir og átalurætt, samstundis sum kommunan keypir aftur tann partin av matr. nr. 255el, sum ikki er bygt á, og sum partarnir áður til fánytis hava roynt at makaskift við annað kommunalt lendi, ið íbúðir kunnu byggjast á. Kostnaðurin fyri hetta lendið skal vera tann sami, sum kommunan seldi tað fyri.

Í grundgeving síni fyri umsóknini at býta ognina sundur í eigaraíbúðir skriva umsøkjarnir, at:

"Hetta verður einamest gjørt fyri, at tryggja peningastovninum eitt betur pant og okkum møguleika fyri at sleppa burtur úr verkætlanini uppá sigt."

**Lýsing av málinum**
Í 2018 samtykti Býráðið at frábýta eitt hóskandi øki, 10.550 fermetrar, av matr.nr. 255a, sum skuldi bjóðast út til til bygging og umsiting av leiguíbúðum. Víst verður til útbjóðingarfaldara *»18/01973-21 Útbjóðingartilfar Undir Kongavarða endaligt«*

Eftir at útbjóðingin var av, samtykti býráðið at selja Sp/f NN Holding áleið 10.550 fermetrar fyri ein fermetraprís á 157 kr/fermeturin. Umsitingin og Sp/f NN Holding samráddust um skeytið, víst verður til skeytið *»19/04857-6 Átekning um endaligt skeyti«*

Í 2020 søkti Sp/f NN Holdning um at selja grundstykkið til dóttirfelagið Sp/f MARK kongavarða. Í tilmælinum stóð, at:

- Víðarisølu skeytið skal vísa til verandi tinglýstu servituttir, og skal søluprísurin vera hin sami sum í uppruna skeytinum kr. 1.648.500,00
-

Málið varð samtykt í býráðnum 28. Mai 2020. Víst verður til mál *»20/01496 Umsókn um ognarskifti av matr.nr. 255el, Kirkjubøur/Argir«*

Í 2023 hava eigararnir av matr.nr. 255el, Argir, sent Tórshavnar kommunu umsókn um at strika ásetingina í skeytinum um leiguíbúðir og átalurætt:

<u>Grein 2</u>
....Tað kunnu bert byggjast leiguíbúðir við tilhoyrandi felagshúsi, skúrum v.m. á økinum..

<u>Grein 15</u>

Ásetingar í grein 2,3,6,7,8,9,10,11,12 og 13 verða lýstar servituttbindandi á ognina við átalurætti til Tórshavnar kommunu.

Um sama mundi hevur Umhvørvisstovan sent Tórshavnar kommunu eitt ummælismál viðvíkjandi sundurbýti í eigaraíbúðir á matr.nr. 255el.

Báðar umsóknir verða viðgjørdar undir einum, av tí at søkt verður um somu broytingar í báðum umsóknum.

Tað er tó ein fortreyt fyri yvirhøvur at kunna býta ognina sundur í eigaraíbúðir, at býráðið ikki ger servituttin um, at tað bert kunnu byggjast leiguíbúðir á økinum, galdandi, ella at býráðið tekur undir við at strika servituttin um, at tað bert kunnu byggjast leiguíbúðir á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu (**Nýggjastu broytingar í almennu byggisamtyktini**)*
Økið liggur í umráðisparti A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har tað m.a. er ásett:

- Umráðisparturin verður lagdur til blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
    - Miðstaðarbygging má einans vera hús sum verða innrættaði til handlar, skrivstovur, stovnar, gistingarhús, matstovur, mentanarligir stovnar og tilíkt
- Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

*Eigaraíbúðarlógin*
§ 10 Undir løgtingslóg koma bert íbúðir í bygningum, sum <u>eru ætlaðir at leggja sundur í eigaraíbúðir.</u>

Stk. 2 Øll sundurbýtismál skulu sendast avvarðandi kommunu til ummælis. Kommunan skal greitt tilskila, um eitt møguligt sundurbýti ikki er í samsvari við:
1) Lóggávuna um byggiviðurskifti og brunaviðurskifti,
2) Eina góðkenda byggisamtykt ella býarskipan ella
3) Lóggávu annars.
Stk. 3. Verður tað í ummælinum frá kommununi eftir stk. 2 ella á annan hátt upplýst, at tað við sundurbýtinum koma fram viðurskifti, sum ikki samsvara við reglurnar í teimum í stk.2, nr. 1-3 nevndu viðurskiftinum, verður sundurbýtið ikki góðkent uttan so, at avvarðandi myndugleiki hevur givið undantaksloyvi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Økið undir Kongavarða varð boðið út sum økið til bygging og umsiting av leiguíbúðum. Fortreytirnar fyri útbjóðingina verða tí broyttar, um loyvi verður givið at sundurbýta ognina í eigaraíbúðir.

Endamálið við upprunaligu útbjóðingini var at økja um talið á leigubústøðum í kommununi, og lendið varð selt fyri sama kostnað, sum kommunan áður hevur selt lendið til Bústaðir fyri, ið er nýtt til at byggja leigubústaðir á.

Skuldi lendið verið selt til eigaraíbúðarbygging, hevði kostnaðurin verið munandi hægri enn tær 157 kr., sum kommunan seldi lendið fyri.

Við at loyva sundurbýti í eigaraíbúðir, er vandi fyri, at talið á leigubústøðum minkar, og er hetta ikki í samsvari við bústaðarpolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

Mett verður harumframt ikki, at tað er ein kommunal uppgáva, at tryggja peningastovninum eitt betri pant fyri sínum lánum, og tískil verður ikki mett, at kommunan kann taka hetta atlit við í sína meting, tá ið avgerð skal takast um at lova eigarunum at býta ognina sundur í eigaraíbúðir.

<u>Byggimálið</u>

Endalig byggiváttan er ikki givin til íbúðarverkætlanina undir Kongavarða. Víst verður til mál *»19/04961 MARK – Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr.nr. 255el, Undir Kongavarða, Argir«*
Sambært grein 8 í skeytinum skal ein skrivlig byggiváttan verða givin áðrenn bygningarnir kunnu seljast víðari;
*Ognin kann ikki uttan góðkenning frá Tórshavnar kommunu verða seld víðari, uttan sum lidnir bygningar, sum byggivaldið frammanundan hevur givið skrivliga byggiváttan til.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/01973 Íbúðarbygging undir Kongavarða(matr.nr.255a ) – makaskifti

19/04961 MARK – Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr.nr. 255el, Undir Kongavarða, Argir

19/04857 Átekning á endaligt skeyti til Sp/f NN Holdning á matr.nr. 255el, Argir

20/01496 Umsókn um ognarskifti av matr.nr. 255el, Kirkjubøur/Argir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
18/01973-21 Útbjóðingartilfar Undir Kongavarða endaligt
19/04857-6 Átekning um endaligt skeyti

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, deildarleiðarin á byggimálsdeildini og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla frá at strika servituttin um, at tað bert kunnu byggjast leiguíbúðir á økinum og at loyva eigarunum at býta ognina sundur í eigaraíbúðir.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Málið útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at viðmæla sundurbýti, treytað av at semja fæst við umsøkjaran um, at kommunan keypir part av lendinum aftur fyri sama prís, sum umsøkjarin hevur latið fyri lendið, og at hetta annars verður til fulla og endaliga avgreiðslu av øllum millumverandi viðurskiftum í sambandi við byggingina undir Kongavarða, og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at fíggja afturkeypið av lendinum av konto 6175, keyp og søla, og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

## 286/23 Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 4

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 189/23 | 23/05733-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 305/23 | 23/05733-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 286/23 | 23/05733-2 |

**Upprunin til málið**
Heildarætlan er gjørd fyri part av matr.nr. 256, Kirkjubøur oman fyri Argjahamar.

26. januar 2023 samtykti býráðið í mál nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging*, at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging. Lendini, sum eri boðin út, eru

1. Øki 3 til bygging av raðhúsum og/ella íbúðum, sí øki 3 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2. Eitt tilboð er innkomið.
2. Øki 4 til bygging av vinnubygningi við íbúðum á ovaru hæddunum og felags parkering, sí øki 4 á eystaru síðu av linju 2. Eitt tilboð er innkomið.
3. Øki 5.1 til bygging av raðhúsum, sí øki 5.1 á tekning, bygging á eystaru síðu av linju 2 – freist at lata tilboð inn er ikki farin enn.
4. Øki 5.2 til bygging av raðhúsum, sí øki 5.2 á tekning, bygging á eystaru síðu av linju 2 – freist at lata tilboð inn er ikki farin enn.
5. Øki 6.1 til bygging av íbúðarhúsum, sí øki 6.1 á tekning – bygging á vestaru síðu av linju 2 – freist at lata tilboð inn er ikki farin enn.
6. Øki 1 bleiv luta út til sethúsagrundstykkir, sí øki 1 á tekning – bygging eystaru síðu av linju 1.

Næsta stig er at fáa avtalu í lag við almannaverkið um at byggja almennan bústovn á øki 4.1 og við almenna bústaðarfelagið, Bústaðir, um at byggja leiguíbúðir á øki 5.0.

**Lýsing av málinum**
29. juni 2023 beyð Tórshavnar kommuna øki 4 út til bygging av bygningi við vinnuhølum í niðastu hæddum og íbúðum í ovaru hæddum. Tá freistin at lata tilboð inn tann 25. september 2023, kl. 12, var farin, var eitt tilboð innkomið.

Tilboðið er frá P/F Miðlon sum byggiharra og keypara, og við Kontrast, sum heildarrágeva. Sambært útbjóðingartilfarinum verður økið selt fyri ásettan, fastan, mettan prís áljóðandi;

**Kr. 6.037.200.**

Umframt hetta var í útbjóðingartilfarinum sett treyt til, at tilboðsgevi lat inn:
- váttan frá peningastovni um tøka fígging til keyp av lendi
- tekningar og frágreiðingar av verkætlanini
- frágreiðing um toymi

Treytir eru eisini settar til fríøki, byggisnið og teknisk viðurskifti.
Tilboðið, sum bleiv latið inn, uppfyllir ikki øll krøvini í útbjóðingartilfarinum. Heldur enn váttan frá peningastovni verður kunnað í tilboðnum, at fígging frá peningastovni er eingin trupulleiki hjá samtakinum og verður útflýggjað, tá samtakið er til gjøgnumgongd við kommununa. Um neyðugt, er kommunan vælkomin til at seta seg í samband við keypara, um fleiri ella nágreiniligari upplýsingar.

**Innlatna uppskotið**
Tilboðsgevi kallar uppskotið fyri ‘Bónus og íbúðir á Hamrinum’.

Á trimum teimum ovastu hæddunum verða 39 leiguíbúðir deildar millum hæddirnar. Talan er um ein bygning, har byggilistarliga hugskotið tekur støði í einari bygging við terassum, grønum tekjum og forskjótingum. Ætlanin er, at íbúðarhúsini skulu hava flagtekju.

Íbúðirnar verða í trimum støddum ávikavist 65 $m^2$, 80 $m^2$ og 95 $m^2$ til støddar. Bygningurin er býttur sundur í smærri eindir, við trapperaðum skapi. Á niðastu hædd verður vinnuligt virksemi: ein Bónus handil saman við einari lítlari Mylnu við bakstri og ein Sunset Boulevard, ‘grab and go’.

Frí- og uppihaldsøki eru á einkultu altanunum og á terrasseraðu hásløttunum á eystursíðuni á bygninginum. Íbúðirnar hava allar hvør sína altan á landnyrðings- og útsýnissíðuni. Umframt lendið millum bygning og parkering í erva, er lendið við báðar endarnar á bygninginum lagt út til felagsøkir. Túnagøta verður vestanfyri í sambandi við atkomu til íbúðir. Túnagøtan verður eftir einum grønum geira millum íbúðarbyggingina og parkeringsplássini fram við vegnum. Innkoyring til nýggja vinnuliga virksemi (Bónus handilin, Mylnu úrval og Sunset Boulevard) verður frá ’Nýggja Glyvursvegi’, meðan íbúðirnar hava atgongd og p-pláss frá vegnum omanfyri – kallað linja 2. Omanfyri bygningin eru 39 parkeringspláss til íbúgvarnar, íroknað 1 rørslutarnað pláss. Niðanfyri eru 52 parkeringspláss, íroknað 3 rørslutarnað p-pláss

Ruskið verður skipað á felags ruskstøð fyri íbúðarbyggingina, meðan rusk frá Bónus, Sunset Boulevard og Mylnu verður skipað internt í samband við vørumóttøku og goymslu í niðastu hæddini.

Uppskotið hevur 4 hæddir. “Undir jørð” eru 1 hædd vinna og 1 hædd íbúðir, og “yvir jørð” eru 2 hæddir íbúðir.

Í uppskotinum kemur ein gong, sum tykist myrk og óunnilig framvið hesum íbúðunum, sum eru undir jørð, men tað er møguligt, at man kann arbeiða við lendinum, so tað onkursvegna gerst ljósari og unniligari, um hetta er ynskið. Køkur/stova í íbúðunum tykjast ættiliga djúp og myrk, og ivasamt er, um tað livir upp til 10% vindeygaareal av gólvvíddini. Hetta verður tikið upp við ráðgeva, um avgerð verður tikin um at fara viðari við uppskotinum.

Í tilvísingunum í útbjóðingartilfarinum s. 6 verður víst til eina bygging við mønutekju, og skrivað er, at byggingin ikki skal hava flata tekju. Í innlatna uppskoti er eitt sindur av kippi á, men tað er ikki nógv. Annars uppfyllir uppskotið krøvini um parkering, bæði til vinnuvirksemi og til íbúðirnar, umframt ásettu krøvini um byggistig og nýtslustig. Málið við útstykkingini oman fyri Argjahamar er, at tað verður ein fjølbroyttur býlingur, við ymiskum búháttum. Hesum stuðlar innlatna uppskotið undir, tí íbúðirnar verða til leigu og í trimum ymsum støddum.

Umsitingin hevur verið á fundi við ráðgevan og viðgjørt styrkir og veikleikar í uppskotinum. Semja var um at halda fast í yvirskipaðu meginreglunum í uppskotinum við trimum støddum av íbúðum og við vinnu-/miðstaðarvirksemi í gøtuhædd. Sum nú er, gongur sama skapið aftur á øllum húsavegginum. Avtalað varð, at ráðgevi kannar, um bygningurin ber seg við saðiltekju, og um trapperingin á bygninginum kann brótast meiri upp, soleiðis at húsaveggurin gerst meiri fjølbroyttur og minni rytmiskur ella meiri róligur.

Somuleiðis varð avtalað, at ráðgevi setir seg í samband við verandi arbeiðstakara á økinum, um eina møguliga avtalu um at sleppa í holt við arbeiðið, samstundis sum verandi arbeiðstakari er á staðnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr.nr 256 liggur í umráðisparti A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava Handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Arbeiðið við at gera serstøku byggisamtyktina er ígongd.

Ásetingarnar fyr i øki eru soljóðandi:
Byggistig á í mesta lagi 0,25
Nýtslustig á í mesta lagi 07

Endaliga skipanin av økinum verður samskipað við Býarskipanardeildina, soleiðis at endaliga serstaka byggisamtyktin samsvarar ætlaðu bygging.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
**Skjøl**
23/05733-3 Útbjóðingartilfar øki 4_compressed (1)
23/05733-3 Tilboð Økið 4
23/05733-3 Økiskipan_byggiøki og fríøki_UOA_15juni2023

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | |

| Upphædd |
|---|
| 6.037.200 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 6.037.200 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Hetta málið er partur av útstykkingarverkætlanini oman fyri Argjahamar. Um samráðingarnar koma á mál við tilboðsgeva, so skal sølu-upphæddin flytast á L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- selja og sundirbýta øki 4 til tilboðsgevara, P/F Miðlon
- halda fram við samstarvinum við ráðgevan um víðari arbeiðið av uppskotinum til gerð av serstøku byggisamtyktini
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 287/23 Íverksetan av nýggjum ABF reglum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 181/23 | 23/06143-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.11.2023 | 57/23 | 23/06143-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 308/23 | 23/06143-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 287/23 | 23/06143-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar Kommuna er limur í Byggiharrasamtaki Føroya. Samtakið er eitt áhugafelag, har byggiharrar, ið hava eina virkna og professionella tilgongd til vinnuna, samstarva um felags áhugamál og skipan mótvegis veitarum í byggi- og annleggsvinnuni.

Landsverk hevur formansskapin í samtakinum. Hinir limirnir eru í løtuni: SEV, Bústaðir, P/F Eystur- og Sandoyartunnil, Klaksvíkar-, Eystur-, Runavíkar,- og Fuglafjarðar kommuna.

Í notati frá limafundi hin 18.10.2023 heitir formaðurin á hinar limirnar um undirtøku til at seta í verk dagførdar reglur, sokallaðar “ABF reglur”, í Føroyum.

**Lýsing av málinum**
Í nøkur ár hevur ein arbeiðsbólkur umboðandi Byggiharrasamtakið, Føroya Handverksmeistarafelag og Ráðgevarafelagið, samráðst um eitt dagført samskipað avtalusett, ið skal skipa bygging í Føroyum. Hóast full semja ikki er um allar lutir í avtalusettinum, mælir nevndin í Byggiharrasamtakinum til, at limirnir byrja at brúka avtalusettið í framtíðar verkætlanum.

Avtalusettið fer at fevna um ABF, ABRF, ABTF, ABF forenklet, ABRF forenklet, ABTF forenklet, við tilhoyrandi fylgiskjølum.

Sí fylgiskjøl

**Lógir, ásetingar o.a.**
Galdandi ABF06

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniski stjórin og leiðarin á Bygningsdeildini hava luttikið í arbeiðsbólkinum í samtakinum. Hinir deildarleiðararnir í Teknisku Fyrisiting eru kunnaðir um gongdina í samráðingunum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/06143-2 Undirtøka fyri íverksetan
23/06143-3 ABF18 - Almindelige betingelser for arbejder og leverancer i bygge- og anlægsvirksomhed (ABF 18)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Býráðsfundur<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1203<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**

Tekniski stjóri, leiðarin á Teknisku deild, leiðarin á Býarskipanardeildini, leiðarin á Byggimálsdeildini og leiðarin á Bygningsdeildini, mæla teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini til at heimila teknisku fyrisiting at brúka nýggju ABF reglurnar, sambært áheitanini frá Byggiharrasamtaki Føroya.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 288/23 Umbøn um eykajáttan til konto 7110 Renovatión

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.10.2023 | 46/23 | 23/05757-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 274/23 | 23/05757-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 250/23 | 23/05757-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 288/23 | 23/05757-1 |

**Upprunin til málið**
Tekniski stjórin hevur biðið leiðaran á Brennistøðini gjørt eina neyva meting av, hvørt dagførda játtanin á konto 7110 kemur at halda í ár. Niðurstøðan hjá leiðaranum á Brennistøðini er, at konto 7110 hevur tørv á eykajáttan á 2 mió. kr. fyri at halda játtanina í 2023.

**Lýsing av málinum**
Í 2022 endaði konto 7110, Renovatión við einari alt ov stórari meirnýtslu. Hetta kom óvart á tekniska stjóran, sum ikki varð kunnaður um støðuna í nóg góðari tíð.

Fyri ikki at enda í somu støðu aftur í 2023, hevur m.a. verið roynt at heinta stóran part av meirnýtsluni í 2022 inn aftur yvir raksturin í ár. Játtanin til 7110 er beint undir 20 mió. kr., sum er á leið 7,5 mió. kr. lægri enn árliga miðaljáttanin til konto 7110 hesi seinastu árini.

Tekniski stjórin hevur tí havt eitt vakið eygað við, um Brennistøðin fer at megna at halda nógv skerdu rakstrarjáttanina í ár.

Fyrst í august í ár var fundur við leiðaran á brennistøðini, har hann segði seg vænta, at játtanin fyri 2023 fór at halda, um einki óvæntað hendi restina av árinum. Síðan tá er hann farin at ivast í hesi meting, tí maskinur og amboð eru gingin fyri, og hetta hevur havt stórar umvælingarkostnaðir við sær. Víst verður til fundarfrásøgn frá fundi við leiðaran á brennistøðini 3. august 2023 (jnr. 23/05757-2) og góðkenningarnar av mánaðarroknskapunum síðan tá.

21. september varð leiðarin á Brennistøðini biðin um at gera eina neyva meting av játtanini á 7110 fyri restina av 2023. Nú metir leiðarin á Brennistøðini, at tað verður neyðugt at biðja um eina eykajáttan á 2 mió. kr. til raksturin á konto 7110 fyri at halda játtanina í 2023, sí teldupost frá leiðaranum á Brennistøðini, dagfestur 21.09.2023 *(jnr. 23/05757-3 Møgulig umbøn um eykajáttan)*.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Løgukarmurin til brennistøðina, høli til skiljing og endurnýtslu LK71007 á deild 7175 verður lækkaður við 2 mió.kr., úr 3,8 mió. kr. niður í 1,8 mió. kr.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/05757-2 Fundarfrásøgn frá fundi við leiðaran á Brennistøðin, 3. august 2023

| | Býráðsfundur<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1205 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

23/05757-3 Møgulig umbøn um eykajáttan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 7175 | LK71007 | Brennistøðin, høli til skiljing, endurnýtsla | 7110 | | Renovatión | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri mælir til
- at eykajáttan á 2 mió. kr. til konto 7110 verður fíggjað av løgukarmi LK71007.
- og at beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 289/23 Umbøn um broyting av byggisamtykt matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 185/23 | 23/00472-4 |
| 2 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 289/23 | 23/00472-4 |

**Upprunin til málið**
Festari á matr. nr. 2a, Velbastaður, ynskir at ogna sær lendið undir fjósinum, sum stendur á ognini, og í tí sambandi at broyta byggisamtyktina fyri økið til sethúsaøki.

**Lýsing av málinum**
Parturin av matr. nr. 2a, Velbastaður, sum fjósið stendur á, liggur sum J-øki, ætlað bóndahúsum. Økið liggur millum tvey B-sethúsaøki, og tí verður tað mett hóskandi at broyta økið til B-sethúsaøki. Byggingin hevur eina grundvídd, ið er uml. 160 m$^2$, mátað á korti, og um byggingin skal samsvara við ásetingarnar um byggi- og nýtslustig, er tørvur á einum grundstykki, ið er uml. 550 m$^2$ til víddar.

Onnur viðurskifti viðv. byggingini skulu somuleiðis samsvara við krøvini til sethús og sethúsaøki, og skal umsøkjari søkja byggimálsdeildina um hetta.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B: Sethúsaøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m$^2$, tó í minsta lagi 320 m$^2$ fyri sethús (einhúskishús) og 260 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.
- Nettonýtingarsstigið má ikki fara upp um 0,3 fyri einhúskishús og 0,4 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús.

Ásetingar fyri J: Bóndahús í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi.
- Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B.
- Útstykking má ikki fara fram.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í fyrsta umfari varð søkt um at broyta byggisamtyktina, so fjósið kundi nýtast til virkishús til m.a. upptak av slakti, matskúla fyri børn og ung, verkstovu, skeiðsvirksemi v.m. Síðani hevur umsøkjari broytt umsóknina, og søkir nú um at broyta byggisamtyktina til sethúsaøki.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Ólóligt byggivirksemi á matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastaður,* journal nr. 22/03867.

- *Áheitan á Tórshavnar kommunu at ummæla sølu av lendi sum hoyrr til fjósið á matr. nr. 2a, norðuri á Heyggi 24, Velbastaður,* journal nr. 23/00551.

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Skjøl

- *Matr. nr. 2a – áðrenn broyting,* journal nr. 23/00472-6.
- *Matr. nr. 2a – eftir broyting,* journal nr. 23/00472-6.

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 2a, Velbastaður, sambært kortskjalinum *matr. nr. 2a – eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 290/23 Broyting av ásetingum fyri B4 øki í almennu byggisamtyktini. Minst loyvda grundstykkjavídd.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2023 | 186/23 | 23/04693-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 290/23 | 23/04693-1 |

**Upprunin til málið**
Ynski er um at geva smærri fyritøkum/einstaklingavirkjum, ið einans hava tørv á lítlum hølum til goymslu/fyrisiting, pláss í vinnuøkjum.

**Lýsing av málinum**
Vinnuøkini í kommununi hava ásetingar fyri, hvør minsta víddin á grundøkjunum skal vera. Hesar víddirnar eru frá 800 $m^2$ til 2000 $m^2$. At ogna sær tílík grundøki krevur, at virksemið hjá keyparanum hevur eina ávísa stødd, og er t.d. ikki so væl egna til smáar einstaklingafyritøkur. Tí endar tílíkt virksemi ofta heldur óskipað runt í garasjum ymsastaðni, í bústaðarøkjum og aðrastaðni, har tílíkt virksemi annars ikki er ætlað.

Ynskið er tískil at skapa rúm fyri hesum undir skipaðum viðurskiftum í vinnuøkjum, og um hetta skal vera gjørligt, er neyðugt at fáa áseting um hetta í almennu byggisamtyktini.

Mælt verður til at gera nýtt vinnuøki, B7, ið skal loyva tílíkum smærri vinnuvirksemi. Vinnuøkið skal rúma virksemi í umhvørvisflokki 2-4, ið er virksemi sum t.d. elektronikverkstaðir, handverkaravirkir og onnur minni tænastuvirkir.

Mælt verður til, at ásetingarnar fyri nýggja B7-vinnuøkið verða soljóðandi:

1. Umráðisparturin verður lagdur til smærri vinnuvirki.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 200 $m^2$ og í mesta lagi 500 $m^2$.
4. Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 1,0.
7. Hús skulu ikki verða hægri enn 9 m.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna uppskotið um broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, soleiðis at nýtt B7 vinnuøki við ásetingum, sum nevndar omanfyri, verður lagt afturat almennu byggisamtyktini, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 291/23 Servituttir á matr.nr. 1214g, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 314/23 | 23/04493-5 |
| 2 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 291/23 | 23/04493-5 |

**Upprunin til málið.** Fyrispurningur frá eigara.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 1214g, Kerjagøta 5, Tórshavn. Vídd 561$m^2$. Stykkið er óútgrivið.

Kommunan fór í 2017 undir útstykking av 4 fýra grundstykkjum á Kerjagøtu.

Tá ið útstykkingin var liðug við vegi, gongubreyt, lyktapelum og tekniskum innleggingum, vórðu stykkini lýst til sølu til hægstbjóðandi hjá ognarmeklara.

Grundstykkið matr.nr. 1214g, varð selt fyri kr. 1.150.000,00 Skeytið tinglýst 23.03.2020.

Vísandi til at talan var um eitt grundstykki sum varð selt í fríðari sølu, var vanligi kommunali servitutturin um, at keyparin ikki hevur loyvið til at selja stykkið víðari, fyrr enn egin sethús til privatan bústað eru bygd á stykkinum, og at keyparin hevur búð í privatu húsinum í 3 ár, ikki tinglýstur á stykkinum.

Kommunan tinglýsti ein servitutt um 3 ára byggifreist á stykkið, og at kommunan tilskilar sær rætt til at krevja stykkið aftur fyri kr. 1.150.000,00, um tað ikki verður bygt á stykkið, innan nevndu freist.

Í 2022 seldu táverandi eigarar stykkið í fríðari sølu til núverandi eigarar fyri kr. 1.800.000,-

Søluskeytið vísti til tinglýstar servituttir, herundir servituttin um byggifreist, og at kommunan kann krevja stykkið aftur fyri kr. 1.150.000,00 um tað ikki verður bygt á stykkinum innan 3 ár.

Um kommunan ger servituttin galdandi og krevur stykkið aftur, verður avleiðingin fyri eigararnar, at tey fáa eitt hall á kr. 650.000,- umframt rentuútreiðslur og útreiðslur sum tey hava havt av at fyrireika bygging, herundir húsatekningar.

Eigarar hava fingið byggiloyvi, men hava avgjørt at selja stykkið aftur, vísandi til broyttar umstøður, við hækkandi rentum og inflatión, og meta tey at tað verður ikki fíggjarliga forsvarligt hjá teimum at byggja hús fyrr enn um nøkur ár.

Grundstykkið stendur til sølu hjá ognarmeklara, men er trupult at selja stykkið fyri áleið sama prís sum tey keyptu stykkið fyri, og meta tey at galdandi servituttur er ein forðing fyri sølu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Servituttur um byggifreist.
2 ára freist til at byrja bygging og 3 ára freist til at húsini skulu vera liðugt bygd.
Kommunan kann krevja stykkið aftur fyri kr. 1.150.000,- um byggireistin ikki verður hildin.

Skeytið er tinglýst 16.03.2020. Tað vil siga at keyparar skulu verða byrjaðir bygging innan 16.03.2022, og skulu húsini verða liðugt bygd innan 16.03.2023.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1211 |
| | Formansins merki: |

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til at grundstykkið upprunaliga er selt í fríðari sølu, mæla kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at strika servituttin um byggifreist sí § 4, í uppruna tinglýsta skeytinum frá 23.03.2020.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

# 292/23 Matr.nr. 91ab, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 313/23 | 23/04832-7 |
| 2 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 292/23 | 23/04832-7 |

**Upprunin til málið.** Óbygt grundstykkið. Byggifreistin er farin, og er eigari sinnaður til at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 91ab, Kollafjørður. ( Í útstykking á Hamrabøi )
Vídd 523m². Grundstykkið er ógrivið.
Søluprísur 245.815,23
Skeytið er tinglýst 13.12.2018.

Sambært grein 5 í skeytinum, skal byggingin verða byrjað innan 2 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagi 3 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Annars tilskilar kommunan sær rætt til at krevja stykkið aftur móti, at keyparin fær keypspeningin og tað hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar. Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin.
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal,tinglýst skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1213<br><br>Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | keyp og søla. |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 245.816,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan søluprís kr. 245.816,00 at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

## 293/23 Eykajáttan 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.11.2023 | 322/23 | 23/06764-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 293/23 | 23/06764-1 |

**Upprunin til málið**
Inntøkurnar í árinum hava verið hægri enn mett, og gevur hettar møguleika fyri at hækka inntøkur og útreiðslur í inniverandi árið.

Eykajáttan krevst, tá ið ein samtykt fíggjarætlan verður broytt, tað verið seg hækking ella lækking av inntøkum og/ella útreiðslum. Uppskot til fígging skal fylgja við eini eykajáttan. Eykajáttanir skulu vera samtyktar í býráðnum við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

**Lýsing av málinum**
Mettar meirinntøkur í árinum eru 43,8 mió. Orsaka av rentugongdini eru útreiðslur til stuðul til rentuútreiðslur uml. 10 mió. kr. hægri enn mett. Samtykt er at játta 5,3 mió. kr av meirinntøkum til kavarudding (mál nr. 22/04631). Tá hædd er tikið fyri stuðul til rentu útreiðslur og játtanini til kavarudding er avlop av meirinntøkum 27 mió. kr.

Meirnýtsla hevur verið á einstøkum rakstrarstøðum, sum ikki hava fingið neyðuga játtan. Mælt verður til, at játta pening til til hesi rakstrarstøð:

| §6 | | Eykajáttan |
|---|---|---|
| 8110 | Vegir | 2.000.000 |
| 6710 | Vatnveiting | 2.000.000 |
| 6510 | Kirkjugarðar | 3.500.000 |
| | | **7.500.000** |

| §3 | | |
|---|---|---|
| 3212 | Tímar vegna serligan tørv | 5.000.000 |

| §20 | | |
|---|---|---|
| 20910 | Aðrar útreiðslur | 1.000.000 |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | **Býráðsfundur**<br>23. november 2023 | Blað nr.: 1215 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Skjøl**

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

### Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | | **Navn** | **Deild** | | **Navn** | | **Upphædd** |
| | | Meirinntøkum 2023 | 8110 | | Vegir | | 2.000.000 |
| | | Meirinntøkum 2023 | 6710 | | Vatnveiting | | 2.000.000 |
| | | Meirinntøkum 2023 | 6510 | | Kirkjugarðar | | 3.500.000 |
| | | Meirinntøkum 2023 | 3212 | | Tímar vegna serligan tørv | | 5.000.000 |
| | | Meirinntøkum 2023 | 20910 | | Aðrar útreiðslur | | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 13.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at játta pening til omanfyristandandi rakstrarstøð.

**Fíggjarnevndin 22. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Borgarstjórin legði vegna umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum fram broytingaruppskot við tilmælið um at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at

- kr. 2.000.000 verða játtaðar til kontu 3175 Barnaansing LK31014 Frítíðarskúli við Botnánna í Kollafirði

- kr. 1.000.000 til kontu 5775 Ítróttaanlegg LK57042 Frælsur ítróttur

Annika Olsen legði vegna Tjóðveldi fram broytingaruppskot við tilmæli um at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini við teirri broyting, at 10 mió. kr. verða játtaðar til Frítíðarskúlan við Botnánna í Kollafirði og 3,5 mió. kr. til orkumál.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið frá Tjóðveldi, ið fall við seks atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Bogi Andreaen og Súsanna Olsen.

Ímóti: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá borgarstjóranum, ið varð einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 294/23 Fíggjarætlan 2024, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2023 | 259/23 | 23/05027-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 223/23 | 23/05027-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 178/23 | 23/05027-2 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 05.10.2023 | 50/23 | 23/05027-2 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 17.10.2023 | 24/23 | 23/05027-2 |
| 6 Havnanevndin | 03.10.2023 | 35/23 | 23/05027-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 286/23 | 23/05027-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.10.2023 | 160/23 | 23/05027-2 |
| 9 Tekniska nevnd | 16.10.2023 | 50/23 | 23/05027-2 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.10.2023 | 49/23 | 23/05027-2 |
| 11 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 261/23 | 23/05027-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 22.11.2023 | 323/23 | 23/05027-2 |
| 13 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 294/23 | 23/05027-2 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 26. oktober og aðru viðgerð 23. november.

**Lýsing av málinum**
**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2024**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2024 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 9.000 kr.
Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu bert hækka, um talan er um:
- lógarkrøv
- býráðssamtyktir íroknað virksemisbroytingar sum fylgja av nýggjum íløgum
- sáttmálabroytingar og líknandi.

Mælt verður til eitt rakstrarútreiðsluhámark, so at rakstrarútreiðslurnar ikki økjast meira enn inntøkurnar. Hettar merkir nøkur átøk fyri at betra um úrslitið.

Í talvuni niðan fyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | | Rokskapur | Ætlan | Ætlan | Broyting 2023/2024 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.000 kr.** | | **2022** | **2023** | **2024** | **pct.** | **kr.** |
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 949.946 | 951.000 | 1.003.305 | 5,5% | *52.305* |
| 20601 | Felagsskattur | 68.221 | 60.000 | 60.000 | 0,0% | *0* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 740 | 1.000 | 1.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 182.831 | 191.862 | 209.773 | 9,3% | *17.911* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.659 | 36.421 | 35.954 | -1,3% | *-467* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.237.398** | **1.240.283** | **1.310.032** | **5,6%** | ***69.749*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 99.884 | 100.179 | 105.461 | 5,3% | *5.282* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 298.882 | 313.190 | 325.337 | 3,9% | *12.147* |
| §3 | Børn og ung | 224.266 | 225.921 | 238.923 | 5,8% | *13.001* |
| §4 | Undirvísing | 47.450 | 51.617 | 56.414 | 9,3% | *4.797* |
| §5 | Mentan og frítíð | 65.195 | 64.636 | 71.124 | 10,0% | *6.488* |
| §6 | Teknisk mál | 157.998 | 152.110 | 159.134 | 4,6% | *7.024* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 88.240 | 85.699 | 92.172 | 7,6% | *6.473* |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **981.916** | **993.353** | **1.048.564** | **5,6%** | ***55.212*** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -40.070 | -35.939 | -10,3% | *4.131* |
| | **Rakstur íalt** | **940.214** | **953.283** | **1.012.625** | **6,23%** | ***59.343*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 19.926 | 18.000 | 30.000 | 66,7% | *12.000* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.107 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **22.033** | **20.000** | **32.000** | **60,0%** | ***12.000*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **275.151** | **267.001** | **265.407** | **-0,6%** | ***-1.594*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 5.183 | 651 | 10.378 | 1494,2% | *9.727* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 4.482 | 5.043 | 12,5% | *561* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -3.682 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | -500 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **8.865** | **5.633** | **15.421** | **173,8%** | ***9.788*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **266.286** | **261.368** | **249.986** | **-4,4%** | **-11.382** |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **21.574** | 1648,3% | *20.340* |
| | **Avdráttir TH** | | **15.873** | **15.873** | 0,0% | *0* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **265.052** | **244.261** | **212.539** | **-13,0%** | **-31.722** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **223.350** | **225.046** | **197.516** | **-12,2%** | **-27.530** |
| | | | | | | |

**Búskaparútlit**
Vøkstur er framvegis í føroyska búskapinum. Búskaparráðið hevur nýliga lagt heystfrágreiðingina fram, har ráðið hevur endurskoðað vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni fyri árini 2022 – 2024. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum verður mettur til at verða ávikavist 8,1% í 2022, 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024. Í ársins prísum vaks BTÚ sambært metingum uml. 10% í 2022, og roknar Fíggjarmálaráðið við, at hækkingin er eini 4-5% í 2023 og 2024. Nevnast kann, at arbeiðsloysið hevur verið søguliga lágt, og í juli mánaði í ár var arbeiðsloysið einans 0,7%.

Brúkaraprístalið var rættiliga støðugt í tíðarskeiðnum frá 2009 til 2021, men seinna hálvár 2021 vóru stórar hækkingar í prístalinum, og helt stóri prísvøksturin fram í 2022. Prísirnir vaksa framvegis, men spakuligari, enn teir hava tað seinasta árið. Seinasta meting frá Hagstovuni í 2023, vísur ein vøkstur í

brúkaraprístalinum á 4,4%. Meðan oljuprísirnir høvdu størstu ávirkanina á brúkaraprístalið í 2022, hevur tað síðani verið øktir matvøruprísir og rentuútreiðslur, sum hava gjørt seg galdandi.

Húsarhaldini hava sostatt upplivað stórar prís- og rentuhækkingar, men eru kortini bjartskygd sambært brúkarakanning hjá Hagstovuni. Sama støðan er ikki hjá vinnuni, har treystitalið er lækkað úr 17 í januar 2023 til 6 í juni 2023 og liggur undir langtíðarmiðalið.

**Inntøkurnar**
Inntøkurnar hjá kommununi hava verið á einum jøvnum stigi, og sær inntøkumetingin fyri 2023 út til at halda. Mett verður tó ráðiligt at hava eina varna meting av vøkstrinum í kommunuskatti millum annað við hækkingunum í vøruprísum og rentuni í huga. Av somu orsøk verður eisini felagsskatturin, skatturin frá partafeløgum, mettur til at vera á sama støðið næsta ár.

Størsta inntøkukeldan hjá kommununi er kommunuskatturin. Mett verður at kommunuskatturin hækkar 5,5% sammett við fíggjarætlanina 2023. Inntøkurnar vaksa soleiðis við 52 mió. kr. frá 951 mió. kr. til 1.003 mió. kr.

Inntøkurnar av skatti av eftirlønarinngjøldum fyri 2024 eru mettar til 210 mió. kr, sum er 18 mió. kr. ella 9,3% hægri enn metta talið fyri 2023.

Inntøkan frá felagsskattinum er fyri 2024 mett at verða 60 mió. kr, ið er á sama støði, sum metingin fyri 2023. Felagsskatturin kann vera torførur at meta um, staðfesti felagsskatturin fyri 2022 var 68 mió. kr.

Samlaðu inntøkurnar í fíggjarætlanini fyri 2024 vaksa 69,7 mió. kr. ella 5,6% upp í 1.310 mió. kr. í mun til metingina fyri 2023 upp á 1.240 mió. kr.

**Rakstrarútreiðslurnar**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn í stórum vøkstri.

Fólkatalið í Føroyum veksur støðugt. Størsti vøkstur í tali er í Tórshavnar kommunu. Nú búgva yvir 23.300 fólk í kommununi svarandi til 43% av samlaða fólkatalinum í landinum.

Talið av borgarum í kommununi vaks frá august 2022 til august 2023 við 1,3% ella 303 borgarum úr 23.013 upp í 23.315. Vøksturin er nakað lægri enn í fjør. Fólkatalið í øllum landinum vaks sama tíðarskeið 1,2%.

Stóri fólkavøksturin seinastu árini hevur ført við sær eina munandi øking í virkseminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum. Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting hevur við sær, at neyðugt er at taka hædd fyri hesum í framskrivingunum av ávísum játtanum, um verandi virksemi skal varðveitast.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2024 netto 55 mió. kr. upp í 1.049 mió.kr úr 993 mió. kr. Hetta er ein vøkstur upp á 5,6%, fyri Tórshavnar kommunu í mun til fíggjarætlanina fyri 2023. Við Tórshavnar havn, sum er inntøkufíggjað er vøksturin 6,2%

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðinum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 60% og 74% av nettokostnaðinum. Framskrivað er fyri kendar lønarhækkingar í 2024. Lønarhækkanin er mett til 3,8% í 2023 og 4,1% í 2024. Óvissa er um fíggjarætlanina 2024 í sambandi við lønarútreiðslurnar, í hesum uppskotinum er hædd ikki tikið fyri einum lønarlyfti og styttari arbeiðsviku.

Til komandi ár eru lønirnar mettar at vaksa 32,8 mió. kr. ella 4,6% í mun til fíggjarætlan fyri 2023. Av vøkstrinum fyri 2024 eru 21 mió. kr. lønarhækkingar í sambandi við sáttmálar.

**Prísvøkstur**
Meginreglan er, at prísvøkstur ikki er framskrivaður, men hetta er tó gjørt fyri ávísar játtanir. Fyri dagstovnaøkið er tikið hædd fyri einum prístalsvøkstri á 4%.

Ein partur av inntøkunum hjá kommununi koma frá brúkaragjøldum. Gjøldini fyri barnaansingina verða dagførd árliga í sambandi við fíggjarætlanina. Gjøld á eldraøkinum eru dagførd sambært uppskotinum hjá kommunufelagnum. Í uppskotinum eru flest onnur gjøld prístalsjavnaði við 4,4%

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**
**Á §1 Kommunal fyrisiting økjast nettoútreiðslurnar 5,3% ella 5,2 mió.**
Størsti parturin av vøkstrinum er orsakað av lønarhækkanum og prístalsjavningar í sáttmálum og lisensum. Kommunuval verður í 2024 og eru 1,2 mió. kr. settar av til endamálið.

**Nettoútreiðslurnar á §2 Almanna- og heilsumál økjast við 3,93% ella 12,1 mió. kr.**
Játtanin til hvíldarheimið Naina lækkar við 397 t.kr. Játtanin tekur støðið í verandi útreiðslu.

Játtanin til kommunulæknatænastur hækkar við 880 t.kr. Talan er í høvuðsheitum um øktar leigukostnaðir og setan av einum kommunulækna afturat.

Integratión hækkar við 700 t.kr. játtanin er til flóttafólkasamskipara og tulk umframt rakstur.

Á sosiala økinum er ein framroknað nýtsla samsvarandi mettari nýtslu í inniverandi ári. Harumframt er ein játtan á 500 t.kr. til fyribyrgingarverkaætlan sum byrjaði á vári 2023 og endar einast í 2024. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar á sosiala økinum økjast við 2,5 mió. kr.

Eldraøkið stendur fyri eini hækking í játtanini á 7,3 mió. kr. netto. Gjøld fyri búpláss, heimahjálp og umlætting eru dagførd sambært uppskotinum frá Kommunufelagnum um felags leist fyri áseting av gjøldum fyri árini 2023, 2024 og 2025.

**Nettoútreiðslurnar á §3 Børn og ung fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 5,8% ella 13,0 mió. kr.**
Játtanin til børn við serligum tørvi er økt við 2. mió. kr.
Foreldragjaldið er óbroytt 27%. Útreiðslurnar til systkinaavsláttur hækka 500 t.kr. ella 3,1% mett út frá útreiðslum í 2023.

**Á §4 Undirvísing økjast nettoútreiðslurnar 9,3% ella 4,8 mió. kr.**
Játtanin fylgir metta næmingatalinum og er mett út frá framskrivingum. Eisini er peningur settur av til Skúlanet.

**Nettoútreiðslurnar á §5 Mentan og frítíð økjast við 10,0% ella 6,5 mió. kr.**
Hædd er tikin fyri øktum virksemi og hægri stuðulsjáttan. Stuðul til ítrótt og stuðul annars hækkar við tilsamans 2,35 mió. kr.

Langhylurin verður væntandi tikin í nýtslu í 2024, lagt er upp fyri hesum í rakstrinum. Játtanin til svimjihøllina hækkar í hesum sambandi við 1,9 mió. kr. Eisini hækkar játtanin til ítróttarannlegg við 1 mió. kr.

**Nettoútreiðslurnar á §6 Teknisk mál økjast við 4,6% ella 7,0 mió. kr.**
Størsta játtanin á tekniska økinum er til umsiting og røkt av bygningum. Játtanin økist við 3 mió. kr. svarandi til 5,1% frá 60,5 mió. kr til 63,6 mió. kr.
Í uppskotinum er harumframt sett meira peningur av til Umhvørvistiltøk 905 t.kr. Vatnveiting 822 t.kr. og gøtuljós 720 t.kr.
9,5 mió. kr. eru settar av til vegir, hetta er ein øking á 1,3 mió. kr. Kontan kavarudding er dagførd soleiðis, at játtanin svarar til nýtsluna, játtanin økist við 1,3 mió. kr.

**Á § 7 Kommunal virki, frároknað Tórshavnar havn økjast nettoútreiðslurnar 7,63% ella 6,5 mió. kr.**
Renovatiónin hevur ein lítlan vøkstur í netto játtanini 1,7% ella 471 t.kr. Orsøkin er, at brúkargjøldini eru prístalsjavnaði í framskrivingini. Nettojáttanin til Sløkkiliðsstøðina økist við góðum 800 t.kr.

Bussleiðin hækkar við 1,9 mió. kr. samsvarandi sáttmála.

Samtykt er at veita 1 mió. kr. í stuðli til filmsverkætlanir, og hækkar játtanin til vinnuverkætlanir við hesi upphædd.

Játtanin til ferðavinnuna hækkar við 1,7 mió. kr. harav er 1 mió. kr. til MICE.

**Aðrar útreiðslur**
Stuðul til rentuútreiðslur hækkar úr 18 mió. kr. í 2023 til 30 mió. kr. í 2024. Orsøkin er, at rentan er hækkað seinasta árið og væntandi fer at hækka nakað aftrat í ár.

**Fíggjarstøðan**
Lániskuldin hjá kommununi er í alt 375 mió. kr. Av hesum eru 157 mió. kr. knýttar at Tórshavnar kommunu og 218 mió. kr. at Tórshavnar havn.

Innkomuvegurin verður fíggjaður við lántøku. Í juni tók kommunan eitt lán á 150 mió. kr. og roknað verður við at 130 mió. kr. verða tiknar aftrat í ár.

Rentuútreiðslurnar verða mettar til 15,4 mió. kr. í 2024. Afturgjald av skuld verður mett til 37,4 mió. kr. harav 21,6 mió. kr. í Tórshavnar kommunu og 15,9 mió. kr. í Tórshavnar havn.

Tøkur peningur hjá kommununi var seinast í august 196 mió. kr., 120 mió. kr. hjá Tórshavar kommunu og 76 mió. kr. hjá Tórshavnar havn. Samtykt er eitt minsta gjaldføri á 79 mió. kr. í Tórshavnar kommunu.

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður
úrslit áðrenn rentur 265.4 mió. kr. Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 250 mió. kr.
Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu verður 197,5 mió. kr. Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina. Eitt skattaprosent verður mett til vera áleið. 55 mió.kr.

**Skjøl**
Yvirlit yvir sáttmálabundnar íløgur.
Yvirlit yvir gjøld

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið er**
23/05149 Fíggjarætlan Tórshavnar havn 2024

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri
býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2023:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Framlagt.

**Havnanevndin 03. oktober 2023:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 05. oktober 2023:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. oktober 2023:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 16. oktober 2023:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. oktober 2023:** Framlagt.

**Heilsu- og eldranevndin 17. oktober 2023:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam, taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til 1. viðgerð.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóan Petur Eyðfinnur Johannsen, Birita Baldvinsdótir, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Jón Kragesteen, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Samlaðu inntøkurnar fyri 2024 verða nú mettar til 1.316 mió. kr. sum eru 6,3 mió. kr. hægri enn upprunaliga metingin á 1.310 mió. kr.

Kommunuskatturin verður 1.011 mió. kr., 8,6 mió. kr. hægri enn upprunaliga mett.

Nýggjastu metingarnar frá Fíggjarmálaráðnum vísa, at eftirlønarskatturin verður tann sami sum í uppskotinum í september kr. 209,8 mió. kr. og at DIS/FAS/frádráttir verður eitt lítið vet lægri, 35,7 mió. kr. í mun til 36,0 mió. kr.

Partafelagsskatturin lækkar við 2. mió til 58 mió. kr. ið er sama lækkingin sum landið hevur í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2024.

Roknað er við einari lántøku í 2024 á 221 mió. kr. Samlaðu rentuútreiðslurnar verða mettar til 18,2 mió. kr., harav 13,2 mió. kr. eru til TK og 5,0 mió kr. til TH.
Útreiðslur til avdráttir verða 38,9 mió. kr. Av hesum hoyra 23 mió. kr. til TK og 15,9 mió. kr. til TH.

Næmingatalið á skúlaøkinum er dagført og gevur hetta eina samlaða meirútreiðslu á 123 t. kr.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til niðanfyristandandi broytingar av fíggjarætlanini:

| Deild | Navn | Uppskot áðrenn | Uppskot aftaná | Broyting upphædd |
|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur og rentur:** | | | |
| 20501 | Persónsskattur | 1.003.305 | 1.011.886 | 8.581 |
| 20601 | Felagsskattur | 60.000 | 58.000 | -2.000 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 209.773 | 209.753 | -20 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.954 | 35.704 | -250 |
| | | | | |
| | **Hækking í inntøkum** | | | **6.311** |
| | | | | |
| | **Rakstur:** | | | |
| 4115 | Kollafjarðar skúli | 3.408 | 3.403 | -5 |
| 4117 | Skúlin á Fløtum | 14.793 | 15.100 | 307 |
| 4118 | Eysturskúlin | 7.028 | 7.033 | 5 |
| 4119 | Sankta frans Skúli | 6.630 | 6.460 | -170 |
| 4120 | Hoyvíkar skúli | 4.304 | 4.365 | 61 |
| 4121 | Skúlin á Argjahamri | 5.165 | 5.190 | 25 |
| | | | | |
| 4144 | Skúlabarnaflutningur | 213 | 113 | -100 |
| | | | | |
| | **Rentur og avdráttir:** | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur | 10.378 | 13.217 | 2.839 |
| | Avdráttir | 21.574 | 23.033 | 1.459 |
| | | | | |
| | | | | |
| | **íalt** | | | **4.421** |
| | | | | |
| | **Samlað broyting í rakstri, íroknað inntøkur** | | | **1.890** |

**Fíggjarnevndin 22. november 2023:** Borgarstjórin legði fram soljóðandi broytingaruppskot av fíggjarætlanini viðvíkjandi ávikavist rakstri og íløgu:

**Uppskot til broytingar FÆ2024, rakstur:**

| Deild | Navn | Uppskot áðrenn | Uppskot aftaná | Broyting upphædd |
|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur og rentur:** | | | |
| 20501 | Persónsskattur | 1.003.305 | 1.011.886 | 8.581 |
| 20601 | Felagsskattur | 60.000 | 58.000 | -2.000 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 209.773 | 209.753 | -20 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.954 | 35.704 | -250 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Hækking í inntøkum** | **1.309.032** | **1.315.343** | **6.311** |
| | | | | |
| | **Rakstur:** | | | |
| 1110 | Býráðið | 5.635 | 5.335 | -300 |
| 1310 | Býráðsskrivstova | 9.452 | 8.952 | -500 |
| 1311 | Miðfyrisiting | 30.456 | 29.856 | -600 |
| 1312 | Trivnaðarfyrisiting | 9.509 | 9.009 | -500 |
| 1313 | Tekniska fyrisiting | 27.348 | 25.148 | -2.200 |
| 1314 | Kunningartøkni | 10.617 | 10.217 | -400 |
| 1317 | Heilsu og umsorgan | 4.700 | 4.450 | -250 |
| | **§1** | **97.717** | **92.967** | **-4.750** |
| | | | | |
| 2720 | Heilsuhúsið | 40.992 | 40.492 | -500 |
| 2721 | Røktartænastur | 172.295 | 170.295 | -2.000 |
| 2730 | Fyrisiting | 5.449 | 4.949 | -500 |
| 2810 | Fíggjarligt fríplass | 4.500 | 4.130 | -370 |
| | **§2** | **223.236** | **219.866** | **-3.370** |
| | | | | |
| 3102-3105 | Eind BARN, 3. flokkur sept-des 2024 | 167.542 | 166.042 | -1.500 |
| 3210 | Hjálp vegna vantandi barnaansing | 500 | 300 | -200 |
| 3212 | Tímar vegna serligan tørv | 12.000 | 10.000 | -2.000 |
| 3213 | Systkinaavsláttur | 16.500 | 16.000 | -500 |
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing og leigugjald | 9.549 | 10.319 | 770 |
| | **§3** | **206.091** | **202.661** | **-3.430** |
| | | | | |
| 4115 | Kollafjarðar skúli | 3.408 | 3.403 | -5 |
| 4117 | Skúlin á Fløtum | 14.793 | 15.100 | 307 |
| 4118 | Eysturskúlin | 7.028 | 7.033 | 5 |
| 4119 | Sankta frans Skúli | 6.630 | 6.460 | -170 |
| 4120 | Hoyvíkar skúli | 4.304 | 4.365 | 61 |
| 4121 | Skúlin á Argjahamri | 5.165 | 5.190 | 25 |
| 4144 | Skúlabarnaflutningur | 213 | 113 | -100 |
| | **§4** | **41.541** | **41.664** | **123** |
| | | | | |
| 5510 | Tórshavnar Býarsavn | 840 | 540 | -300 |
| 5717 | Ítróttaranlegg | 17.975 | 17.500 | -475 |
| | **§5** | **18.815** | **18.040** | **-775** |
| | | | | |
| 6109 | Umsiting og røkt av  bygningum | 30.267 | 29.617 | -650 |
| 6510 | Kirkjugarðar | 4.682 | 4.082 | -600 |
| 6611 | Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk | 2.016 | 1.816 | -200 |
| 6810 | Kloakkir o.a. | 7.629 | 7.379 | -250 |
| 8110 | Vegir o.a. | 9.514 | 9.264 | -250 |
| 8111 | Reinhald | 9.157 | 8.907 | -250 |
| 8112 | Asfalt | 10.442 | 10.192 | -250 |
| | **§6** | **73.707** | **71.257** | **-2.450** |
| | | | | |
| 7310 | Vinnustrategi | 200 | 0 | -200 |
| 7311 | Vinnuverkætlanir | 1.275 | 1.200 | -75 |
| 7312 | Vinnutiltøk | 880 | 800 | -80 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 7316 | Hugskotið | 2.757 | 2.697 | -60 |
| 7317 | Talgilding til borgaran | 2.650 | 2.000 | -650 |
| 7710 | Ferðavinnan | 3.986 | 3.886 | -100 |
| 7712 | Visit Nólsoy | 425 | 400 | -25 |
| 7410 | Tórshavnar havn | -35.939 | -36.939 | -1.000 |
| 7475 | Tórshavnar havn | 15.000 | 16.000 | 1.000 |
| | **§7** | **-8.766** | **-9.956** | **-1.190** |
| | | | | |
| | **Rentur og avdráttir:** | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur | 10.378 | 13.217 | 2.839 |
| | Avdráttir | 21.574 | 23.033 | 1.459 |
| | | | | |
| | | | | |
| | **íalt** | **684.293** | **672.749** | **-11.544** |
| | | | | |
| | **Samlað broyting í rakstri, íroknað inntøkur** | **624.739** | **642.594** | **17.855** |

## Íløguætlan 2024:

| | | 2021 | 2022 | 2023 | **2024** |
|---|---|---|---|---|---|
| | | J | J | J | **F** |
| **§2** | **Almanna- og heilsumál** | **9.000** | **9.000** | **17.000** | **0** |
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | 1.000 | 1.000 | 1.000 | |
| 2775 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 4.000 | 6.000 | 15.000 | |
| 2775 | Eldradepil í Kollafirði | 2.000 | 1.000 | | |
| 2775 | Røktarheim, uttanumøki | 2.000 | 1.000 | 1.000 | |
| | | | | | |
| **§3** | **Børn og ung** | **8.000** | **34.000** | **7.000** | **14.900** |
| 3175 | Útbygging dagstovnurin á Hamrinum | | 30.000 | 5.000 | 13.900 |
| 3175 | Nýggjur dagstovnur á Argjum | 1.000 | | | |
| 3175 | Frítíðarskúlin við Botnánna í Kollafirði | 2.000 | | | |
| 3175 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | | 4.000 | | 1.000 |
| 3175 | Umbygging í Kongagøtu | 5.000 | | | |
| 3175 | Dagstovnar, uttanumøki | | | 1.000 | |
| 3175 | Dagføring frítíðarskúlar | | | 1.000 | |
| | | | | | |
| **§4** | **Undirvísing** | **0** | **3.900** | **22.500** | **18.000** |
| 4175 | Dagføring, Hoyvíkar skúli | | 2.000 | 1.000 | |
| 4175 | Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt | | 1.900 | | |
| 4175 | Skúlin á Argjahamri serstova | | | 1.500 | |
| 4176 | Framhaldsdeild í Sankta Frans | | | 20.000 | 18.000 |
| | | | | | |
| **§5** | **Mentan og frítíð** | **88.500** | **94.500** | **117.500** | **152.000** |
| 5175 | Musikkskúli | | | 1.000 | |
| 5275 | Kvøldskúlin | | 2.000 | | |
| 5475 | Býarbókasavn | | 2.000 | | |
| 5575 | Býarsavn | 1.500 | | | |
| 5775 | Langhylur | 65.000 | 40.000 | 54.000 | 84.000 |
| 5775 | Golf | 4.000 | 4.500 | 2.500 | |
| 5775 | Fimleikahøll/Borgarahús í Kaldbak | 1.000 | 5.000 | 10.000 | 10.500 |
| 5775 | Tórsvøllur | | 13.000 | | |
| 5775 | Byrsumúli/skjótibreyt | 5.000 | 5.000 | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 5775 | Vøllur í Hoyvík | 2.500 | | | |
| 5775 | Tórsbreyt | 500 | | | |
| 5775 | Ovari vøllur | 4.000 | | | |
| 5775 | Stórhøll | 1.000 | 10.000 | 50.000 | 56.000 |
| 5775 | Fótbóltsvallir, Argir-Hoyvík | | 10.000 | | |
| 5775 | Niðari vøllur/vøllur á Argjum | 3.000 | | | |
| 5775 | Venjingarhøli í Kollafirði | 1.000 | | | |
| 5775 | Gundadalshøllin | | 1.000 | | |
| 5775 | Innandura spælipláss | | 1.000 | | |
| 5775 | Frælsur ítróttur | | 1.000 | | |
| 5775 | Ríðibreyt í Havnardali | | | | 1.500 |
| **§6** | **Teknisk mál** | **52.400** | **83.100** | **130.700** | **156.600** |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Keyp av Kurlu | 2.100 | 1.200 | 1.200 | |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Søla | -3.100 | -3.100 | | |
| 6177 | Orkupolitikkur - átøk | 4.000 | 8.000 | 8.000 | 6.000 |
| 6177 | Fjarhitafelagið | | 15.000 | | |
| 6275 | Fiskastykkið - Bukkvald | 500 | | | |
| 6275 | Miðbýarætlan/Vágsbotnur | 3.000 | | | |
| 6275 | Torg frammanfyri FSF | 5.000 | | 2.000 | |
| 6275 | Standmynd av Andreu Áting | | | 1.000 | |
| 6275 | Súkklugøtur og skýli | 1.000 | | | |
| 6275 | Gamla grótbrúgvin um Sandá í Havnadali | 2.500 | | | |
| 6275 | Torg í Hoyvík | | 1.000 | 2.000 | |
| 6275 | Vetrarfriðing í Kollafirði og Nólsoy | 700 | 1.000 | | |
| 6275 | Viðarlundin, træplanting o.a. | | 1.000 | | |
| 6275 | Spælipláss, Grasagarð, Glaðsheygg o.a. | | 5.000 | | |
| 6275 | Miðbýarætlan | | 8.000 | 10.000 | |
| 6275 | Lendisgøtur | | 4.000 | | 2.000 |
| 6275 | Fríðkan, bygdir og økir | | 2.000 | 1.000 | |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 3.000 | 5.000 | 3.000 | 3.000 |
| 6475 | Útstykking oman fyri Argjahamar, útreiðslur | | | 30.000 | 21.000 |
| 6475 | Utstykking oman fyri Argjahamar, inntøkur | | | -30.000 | -21.000 |
| 6575 | Kirkjugarðar | 3.200 | | | |
| 6575 | Kapellið | | | 5.000 | |
| 6775 | Vatnverk í Kollafirði | 4.000 | | | |
| 6775 | Vatnreinsiverk í Havnardali | | 1.000 | 1.000 | |
| 6875 | Kloakkir | 6.000 | 8.000 | 8.000 | 5.000 |
| 8175 | Innkomuvegur, útreiðsla | | 10.000 | 108.000 | 105.700 |
| 8175 | Innkomuvegur, inntøka | | | -33.500 | -31.100 |
| 8175 | Innkomuvegur, íbinding | | | | 58.000 |
| 8175 | Parkeringstunnil | 4.000 | | 3.000 | |
| 8175 | Karlamagnussarbreyt | 4.000 | | | |
| 8175 | Parkering | | 3.000 | | |
| 8175 | Vegaverkætlanir | 12.500 | 8.000 | 6.000 | 5.000 |
| 8375 | Rakstrargøgn | | 5.000 | 5.000 | 3.000 |
| **§7** | **Kommunal virki** | **16.000** | **25.000** | **5.100** | **1.000** |
| 7175 | Renovatión | 1.000 | | | |
| 7175 | Renovatión, skiljihøll | | 7.000 | 1.600 | |
| 7476 | Smábátahavn Álakeri | 15.000 | 18.000 | | |
| 7476 | Smábátahavn | | | 3.500 | 1.000 |
| | | **173.900** | **249.500** | **299.800** | **342.500** |
| 7475 | Tórshavnar havn | 36.000 | 24.000 | 20.000 | 16.000 |
| 7475 | Fyrireiking av landstreymi | | | | |
| | **Samanlagt** | **209.900** | **273.500** | **319.800** | **358.500** |

Soleiðis, at uppskotið til fíggjarætlan 2024, ið verður beint til aðru viðgerð er soljóðandi:

**Fíggjarætlan 2024:**

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2022 | Ætlan 2023 | Ætlan 2024 | Broyting 2023/2024 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 949.946 | 951.000 | 1.011.886 | 6,40% | *60.886* |
| 20601 | Felagsskattur | 68.221 | 60.000 | 58.000 | -3,33% | *-2.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 740 | 1.000 | 1.000 | 0,00% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 182.831 | 191.862 | 209.753 | 9,32% | *17.891* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.659 | 36.421 | 35.704 | -1,97% | *-717* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.237.398** | **1.240.283** | **1.316.343** | **6,13%** | ***76.060*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 99.884 | 100.179 | 100.711 | 0,53% | *532* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 298.882 | 313.190 | 321.967 | 2,80% | *8.777* |
| §3 | Børn og ung | 224.266 | 225.921 | 235.493 | 4,24% | *9.571* |
| §4 | Undirvísing | 47.450 | 51.617 | 56.537 | 9,53% | *4.920* |
| §5 | Mentan og frítíð | 65.195 | 64.636 | 70.349 | 8,84% | *5.713* |
| §6 | Teknisk mál | 157.998 | 152.110 | 156.684 | 3,01% | *4.574* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 88.240 | 85.699 | 90.982 | 6,16% | *5.283* |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **981.916** | **993.353** | **1.032.722** | **3,96%** | ***39.370*** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -40.070 | -36.939 | -7,81% | *3.131* |
| | **Rakstur íalt** | **940.214** | **953.283** | **995.783** | **4,46%** | ***42.501*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 19.926 | 18.000 | 30.000 | 66,7% | *12.000* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.107 | 2.000 | 2.000 | 0,00% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **22.033** | **20.000** | **32.000** | **60,0%** | ***12.000*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **275.151** | **267.001** | **288.560** | **8,1%** | ***21.559*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 5.183 | 651 | 13.217 | 1930,23% | *12.566* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 4.482 | 5.043 | 12,52% | *561* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -3.682 | 0 | 0 | 0,00% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | -500 | 0 | 0,00% | |
| | **Rentur íalt** | **8.865** | **5.633** | **18.260** | **224,2%** | ***12.627*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **266.286** | **261.368** | **270.301** | **3,4%** | **8.933** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **23.033** | 1766,53% | *21.799* |
| | **Avdráttir TH** | **15.180** | **15.873** | **15.873** | 0,00% | *0* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **249.872** | **244.261** | **231.395** | **-5,27%** | **-12.866** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **223.350** | **225.046** | **215.372** | **-4,30%** | **-9.674** |

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við broytingaruppskotinum og beina málið í býráðið til aðru viðgerð.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð um fíggjarætlanina við teimum broytingum, ið meirilutin í fíggjarnevndini hevur lagt fram, og varð málið samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra blonkum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Súsanna Olsen og Bogi Andreasen.

Blankt atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Barnafrádrátturin ásettur til kr. 9.000 og skattaprosentið ásett til 19,00.

## 295/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 91/23 | 23/00151-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 97/23 | 23/00151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 85/23 | 23/00151-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 129/23 | 23/00151-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 116/23 | 23/00151-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 154/23 | 23/00151-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 132/23 | 23/00151-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 186/23 | 23/00151-1 |
| 11 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 178/23 | 23/00151-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 255/23 | 23/00151-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 222/23 | 23/00151-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 287/23 | 23/00151-1 |
| 15 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 262/23 | 23/00151-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 22.11.2023 | 324/23 | 23/00151-1 |
| 17 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 295/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**

Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.
**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. november 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 19:15</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Súsanna Olsen | Turið Horn |
| | Bogi Andreasen | |